# ORÐASKYN

## Mín fyrsta orðabók




Føroya Skúlabókagrunnur

Materiál chránený autorskými právy

# ORÐASKYN
## Mín fyrsta orðabók

Materiál chráněný autorskými právy

# ORÐASKYN

## Mín fyrsta orðabók

*Ingrið Sondum*
*Petur Martin Danielsen*
*Niels Nattestad*
*Djóni Dalsgarð*

*Tekningar:*
*Martin Joensen*

Føroya Skúlabókagrunnur

This One
LKXC-GFF-WWHX
Materiál chráněný autorskými právy

ORÐASKYN. Mín fyrsta orðabók
eftir Ingrið Sondum, Petur Martin Danielsen,
Niels Nattestad og Djóna Dalsgarð.
Kápa og myndir: Martin Joensen.
Satsur og repro: Hestprent.
Prent: Estra.
Hefting: Helge Justinussen.
Útgáva: Føroya Skúlabókagrunnur, Tórshavn 1994.

Materiál chráněný autorskými právy

# Fororð

ORÐASKYN er ætlað sum tann fyrsta orðabókin hjá næmingunum. Vit hava lagt okkum eftir at finna tey vanligu orðini, sum børnini dagliga hoyra og lesa. Orðini eru mest úr Lesibók til 3., 4. og 5. skúlaár og úr Rættskrivingarorðalistanum eftir Jeffrei Henriksen.

Endamálið við orðabókini er at venja næmingarnar at nýta orðabøkur. Ein týðandi táttur í hesi venjing er, at lærarin ger uppgávur, ið hóska til teir ymsu aldursbólkarnar.

Okkara vón er, at ORÐASKYN fer at hjálpa næmingunum at stava orð rætt, um bókin altíð er við hondina, og at tað gerst ein vani hjá teimum at sláa orð upp, sum ivi er um.

Í orðabókini eru eini 3000 leitorð. Bend eru navnorð, sagnorð og lýsingarorð.

Bókin er prýdd við einum 450 smámyndum, sum Martin Joensen hevur teknað.

Vit takka teimum, sum hava stuðlað við góðum ráðum og leiðbeiningum og á annan hátt verið til hjálpar við útgávuni.

Materiál chráněný autorskými právy

# Stutt frágreiðing

**Navnorð** eru bend í hvør- og hvørsfalli eintali og í hvørfalli fleirtali.

Dømi: *barn, barns, børn.*

**Sagnorð** eru bend soleiðis:

*Tey veikt bendu sagnorðini,* sum enda við *-ði* í tátíð eintali, standa í navnhátti og í tátíð eintali.

Dømi: *skriva, skrivaði.*

Øll onnur veikt bend sagnorð standa í navnhátti, 3. persóni nútíð eintali og tátíð eintali.

Dømi: *fletta, flettir, fletti.*

**Tey sterkt bendu sagnorðini** standa í navnhátti, 3. persóni nútíð eintali og tátíð eintali, í tátíð fleirtali og í 2. lýsingarhátti.

Dømi: *finna, finnur, fann, funnu, funnið.*

**Lýsingarorð** eru bend í kynjum.

Dømi: *lágur, lág, lágt.*

Orð við **y, ý** og **æ** í fyrsta stavilsi eru sett í stavrað við **i, í** og **a**. Har standa tey við ⇨ at vísa, at leitað skal verða eftir orðinum á rættum staði í bókstavaraðnum.

Í ORÐASKYNI er tað norðurlendska bókstavaraðið brúkt.

Í bókini eru hesar styttingar:

| | |
|---|---|
| *k* | navnorð kallkyn |
| *kv* | navnorð kvennkyn |
| *h* | navnorð hvørkikyn |
| *flt* | fleirtal |
| *s* | sagnorð |
| *l* | lýsingarorð |



Materiál chráněný autorskými právy

# A

**abbi** k
*abbi, abba, abbar*
**Abbi** mín rør út.

**adressa** **sí bústaður**

**advent** kv
*advent, adventar, adventir*
= jólaføsta
Í **advent**kransinum eru fýra ljós.



**æða** ⇨

**aðalfundur** k
*aðalfundur, -fundar, -fundir*
Flest øll feløg hava **aðalfund** eina ferð um árið.



**æðr** ⇨

**aðrar**
Jón vildi hava nakrar **aðrar** bøkur.

**aðrastaðni**
**Aðrastaðni** í bygdini er veðurbetri.

**Afrika**
Í **Afrika** búgva afrikanar.

**aftan**
Guðrun stóð **aftan** fyri meg.
Guðrun stóð **aftan**fyri.

**aftari**
Jógvan var **aftari** av teimum báðum.

**aftarlaga**
**Aftarlaga** á rygginum er hárógva.

**aftastur**
Tann hvíti báturin var **aftastur.**

**aftra** s
*aftra, aftraði*
Hon **aftraði** seg at fara út, tí at hon var so illa ílatin.



Materiál chráněný autorskými právy

# A

## aftur
Lat hurðina **aftur.**

## aftursøgn kv
*aftursøgn, -sagnar, -sagnir*
Lærarin lesur eina **aftursøgn**, sum næmingarnir so skriva.

## agn h
*agn, agns, øgn*
Høgguslokkur er gott **agn.**



## agurka kv
*agurka, agurku, agurkur*
Hjá okkum vaksa **agurkur** í vakstrarhúsum.

## aka s
*aka, ekur, ók, óku, ikið*
Um veturin er stuttligt at **aka** á skíð.



## akfar h
*akfar, akfars, akfør*
**Akførini** koyra umborð á ferjuna.

## akker h
*akker, akkers, akker*
Skip hava vanliga tvey **akker.**

## akta s
*akta, aktaði*
Bjarki **aktaði** langommu.

## akur k
*akur, akurs, akrar*
Bóndin fór í bøin at skera **akur.**

## æl ⇨

## ala s
*ala, elur, ól, ólu, alið*
Hann **elur** laks í ringum.



## albogi k
*albogi, -boga, -bogar*
**Alboga**stoytur er meinur.

## alda kv
*alda, aldu, aldur*
**Aldurnar** skola langt niðan á sandin.

## aldur k
*aldur, aldurs, aldrar*
Allir **aldurs**bólkar vóru umboðaðir á ólavsøku.

## alisfrøði kv
*alisfrøði, alisfrøði,* – flt
7. flokkur hevur **alisfrøði.**

## allahalgannadagur k
= 1. november
**Allahalgannadagur** er minningardagur teirra sjólátnu.



Materiál chráněný autorskými právy

**allastaðni**
Jógvan leitaði **allastaðni**, men fann ikki knívin.

**alljósur** l
*alljósur, alljós, alljóst*
Tá ið Bjørg vaknaði, var **alljósur** dagur.

**allur** l
*allur, øll, alt*
**Allur** fiskurin varð saltaður.
**Øll** grindin varð tikin upp.
**Alt** hoyggið varð borið inn.

**alskyns**
Í trolinum var **alskyns** fiskur.

**altíð**
Tá ið sólin skínur, eru vit **altíð** glað.

**amast** s
*amast, amaðist*
Hundurin **amaðist** upp á seyðamannin.

**amboð** h
*amboð, amboðs, amboð*
Hamari og tong eru hent **amboð.**



**ambæta** s
*ambæta, ambætar, ambætaði*
At **ambæta** neytum er at ansa og geva teimum.

**Amerika**
Í **Amerika** búgva amerikanar.

**analfabetur** k
*analfabetur, analfabets, analfabetar*
Fólk, ið ikki duga at lesa og skriva, eru **analfabetar.**

**andlit** h
*andlit, andlits, andlit*
Hon hevur milt **andlit.**



**andsperri** h
*andsperri, andsperris, andsperri*
Eftir fimleik hevði Elsa **andsperri** í lørunum.

**andvekur** k
*andvekur, -vekurs,* – flt
Ringt er at liggja í **andvekri** heila nátt.

**anga** s
*anga, angaði*
Flestu blómur **anga** væl.

**angi** k
*angi, anga, angar*
Á geisla eru tríggir **angar.**

**angist** **sí ótti**



Materiál chráněný autorskými právy

# A

**angra** s
*angra, angraði*
Dávid kongur **angraði** synd sína.

**Anna**
*Anna, Onnu, Onnu, Onnu*
Karl spældi við **Onnu** í gjár.

**annaðhvørt**

**Annaðhvørt** neyst er svart.

**annar**
*annar, onnur, annað*
**Annar** hundurin goyði.
**Onnur** kettan lepti.
**Annað** lambið jarmaði.

**annars**
Veðrið er ringt, **annars** er alt í lagi.

**anorakkur** k

*anorakkur, anoraks, anorakkar*
Óli er í **anorakki.**

**ansa** s
*ansa, ansaði*
Per **ansaði** eftir systur síni.

**antenna** kv

*antenna, antennu, antennur*
Sjónvarps**antennan** er fest í skjøldurin.

**apa** kv
*apa, apu, apur*
Børnini vóru hugtikin av **apunum** í djóragarðinum.

**apotek** h
*apotek, apoteks, apotek*
Á **apotekinum** fæst heilivágur.

**appilsin** kv
*appilsin, appilsinar, appilsinir*
Ólavi dámar væl **appilsinir.**

**apríl**
14. **apríl** er summarmáladagur.

**ær** ⇨

**arbeiða** s
*arbeiða, arbeiðir, arbeiddi*
Sigga **arbeiðir** á flakavirkinum.

**arbeiði** h

*arbeiði, arbeiðis, arbeiði*
Teir gjørdu **arbeiðið** liðugt.

**arbeiðsleysur** l
*arbeiðsleysur, -leys, -leyst*
Ringt er at vera **arbeiðsleysur.**

**arbeiðssamur** l
*arbeiðssamur -som, -samt*
Annika var **arbeiðssom**.



Materiál chráněný autorskými právy

**arga** s

*arga, argaði*

Barnið varð illa **argað.**

**ark** h

*ark, arks, ørk*

Úr einum heilum **arki** fáast sekstan A4 **ørk.**

**ærligur** ⇨

**armur** k

*armur, arms, armar*

Gunnar smoygdi upp um **armar** og fór til verka.

**arr** h

*arr, ars, arr*

Sjórænarin hevur grefligt **arr** á kjálkanum.



**arva** s

*arva, arvaði*

Símun hevur **arvað** eini hús í heimbygdini.

**arvingur** k

*arvingur, arvings, arvingar*

**Arvingarnir** vóru nógvir, so lítið var í part.

**asfalt** h

*asfalt, asfalts, – flt*

**Asfalt** verður lagt á vegirnar.



**at**

Ferjan legði **at** í Skopun.

**atburður** k

*atburður, -burðar, -burðir*

Børnini sýndu góðan **atburð.**

**æti** ⇨

**atkvøða** kv

*atkvøða, atkvøðu, atkvøður*

Flokkurin fekk nógvar **atkvøður** til valið.

**ætla** ⇨

**atombumba** k

*atombumba, -bumbu, -bumbur*

Fyrsta **atombumban** varð sprongd í 1945.

**ætt** ⇨

**atvold** k

*atvold, atvoldar, atvoldir*

Hann var **atvoldin** í óhappinum.

**august**

Í **august** mánaði verður hoyggjað.

**automatiskur** l

*automatiskur, automatisk, automatiskt*

= sjálvvirkandi

Summir bilar hava **automatiskt** gervi.



Materiál chráněný autorskými právy

# A

**av**
Óli datt **av** hestinum.

**avbyrgdur** l
*avbyrgdur, avbyrgd, avbyrgt*
Bygdin er **avbyrgd.**

**avdúka** s
*avdúka, avdúkaði*
Dóttirin **avdúkaði** standmyndina.
Brotsmaðurin varð **avdúkaður.**



**avgamal** l
*avgamal, avgomul, avgamalt*
Langabbi er **avgamal**.

**avgerð** kv
*avgerð, -gerðar, -gerðir*
Tað var ein góð **avgerð.**

**avgreiðsla** kv
*avgreiðsla, avgreiðslu, avgreiðslur*
Smyril hevur **avgreiðslu** úti á bryggjuni.

**avgudur** k
*avgudur, avguds, avgudar*
Gullkálvurin hjá ísraelsmonnum var **avgudur.**

**ævi** ⇨

**ævintýr** ⇨

**avlýsa** s
*avlýsa, avlýsir, avlýsti*
Strandferðslan **avlýsir** allar túrar fyri veður.

**avroð** h flt
**Avroð** er høvd, hjarta, livur, lungur, vomb og blóð.

**avstað**
Trolarin fór **avstað** í gjárkvøldið.

**Avstralia**
Í **Avstralia** liva kengurur.

**avtala** kv
*avtala, avtalu, avtalur*
Brøðurnir gjørdu **avtalu** um at smíða bát.



Materiál chráněný autorskými právy

# Á

**á** kv



*á, áar, áir*
Børnini spæla í **ánni.**

**áarføri** h
*áarføri, áarføris, áarføri*
Tað var **áarføri**, tí at tað regnaði so illa.

**áarløkur** k
*áarløkur, -løks, -løkir*
Við húsini rennur ein lítil **áarløkur.**

**ábart**
= ábært
Tá ið nógvur vindur er, er **ábært** hjá okkum.

**ábært**
= ábart

**ábit** h



*ábit, ábits, ábit*
**Ábit** er fyrsta máltíð á morgni.

**ábreiðsla** kv
*ábreiðsla, ábreiðslu, ábreiðslur*
Mamman gav Póli **ábreiðslu**, tí hann hevði sligið Snar.

**ábyrgd** kv
*ábyrgd, ábyrgdar, ábyrgdir*
Skiparin hevur **ábyrgdina** umborð.

**áðni**
Í **áðni** var skýming, men nú er myrkt.

**áðrenn**
Ása bustar altíð tenn, **áðrenn** hon fer í song.

**áfastur** l



*áfastur, áføst, áfast*
Húsini eru **áføst.**

**ágangur** k
*ágangur, ágangs, – flt*
= trýst, hørð viðferð
**Ágangurin** á tey svørtu hevur mangan verið harður.



Materiál chráněný autorskými právy

# Á

**ágrýtin** l
*ágrýtin, ágrýtin, ágrýtið*
Elsa var **ágrýtin** og fekk tí nógv burturúr.

**áhaldsin** l

*áhaldsin, áhaldsin, áhaldsið*
Maja var **áhaldsin** og datt útí.

**ákæra** kv
*ákæra, ákæru, ákærur*
Løgreglan reisti **ákæru** ímóti bilføraranum, tí hann hevði koyrt ov skjótt.

**ál** kv
*ál, álar, álir*
Jóannes skar húðina í **álir.**

**állur** k
*állur, áls, állar*
Torkil fangar **állar** í ánni.

**álmanakki** k
*álmanakki, álmanakka, álmanakkar*
Í **álmanakkanum** sæst, nær ið fullmáni er.

**álur** k
*álur, áls, álar*
**Álar** eru í ánni.

**álvara** h
*álvara, álvara, – flt*
Til gamans og **álvara.**


**álvarsamur** l

*álvarsamur, -som, -samt*
Bina er so **álvarsom.**

**ápostul** k
*ápostul, ápostuls, ápostlar*
Ein **ápostul** æt Markus.

**ár** h
*ár, árs, ár*
Um **árs**skiftið ynskja vit hvør øðrum gott nýggj**ár**.

**ár** kv
*ár, árar, árar*
**Árar** eru í bátinum.

**áralag** h
*áralag, áralags, áraløg*
Manningin á Firvaldi hevði gott **áralag**.

**árla**
Sólin reis **árla** á morgni.

**áræði** h
*áræði, áræðis,* –flt
= dirvi, mót
Foreldrini høvdu **áræði** at fara undir at byggja.

**áseta** s
*áseta, ásetur, ásetti*
Ráfiskagrunnurin **ásetur** fiskaprísir fleiri ferðir um árið.



Materiál chráněný autorskými právy

## Ásia
Í **Ásia** býr meira enn helmingurin av heimsins fólki.

## átjan
Karl fekk koyrikort **átjan** ára gamal.

## átta
Fleiri børn í 2. fokki eru **átta** ár.

## áttati
Langomma varð **áttati** í fyrradagin.

## átufrekur l
*átufrekur, átufrek, átufrekt*
Havtaskan er **átufrek.**

## ávaring kv


*ávaring, ávaringar, ávaringar*
Dómarin gav spælaranum **ávaring.**

## ávirka s
*ávirka, ávirkaði*
Anna er nógv **ávirkað** av Jákupi.

## ávum
Av mínum **ávum** slapp Knútur til skips.


Materiál chráněný autorskými právy

# B

**badminton**



Pól spælir **badminton** í høllini.

**bað** h
*bað, baðs, bað*
Børnini fóru í **bað.**

**baga** l
*baga, bagir, bagdi*
Altíð **bagir** illum barni okkurt (orðtak).

**baka** s
*baka, bakaði*
Sigurð hevur **bakað** pannukøkur.

**bakari** k
*bakari, bakara, bakarar*
Súni er í læru hjá **bakaranum.**

**bakborð** h
*bakborð, -borðs, -borð*
**Bakborðs**lanternan er reyð.

**bakhjól** h
*bakhjól, -hjóls, -hjól*
Hol fór á **bakhjólið**.

**bakki** k
*bakki, bakka, bakkar*
Seyðurin stendur niðri á **bakkanum.**

**bakteria** kv
*bakteria, bakteriu, bakteriur*
**Bakteriur** síggjast bert í sjóneyku.

**bakverji** k
*bakverji, -verja, -verjar*
**Bakverjarnir** vóru bestir á vøllinum.

**balja** kv
*balja, balju, baljur*
**Baljan** stendur á gólvinum.



**ball** h
*ball, bals, ball*
Tummas roykir **ball.**



Materiál chráněný autorskými právy

**ballón** kv
*ballón, ballónar, ballónir*
Børnini fingu **ballónir** á ólavssøku.



**balstýrin** l
*balstýrin, balstýrin, balstýrið*
Flokkurin var ikki at fáast við. Hann var **balstýrin**.

**bambus** h
Sjúrður eigur eina **bambus**tráðu.

**bamsa** kv
*bamsa, bamsu, bamsur*
Ein gul **bamsa** liggur á seingini.



**banan** kv
*banan, bananar, bananir*
**Bananir** vaksa í Suðurlondum.

**band** h
*band, bands, bond*
Hoppi**bandið** hjá Unn slitnaði.

**bandupptakari** k
*bandupptakari, -takara, -takarar*
Hann keypti nýggjan **bandupptakara.**

**bangin** l
*bangin, bangin, bangið*
Teir vóru **bangnir** um bátin.

**banka** s
*banka, bankaði*
Børnini spæla **banka** kjøt.

**banki** k
*banki, banka, bankar*
Teir fiskaðu væl á Fugloyar**banka.**
Tóra eigur nógvar pengar í **bankanum.**

**banna** s
*banna, bannaði*
Pápanum dámdi ikki, at tey **bannaðu.**
Royking er **bannað.**

**bara**
Sonja spældi **bara** við Gunnvá.

**bara** s
*bara, baraði*
Ragnar fekk ikki **barað** sær, men mátti læa.

**bardagi** k
*bardagi, bardaga, bardagar*
Tað stóð á jøvnum í **bardaganum**.



Materiál chráněný autorskými právy

B

## barðlangur l
*barðlangur, barðlong, barðlangt*
Óvitin datt **barðlangur** í hylin.

## barkakýli h
*barkakýli, -kýlis, -kýli*
**Barkakýlið** sæst á hálsinum á monnum.

## barn h
*barn, barns, børn*
Tóta møtti einum fremmandum **barni** á vegnum.

## barnagarður k

*barnagarður, -garðs, -garðar*
Gunna gongur í **barnagarð.**

## barnsligur l
*barnsligur, -lig, -ligt*
Drongurin er so **barnsligur.**

## bartrog h
*bartrog, -trogs, -trog*
Ormur bóndi var illavorðin, hann var eitt satt **bartrog.**

## basa s
*basa, basir, basti*
Sløkkiliðið **basti** eldinum.

## bassur k
*bassur, bass, bassar*
Terji spælir **bass**gittara.

## batna s
*batna, batnaði*
Veðrið **batnaði** móti morgni.

## batt h
Tórður hevur borðtennis**battið** í hondini.

## battarí h
*battarí, battarís, battarí*
**Battaríini** í lyktini eru útbrend.

## báðir
*báðir, báðar, bæði*
Teir komu **báðir** í senn.
Tær komu **báðar** í senn.
Tey komu **bæði** í senn.

## bál h

*bál, báls, bál*
Skótarnir brendu **bál** á leguni.

## básur k
*básur, bás, básar*
Kálvurin stendur á **básinum.**

## bátur k
*bátur, báts, bátar*
**Bátarnir** róðu kapp á vestanstevnu.

## beiggi k
*beiggi, beiggja, beiggjar*
**Beiggi** mín fylti fimm ár í gjár.



Materiál chráněný autorskými právy

**bein** h
*bein, beins, bein*
Líggjas tók til **beins** undan Leivi.

**beinleiðis**
Útvarpið sendir **beinleiðis** frá kappróðrinum.

**Beinta**
*Beinta, Beintu, Beintu, Beintu*
Hjá **Beintu** er so hugnaligt.

**beinur** l
*beinur, bein, beint*
Garðurin er snóra**beinur.**

**beiskur** l
*beiskur, beisk, beiskt*
Tað grøna eplið var **beiskt.**

**beist** h
*beist, beists, beist*
Summi søgdu, at Kálvur Lítli var eitt **beist.**

**beistast** s
*beistast, beistaðist*
Børnini **beistaðust** í kjallaranum.



**beita** kv
*beita, beitu, beitur*
Hákun skar sær eina **beitu** av seiðinum.

**beita** s
*beita, beitir, beitti*
Bóndin **beitti** hundin eftir seyðinum.

**beiti** h
*beiti, beitis, beiti*
Kúgvin stendur á heima**beiti.**

**bekkur** k
*bekkur, beks, bekkir*
Báturin hevur fýra **bekkir.**

**bendil** k
*bendil, bendils, bendlar*
Dýnuverið er bundið saman við **bendlum.**

**bensin** h
*bensin, bensins,* – flt
Turið stoytti **bensin** í tangan á prutlinum.



**ber** h
*ber, bers, ber*
Børnini fóru í hagan at henta **ber.**

**bera** s
*bera, ber, bar, bóru, borið*
Billa **ber** beiggja sín.

**berg** h
*berg, bergs, berg*
Lomvigin eigur í **berginum.**




Materiál chráněný autorskými právy

**berggylta** kv
*berggylta, -gyltu, -gyltur*
**Berggyltan** heldur til í taraskóginum.

**berghol** h
*berghol, -hols, -hol*
Fyrsta **bergholið** í Føroyum varð gjørt millum Hvalba og Trongisvág.



**bergmál** h
*bergmál, -máls, -mál*
= ekkó = afturljóð.

**berjalyngur** k
*berjalyngur, -lyngs, – flt*
**Berjalyngur** veksur í haganum.

**bersøgin** l
*bersøgin, bersøgin, bersøgið*
At vera **bersøgin** er at siga alt.

**bert**
Tað vóru **bert** 5 gentur í flokkinum.

**berur** l
*berur, ber, bert*
Tað var so heitt, at teir gingu **berir.**

**betong** h
*betong, betongs, – flt*
Grundin er úr **betongi.**

**betri** **sí góður**

**betur** **sí væl**

**biddari** k
*biddari, biddara, biddarar*
**Biddarar** bidda frá fólki.

**biðil** k
*biðil, biðils, biðlar*
**Biðilin** bað sær gentu.

**biðja** s
*biðja, biður, bað, bóðu, biðið*
Niels **biður** ommu geva sær bomm.

**bygd** ⇨

**bygg** ⇨

**byggja** ⇨

**bygningur** ⇨

**bikar** h
*bikar, bikars, bikar*
Eggið stendur í **bikarinum.**





Materiál chráněný autorskými právy

**bil** h
*bil, bils, bil*
Eyð bað mammu bíða eitt lítið **bil.**

**bilførari** k
*bilførari, -førara, -førarar*
**Bilførarin** kendi sína ábyrgd.

**bylgja** ⇨

**bilhús** h
*bilhús, -hús, -hús*
Bilurin stendur í **bilhúsinum.**

**billa** s
*billa, billaði*
Hvat **billar** tú tær inn.

**bilsin** l
*bilsin, bilsin, bilsið*
Katrin gjørdist **bilsin**, tá ið hon frætti tíðindini.

**bilur** k
*bilur, bils, bilar*
Martin seldi báðar **bilarnar.**

**binda** s
*binda, bindur, bant, bundu, bundið*
Birita hevur **bundið** bulin lidnan.

**biologi** **sí lívfrøði**

**byrði** ⇨

**byrging** ⇨

**byrgja** ⇨

**birgur** l
*birgur, birg, birgt*
Abbi er heilt **birgur** eftir skurðviðgerðina.

**byrja** ⇨

**byrsa** ⇨

**byrur** ⇨

**biskupur** k
*biskupur, biskups, biskupar*
**Biskupur** prædikaði 1. jóladag.

**bismari** k
*bismari, bismara, bismarar*
Sakaris vigaði tálgina á **bismara.**



**bispur** k
*bispur, bisps, bispar*
Pætur flutti **bispin** og skákaði.



**biti** k
*biti, bita, bitar*
Omma gav Djóna ein **bita.**
Lampan hongur undir **bitanum.**



Materiál chráněný autorskými právy

**bíblia** kv
*bíblia, bíbliu, bíbliur*
**Bíblian** liggur á altarinum.



**bíða** s
*bíða, bíðaði*
Tróndur hevur **bíðað** leingi eftir pakkanum.

**bíleggja** s
*bíleggja, bíleggur, bílegði, bíløgdu, bílagt*
Tey **bíløgdu** ferðaseðlarnar í góðari tíð.

**bíligur** l
*bíligur, bílig, bíligt*
Húsini vóru **bílig.**

**býlingur** ⇨

**bílæti** h
*bílæti, bílætis, bílæti*
Tey ynsktu sær eitt **bílæti** av ommu og abba.



**býráð** ⇨

**bíta** s
*bíta, bítur, beit, bitu, bitið*
Hundurin **bítur** illa.

**býta** ⇨

**býttlingur** ⇨

**býttur** ⇨

**býur** ⇨

**bjarga** s
*bjarga, bjargaði*
Skipið sakk, men manningin varð **bjargað.**

**Bjarki**
*Bjarki, Bjarka, Bjarka, Bjarka*
Kára er dóttir **Bjarka**.

**bjálki** k
*bjálki, bjálka, bjálkar*
**Bjálkin** er gisnaður**.**

**bjálva** l
*bjálva, bjálvaði*
Tey **bjálvaðu** sær húsini.

**bjóða** s
*bjóða, býður, beyð, buðu, boðið*
Búgvi er **boðin** í brúdleyp.

**bjølla** kv
*bjølla, bjøllu, bjøllur*
Á jólatrænum hanga **bjøllur.**



**bjørn** kv
*bjørn, bjarnar, bjarnir*
Í Grønlandi eru hvíta**bjarnir.**



Materiál chráněný autorskými právy

## blæa ⇨



## blað h
*blað, blaðs, bløð*
Trøini hava grøn **bløð.**
Omman lesur í **blaðnum.**

## blaða s
*blaða, blaðaði*
Unn sat og **blaðaði** í litablaðnum.

## blaðmaður k
*blaðmaður, -mans, -menn*
**Blaðmenn** vóru við á ferðini.

## blak h
*blak, blaks, – flt*
Børnini fingu **blak**súpan við rosinum í.

## blaka s
*blaka, blakaði*
Súsanna **blakaði** bókina burtur.
Ólavur mátti **blaka** sær, tí hann var so kaldur.

## blaktra s
*blaktra, blaktraði*
Stjørnurnar **blaktraðu** á luftini.

## blanda s
*blanda, blandaði*
Mona hjálpti pápa sínum at **blanda** sement.



## blankur l
*blankur, blonk, blankt*
Vatnið er spegils**blankt.**

## bláber h
*bláber, blábers, bláber*
Vit fingu **bláberja**súpan omaná.



## blámi k
*blámi, bláma, – flt*
Pætur leyp á **bláman** eftir beiggja sínum, sum var um at drukna.

## blása s
*blása, blæsur, blásti, blástu, blást*
Kári **blæsur** sápubløðrur.

## bláur l
*bláur, blá, blátt*
Veðrið er gott, og himmalin er **bláur.**

## bleikur l
*bleikur, bleik, bleikt*
Pól hevði sjóverk og var **bleikur** sum eitt lík.

## bleytur l
*bleytur, bleyt, bleytt*
Fía fekk ein **bleytan** pakka.


Materiál chráněný autorskými právy

**blika** s



*blika, blikaði*
Veðrið var so gott, at sjógvurin **blikaði.**

**blikk** h
*blikk, bliks, blikk*
Børnini fangaðu kombikk upp í eitt **blikk.**

**blikksmiður** k



*blikksmiður, -smiðs, -smiðir*
**Blikksmiðirnir** settu hitaketilin upp.

**blikur** k
*blikur, bliks, blikar*
Æðu**blikurin** svam úti fyri lendingini.

**blindtarmur** k
*blindtarmur, -tarms, -tarmar*
Leivur varð innlagdur við **blindtarms**bruna.

**blindur** l
*blindur, blind, blint*
Abbi er star**blindur**, hann sær ikki dagsins ljós.

**blinkstra** s
*blinkstra, blinkstraði*
Óli **blinkstraði** til Lenu.

**blýantur** ⇨

**blits** h
*blits, blits, blits*
Marjun fekk myndatól við **blitsi.**

**blíðskapur** k
*blíðskapur, -skapar, -skapir*
**Blíðskapurin** var óførur.

**blíður** l
*blíður, blíð, blítt*
Hvør var **blíðari** enn annar.

**blýggj** ⇨

**blokkfloyta** kv
*blokkfloyta, -floytu, -floytur*
Børnini spæla **blokkfloytu.**

**blokkur** k
*blokkur, bloks, blokkar*
Elsa gav Mariu ein tekni**blokk** og litblýantar.

**blomstur** h



*blomstur, blomsturs, blomstur*
Lisa hentar **blomstur** til pápa.

**blonda** kv
*blonda, blondu, blondur*
Hon var í einum **blondu**skjúrti.



Materiál chráněný autorskými právy

**blóð** h
*blóð, blóðs, – flt*
**Blóðið** rann úr skurðinum.

**blóðga** s
*blóðga, blóðgaði*
Teir **blóðgaðu** fiskin umborð.

**blóðmørur** k
*blóðmørur, -mørs, – flt*
Omma gav Lindu eitt **blóðmørs**indur.

**blóðpylsa** kv
*blóðpylsa, -pylsu, -pylsur*
= blóðmørur

**blóma** kv
*blóma, blómu, blómur*
Rósur eru vakrar **blómur.**

**blómkál** h
*blómkál, blómkáls, blómkál*
**Blómkáls**høvdið varð kókað.

**blómutyssi** h

*blómutyssi, -tyssis, -tyssi*
Í **blómutyssinum** eru blákollur og summardáar.

**blóta** s
*blóta, blótaði*
Menninir vóru illir, teir bannaðu og **blótaðu**.

**blunda** s
*blunda, blundaði*
Børnini spæla krógva og **blunda**.

**blunka** s
*blunka, blunkaði*
Hann **blunkaði** við høgra eyga.

**blýantur** k
*blýantur, blýants, blýantar*
**Blýantarnir** eru væl spískaðir.

**blýggj** h
*blýggj, blýs, – flt*
Pilkurin var úr **blýggi**.

**blæa** kv
*blæa, blæu, blæur*
Pinkubarnið brúkar **blæu**.

**bløða** s

*bløða, bløðir, bløddi*
Sámal **bløddi** illa.

**bløðka** kv
*bløðka, bløðku, bløðkur*
**Bløðkan** verður skorin av rabarbuni.

**bløðra** kv
*bløðra, bløðru, bløðrur*
Martin fekk ára**bløðrur**, tá ið hann róði kapp.


Materiál chráněný autorskými právy

**boð** h
*boð, boðs, boð*
Sára sendi **boð** eftir mostur síni.

**boða** s
*boða, boðaði*
Eyðun fór at **boða** til útróðrar.

**boði** k
*boði, boða, boðar*
Skipið sigldi á **boðan**.

**bogi** k
*bogi, boga, bogar*
Dreingirnir skutu til máls við **boga** og píli.



**boksari** **sí nevaleikari**

**bolli** k
*bolli, bolla, bollar*
Hvalurin setti **bollan** uppundan.
Hon eltir deiggið í **bollanum.**

**bolli** k
*bolli, bolla, bollar*
Elsa bakar **bollar**.

**boltur** k
*boltur, bolts, boltar*
Ásbjørn skrúvaði møtrikkin upp á **boltin**.



**bomm** h
*bomm, boms, bomm*
Ommu dámar væl konga**bomm**.

**bonkur** k
*bonkur, bonkar, beinkir*
Sunnuva situr á **bonkar**endanum.

**bonskur** l
*bonskur, bonsk, bonskt*
Hann var **bonskur** við hundin, hann sló hann so fast.

**boppa** kv
*boppa, boppu, boppur*
Kúgvin hevur fýra **boppur**.

**bora** s
*bora, boraði*
Janus **boraði** hol í steinin.



**borð** h
*borð, borðs, borð*
Tey fara til **borðs**.



**borðiskur** k
*borðiskur, borðisks, borðiskar*
**Borðiskarnir** standa á borðinum.

**borðreiða** s
*borðreiða, -reiðir, -reiddi*
Har var **borðreitt** við øllum góðum.



Materiál chráněný autorskými právy

**borðtennis**
Børnini spæla **borðtennis** í kjallaranum.

**borg** kv
*borg, borgar, borgir*
Teir vardu **borgina** væl.



**borgari** k
*borgari, borgara, borgarar*
**Borgararnir** rinda skatt.

**borur** k
*borur, bors, borir*
**Borurin** stendur í borimaskinuni.



**botnur** k
*botnur, botns, botnar*
Skipið fór til **botns**.

**boya** kv
*boya, boyu, boyur*
Reyðar **boyur** sóust á sjónum.

**boyggja** s
*boyggja, boyggir, boygdi*
Smiðurin **boyggir** jarnstongina.

**bók** kv
*bók, bókar, bøkur*
Jóna lænir nógvar **bøkur**.

**bókahandil** k
*bókahandil, -handils, handlar*
Ása arbeiðir í einum **bókahandli**.

**bókasavn** h
*bókasavn, -savns, -søvn*
**Bókasøvnini** læna bøkur út.

**bóklingur** k
*bóklingur, bóklings, bóklingar*
Fleiri **bóklingar** eru um evnið.

**bókstavarað** h
*bókstavarað, -raðs, -røð*
Orðabókin er skipað í **bókstavarað.**

**bókstavur** k
*bókstavur, -stavs, -stavir*
**Bókstavir** verða settir saman í orð.

**bólkarbeiði** h
*bólkarbeiði, -arbeiðis, -arbeiði*
**Bólkarbeiðið** endaði við framsýning.



**bólkur** k
*bólkur, bólks, bólkar*
Grindin gekk í **bólkum**.

**bólta** s
*bólta, bóltaði*
Tey **bólta** rút á bønum.





Materiál chráněný autorskými právy

**bóltur** k
*bóltur, bólts, bóltar*
**Bólturin** hjá Helga fór á sjógv.

**bóndi** k
*bóndi, bónda, bøndur*
**Bøndurnir** fóru á fjall.



**bót** kv
*bót, bótar, bøtur*
Tey høvdu **bótar**súpan til náttur̃da.
Hann fekk **bót**, tí hann koyrdi ov skjótt.

**bræða** ⇨

**bræði** ⇨

**brattur** l
*brattur, brøtt, bratt*
Líðin er **brøtt**.

**bræv** ⇨

**brævbjálvi** ⇨

**brádliga**
**Brádliga** fór at regna.

**bráður** l
*bráður, bráð, brátt*
Inga var so **bráð**, hon vildi ikki bíða.

**bregda** s
*bregda, bregdaði*
Børnini **bregda** tvílitt bond.

**bregða** s
*bregða, bregður, brá, brugðu, brugðið*
Mikkjal **bregður** ikki burtur úr ætt.

**breiða** s
*breiða, breiðir, breiddi*
Bóndin **breiðir** tøð á bøin.



**breiður** l
*breiður, breið, breitt*
Hann bíðaði eitt langt og annað **breitt** eftir teimum.

**brek** h
*brek, breks, brek*
Báturin fekk maskin**brek**.

**brekaður** l
*brekaður, brekað, brekað*
Hann var so **brekaður**, at hann mátti sita í rullistóli.

**brekka** kv
*brekka, brekku, brekkur*
Børnini skreiða í teirri brøttu **brekkuni**.



**bremsa** s
*bremsa, bremsaði*
Bilurin **bremsaði** harðliga, tá ið barnið kom undan.



Materiál chráněný autorskými právy

**brenna** s
*brenna, brennur, brann, brunnu, brunnið*
Húsini **brunnu** í grund.

**brenna** s
*brenna, brennir, brendi*
Tey **brendu** kol í komfýrinum.

**brenni** h
*brenni, brennis, – flt*
Skótarnir bóru **brenni** saman til bálið.

**brennivín** h
*brennivín, -víns, – flt*
**Brennivín** er rúsandi løgur.

**bresta** s
*bresta, brestur, brast, brustu, brostið*
Bólturin hjá Kára **brast**.

**bresta** s
*bresta, brestir, bresti*
Bogi **brestir** bløðruna.

**brestur** k
*brestur, brests, brestir*
Vit hoyrdu ein hvøllan **brest**.

**breti** k
*breti, breta, bretar*
**Bretar** vóru í Føroyum undir krígnum.

**Bretland**
Skipið siglir til **Bretlands**.

**bretti** h
*bretti, brettis, bretti*
Dreingirnir funnu sær **bretti** til smáttuna.

**breyð** h
*breyð, breyðs, breyð*
Mamma bakar **breyð**.

**breyðbiti** k
*breyðbiti, -bita, -bitar*
Mamman gav Ólavi ein **breyðbita** við í hagan.



**breyðflís** kv
*breyðflís, -flísar, -flísar*
Óluva skar sær eina **breyðflís**.

**bryggja** ⇨

**bryggjarí** ⇨

**brigsla** s
*brigsla, brigslaði*
Tað varð **brigslað** henni, at hon ikki gjørdi skúlaarbeiði.

**brillur** kv flt
Tórhallur hevur fingið nýggjar **brillur**.



**brim** h
*brim, brims, – flt*
**Brimið** brýtur á lónni.



Materiál chráněný autorskými právy

**bringa** kv
*bringja, bringu, bringur*
Lítlasystir hevur **bringu**klút.

**brynja** ⇨

**brýggja** ⇨

**bríksla** s
*bríksla, bríkslaði*
Dómarin **bríkslaði** fyri brotssparki.



**brýna** ⇨

**brýni** ⇨

**broddur** k
*broddur, brods, broddar*
Uttastu, longu hárini á seyðinum er **broddur**.

**brosma** kv
*brosma, brosmu, brosmur*
Bátarnir fingu nógva **brosmu**.

**brot** h
*brot, brots, brot*
**Brotið** legði inn yvir bátin.
Anna dugir væl **brot**rokning.

**brotna** s
*brotna, brotnaði*
Krússið **brotnaði**, tá ið tað datt í gólvið.

**brotsgerð** kv
*brotsgerð, -gerðar, -gerðir*
Teir eru dømdir fyri **brotsgerðir**.

**broyta** s
*broyta, broytir, broytti*
Hallur **broytir** tekningina av húsunum.

**bróðir** k
*bróðir, bróður, brøður*
Jósef átti ellivu **brøður**.

**brók** kv
*brók, brókar, brøkur*
Teir tókust, og buksu**brókin** skrædnaði.



**brósk** h
*brósk, bròsks, – flt*
Í kjøti er stundum **brósk**.

**bróst** h
*bróst, bròsts, bróst*
Abbi hevði ilt fyri **bróstinum**.
Konan gevur **bróst**.
Myndirnar hanga á **bróstinum**.

**bróta** s
*bróta, brýtur, breyt, brutu, brotið*
Teir **brutu** rútin av óvart.





Materiál chráněný autorskými právy

**bruni** k
*bruni, bruna, brunar*
Petra lá við lungna**bruna**.

**brunnur** k
*brunnur, bruns, brunnar*
Nú kemur vatn aftur í tómar **brunnar**.

**brúdleyp** h
*brúdleyp, brúdleyps, brúdleyp*
Eg var boðin í **brúdleyp.**



**brúðgómur** k
*brúðgómur, -góms, -gómar*
**Brúðgómurin** beyð øllum at vera vælkomin.

**brúður** kv
*brúður, brúðrar, brúðrar*
**Brúðurin** er í reyðum stakki.

**brúgv** kv
*brúgv, brúgvar, brýr/brúgvar*
**Brúgvin** um Streymin er 220 m long.



**brúka** s
*brúka, brúkti*
Jákup **brúkar** seg.
Tey **brúka** nógvan pening.

**brúnur** l
*brúnur, brún, brúnt*
Húsini hjá abba eru **brún**.

**brúsa** s
*brúsa, brúsaði*
Sodavatn **brúsar** í glasinum.

**bryggja** kv
*bryggja, bryggju, bryggjur*
Báturin liggur við **bryggjuna**.

**bryggja** s
*bryggja, bryggjaði*
Øl verður **bryggjað** í Havn og í Klaksvík.

**bryggjarí** h
*bryggjarí, bryggjarís, bryggjarí*
Tvey **bryggjarí** eru í Føroyum.

**brynja** kv
*brynja, brynju, brynjur*
Riddararnir bóru **brynju**.



**brýggja** s
*brýggja, brýggjaði*
Jensia **brýggjaði** seg ikki um øl.

**brýna** s
*brýna, brýnir, brýndi*
Ragnar **brýnir** knívin á hvørvisteini.

**brýni** h
*brýni, brýnis, brýni*
**Brýnið** liggur á hillini.



Materiál chráněný autorskými právy

## bræða s
*bræða, bræðir, bræddi*
Sólin **bræðir** kavan.

## bræði
Egil kemur ikki aftur í **bræði**.

## bræv h

*bræv, brævs, brøv*
Postmaðurin kom við einum **brævi**.

## brævbjálvi k
*brævbjálvi, -bjálva, -bjálvar*
Brævið var í gulum **brævbjálva**.

## brøla s
*brøla, brølaði*
Leyvan **brølaði** hart.

## budingur k
*budingur, budings, budingar*
Vit fingu **buding** sunnudagin.

## buka s

*buka, bukaði*
Jógvan **bukar** seið til døgurða.

## bukett **sí blómutyssi**

## bukka s
*bukka, bukkaði*
Sámal **bukkaði** seg niður eftir skónum.

## bukkur k
*bukkur, buks, bukkar*
Børnini leypa um **bukkin**.

## buksur kv flt

Kristin fekk nýggjar **buksur** til jóla.

## bukla s
*bukla, buklaði*
Bjarki **buklaði** sær bilin.

## bukt kv
*bukt, buktar, buktir*
Kári hevur **buktina** og báðar endarnar.

## buldur h
*buldur, buldurs, buldur*
**Buldrið** var øgiligt í grótbrotinum.

## bulur k
*bulur, buls, bular*
**Bulurin** á troyggjuni var liðugur, so nú fór Henry undir ermarnar.

## bummull kv
*bummull, bummullar, –* flt
**Bummull** er nógv nýtt til klæði.

## bunki k
*bunki, bunka, bunkar*
Ein **bunki** av klæðum liggur á gólvinum.



Materiál chráněný autorskými právy

**bunkra** s
*bunkra, bunkraði*
Trolarin fór inn at **bunkra** (taka olju).



**burtur/burt**
Ása beindi bøkurnar **burt**.

**bussur** k
*bussur, buss, bussar*
Birgir fór í **bussi** til Havnar.



**busta** s
*busta, bustaði*
Heri **bustar** skógvar.

**búffur** k
*búffur, búfs, búffar*
Hvala**búffur** er góður matur.

**búgva** s
*búgva, býr, búði, búðu, búð*
Tey **búðu** í raðhúsum.

**búkur** k
*búkur, búks, búkar*
Knútur fekk ilt í **búkin,** so nógv hevði hann etið.

**búni** k
*búni, búna, búnar*
Á grækarismessu var Eydna í skóta**búna**.

**búr** h
*búr, búrs, búr*
Rúni keypti **búr** til fuglarnar.



**bústaður** k
*bústaður, bústaðar, bústaðir*
Hevur tú skift **bústað**?

**bygd** kv
*bygd, bygdar, bygdir*
Í nógvum **bygdum** er samkomuhús.



**bygdarfólk** h
*bygdarfólk, -fólks, -fólk*
Kári og Katrin eru **bygdarfólk**.

**bygg** h
*bygg, bygs, – flt*
Kornið, sum føroyingar veltu fyrr, var **bygg**.

**byggja** s
*byggja, byggir, bygdi*
Hanus **byggir** sær hús.

**bygningur** k
*bygningur, bygnings, bygningar*
Í Havn eru nógvir stórir **bygningar**.

**bylgja** kv
*bylgja, bylgju, bylgjur*
**Bylgjurnar** brutu inn yvir vrakið.

**byrði** kv
*byrði, byrðar, byrðar*
Bóndin fór undir hoy**byrðina**.



Materiál chráněný autorskými právy

**byrging** kv



*byrging, byrgingar, byrgingar*
Í Vestmanna hevur SEV fleiri **byrgingar**.

**byrgja** s
*byrgja, byrgir, byrgdi*
Hálvdan **byrgir** hyl í ánni.

**byrja** s
*byrja, byrjaði*
Dysturin **byrjar** klokkan trý.

**byrsa** kv



*byrsa, byrsu, byrsur*
**Byrsan** hevur verið mongum manni at bana.

**byrur** k
*byrur, byrjar, – flt*
Skipini hava góðan **byr**.

**býlingur** k



*býlingur, býlings, býlingar*
Í bygdini eru fleiri **býlingar**.

**býráð** h
*býráð, býráðs, býráð*
**Býráðið** helt fund.

**býta** s
*býta, býtir, býtti*
Ólavur **býtir** fiskin millum teirra.

**býttlingur** k
*býttlingur, býttlings, býttlingar*
Hann ber seg at sum ein **býttlingur**.

**býttur** l
*býttur, býtt, býtt*
Hon spælir **býtt**.

**býur** k
*býur, býar, býir*
Bygdir við meira enn 1500 fólkum kunnu gerast **býir**.

**bølamyrkur** h
*bølamyrkur, bølamyrkurs,*
– flt
Í **bølamyrkri** sæst einki.

**bøllutur** l
*bøllutur, bøllut, bøllut*
Marsanna átti ein **bøllutan** hundahvølp.

**bøn** kv
*bøn, bønar, bønir*
Faðir vár er ein **bøn**, ið verður nógv biðin.

**bønarfólk** h
*bønarfólk, -fólks, -fólk*
**Bønarfólk** eru arbeiðsfólk, sum eru biðin ein dag í senn.

**børa** kv



*børa, børu, børur*
Marin fór á **børu** á sjúkrahús.



Materiál chráněný autorskými právy

**børkur** k

*børkur, barkar, – flt*
Tundur er **børkurin** uttan av tundureikini.
**Børkur** legst oman á kakao.

**bøta** s



*bøta, bøtir, bøtti*
Lisa **bøtti** buksurnar.

**Bøur**

*Bøur, Bíggjar*
Úr **Bø** sæst út í Tindhólm.

**bøur** k

*bøur, bíggjar, bøir*
**Bøurin** var sligin.


Materiál chráněný autorskými právy

## Dagblaðið
**Dagblaðið** er málgagn fólkafloksins.

## dagbók kv
*dagbók, -bókar, -bøkur*
Summi børn skriva **dagbók**.



## dagfesta s
*dagfesta, -festur, -festi*
Brævið er **dagfest** 5. apríl.

## dagliga
Heðin og Marjun vitja ommuna og abban **dagliga**.

## dagur k
*dagur, dags, dagar*
Á mid**degi** stendur sólin hægst á luftini.

## dalur k
*dalur, dals, dalar/dalir*
Nógvir vakrir **dalar** eru í Føroyum.

## dæmi ⇨

## damla s
*damla, damlaði*
At **damla** er at rógva spakuliga.

## dampur k
*dampur, damps, –* flt
**Dampurin** stóð úr ketlinum.

## danda s
*danda, dandaði*
Børnini **danda** í garðinum.



## dani k
*dani, dana, danir*
Í Danmark búgva **danir**.

## Danmark
Hans er dani og fer tí til **Danmarkar** í summarfrítíðini.

## dansa s
*dansa, dansaði*
Pól og Elin **dansa**.



## danskur l
*danskur, donsk, danskt*
Mamma hennara var **donsk**.



Materiál chráněný autorskými právy

**dansur** k

*dansur, dans, dansir*
Dánjal var í **dansi** á jólum.

**dái** k
*dái, dáa, dáar*
**Dáin** er ein lokplanta.

**dálka** s
*dálka, dálkaði*
Øll eiga vit at ansa eftir ikki at **dálka** náttúruna.

**dáma** s
*dáma, dámdi/dámaði*
Mær **dámar** væl skerpikjøt og breyð.

**deiggj** h

*deiggj, deigs, – flt*
Ger verður koyrd í **deiggið** at fáa tað at ganga.

**deila** s
*deila, deilir, deildi*
Abbin **deildi** Ólav, tí hann hevði brotið honum stavin.

**dekk** h
*dekk, deks, dekk*
Fiskurin liggur á **dekkinum**.
Pætur keypti nýggj **dekk** undir bilin.

**deknur** k
*deknur, dekns, deknar*
**Deknurin** lesur lestur annanhvønn sunnudag.

**demokrati** **sí fólkaræði**

**desember**
**25. desember** er jóladagur.

**desilitur** (dl) k
*desilitur, -liturs, -litrar*
Í einum litri eru tíggju **desilitrar.**

**detta** s
*detta, dettur, datt, duttu, dottið*
Barnið er **dottið**.

**deyðmóður** l
*deyðmóður, -móð, -mótt*
Leikararnir vóru **deyðmóðir** eftir dystin.

**deyður** l
*deyður, deyð, deytt*
Kettan er **deyð**.

**deyvur** l
*deyvur, deyv, deyvt*
Barnið er so **deyvt**, at tað nýtir hoyritól.

**diamantur** k
*diamantur, diamants, diamantar*
**Diamantur** er ein dýrur gimsteinur.

**dyggur** ⇨

**diktatur** **sí einaræði**


Materiál chráněný autorskými právy

# D

**dylla** ⇨

**dymbildagavika** ⇨

**dimma** s
*dimma, dimmir, dimdi*
Tað **dimmir** av nátt = tað skýmir.



**Dimmalætting**
**Dimmalætting** er elsta blað í Føroyum.

**dyppa** ⇨

**dyrgja** ⇨

**dyrka** ⇨

**dirvi** h
*dirvi, dirvis, – flt*
Kára sýndi **dirvi**, tá ið hon bjargaði beiggjanum.

**dystur** ⇨

**díki** h
*díki, díkis, díki*
Fírdu meg í **díkið**, og flentu so í kíki.

**díkja** s
*díkja, díkir, díkti*
Óli **díkir** Sámal undir í kava.

**dýna** ⇨

**dýr** ⇨

**dýrgripur** ⇨

**dýrur** ⇨

**djarvur** l
*djarvur, djørv, djarvt*
Hanus í Dímun var **djarvur** maður.

**djevul** k
*djevul, djevuls, djevlar*
Jesus varð freistaður av **djevlinum**.

**djór** h
*djór, djórs, djór*
Í Nóa ark vóru øll **djóra**sløg.

**djóragarður** k
*djóragarður, -garðs, -garðar*
Í **djóragørðum** verða djór hildin í fangilsi.

**djóralækni** k
*djóralækni, -lækna, -læknar*
**Djóralæknin** lekir djór.

**djúpur** l
*djúpur, djúp, djúpt*
Leynavatn er 63 metrar **djúpt**.



Materiál chráněný autorskými právy

**dolkur** k
*dolkur, dolks, dolkar*
Magni fekk ein **dolk** í føðingardagsgávu.



**dollari** k
*dollari, dollara, dollarar*
**Dollari** er amerikanskur peningur.

**dovin** l
*dovin, dovin, dovið*
Hann var so **dovin**, at hann tímdi ikki at spæla við.
Saltið er **dovið**.

**doyggja** s
*doyggja, doyr, doyði*
Hvønn dag **doyggja** nógv fólk í hungri.



**doypa** s
*doypa, doypir, doypti*
Eyðvør varð **doypt** sum barn.

**doyva** s
*doyva, doyvir, doyvdi*
Vanliga **doyvir** tannlæknin tonnina, áðrenn hann borar.



**dólgur** k
*dólgur, dólgs, dólgar*
**Dólgarnir** í Kardamummubýi.

**dómari** k
*dómari, dómara, dómarar*
**Dómararnir** vóru ósamdir.

**dómur** k
*dómur, dóms, dómar*
Trætan varð tikin upp til **dóms**.

**dópur** k
*dópur, dóps, dópar*
Barna**dópur** var í kirkjuni sunnudagin.

**dós** kv
*dós, dósar, dósir*
Óli hevði eina svávul**dós** í lummanum.

**dóttir** kv
*dóttir, dóttur, døtur*
Tívil og Tívilskona áttu nógvar **døtur**.

**draga** s
*draga, dregur, dró, drógu, drigið*
Tey hava **drigið** bátin niðan á sandin.

**dragsa** s
*dragsa, dragsaði*
Beiggjarnir **dragsaðu** kassan til húsa.

**dramatisera** s
*dramatisera, dramatiseraði*
Flokkurin **dramatiseraði** søgnina um Snæbjørn.


Materiál chráněný autorskými právy

# D

**dráp** h
*dráp, dráps, dráp*
Grinda**drápið** vardi í eitt korter.

**dráttur** k
*dráttur, dráttar, dráttir*
Nógv fólk spæla í happa**dráttinum**.
Báturin stendur á **dráttinum**.

**dreiva** s
*dreiva, dreivaði*
Kúgvin hevði **dreivað** seg í tjóðrið.



**dreki** k
*dreki, dreka, drekar*
Børnini settu **drekar** upp.

**drekka** s
*drekka, drekkur, drakk, drukku, drukkið*
Jónas **drekkur** ein litur av mjólk um dagin.

**drepa** s
*drepa, drepur, drap, drópu/drupu, dripið*
Kettan hevur **dripið** músina.

**dreymur** k
*dreymur, dreyms, dreymar*
Dánjal vaknaði við kaldan **dreym**.



**dríva** s
*dríva, drívur, dreiv, drivu, drivið*
Teir **drivu** á at rógva.

**drongur** k
*drongur, dreingjar, dreingir*
**Dreingirnir** spæla á bønum.

**dropi** k
*dropi, dropa, dropar*
**Droparnir** hanga sum perlur á strá.

**drotning** kv
*drotning, drotningar, drotningar*
Margreta varð **drotning** í Danmark í 1972.

**droyma** s
*droyma, droymir, droymdi*
Tórunn **droymir** um summar og sól.

**drukna** s
*drukna, druknaði*
Jaspur mundi **druknað**.

**drynja** s
*drynja, drynjaði*
Kúgvin stóð á básinum og **drynjaði**.

**dryppa** s
*dryppa, dryppaði*
Tað **dryppar** úr tekjuni.



Materiál chráněný autorskými právy

**drýggja** s
*drýggja, drýggjaði*
Tey **drýggjaðu** sær bommini.

**drýlur** k
*drýlur, drýls, drýlar*
Omma knoðar **drýl**.

**duga** s
*duga, dugir, dugdi*
Magnus **dugir** væl at telgja pílar, hann er dugnaligur.

**dugur** k
**Dugur** er í honum. Hann dugir væl.

**dukka** kv
*dukka, dukku, dukkur*
Inga seymar **dukku**klæði.



**dulnevni** h
*dulnevni, -nevnis, -nevni*
Heðin Brú er **dulnevni** hjá Hans Jacob Jacobsen.

**dumbur** l
*dumbur, dumb, dumbt*
Ein, ið ikki fær tosað, er **dumbur**.

**dumsa** s
*dumsa, dumsaði*
Tað hoyrdist, tá ið hann **dumsaði** í hylin.

**dun** h
*dun, duns, dun*
Rópini hoyrdust ikki ígjøgnum brim**dunið**.

**dungi** k
*dungi, dunga, dungar*
Ein **dungi** av klæðum liggur á gólvinum.

**dunkur** k
*dunkur, dunks, dunkar*
Í fjøruni liggja plast**dunkar**.



**dunna** kv
*dunna, dunnu, dunnur*
**Dunnu**egg eru størri enn høsnaregg.

**dupultur** l
*dupultur, dupult, dupult*
**Dupultur** tráður er sterkari enn einkultur.

**dúgligur** l
*dúgligur, dúglig, dúgligt*
Durita er eitt **dúgligt** barn.

**dúgva** kv
*dúgva, dúgvu, dúgvur*
Blá**dúgvan** eigur í Føroyum.

**dúkur** k
*dúkur, dúks, dúkar*
**Dúkurin** liggur á borðinum.





Materiál chráněný autorskými právy

# D

**dvína** s
*dvína, dvínir, dvíndi*
Tórur Rami mátti **dvína** fyri Óla Rama.

**dvørgur** k
*dvørgur, dvørgs, dvørgar*
**Dvørgar** eru smá fólk.

**dyggur** l
*dyggur, dygg, dygt*
Tórur fekk ein **dyggan** brest, tá ið hann sló seg í hurðina.

**dylja** s
*dylja, dylur, duldi*
Regin **dylur** fyri pápanum, at hann hevur tikið ein krákuunga.

**dylla** kv
*dylla, dyllu, dyllur*
**Dylla** er gamalt mjólkarílat.

**dymbildagavika** kv
**Dymbildagavikan** er vikan fyri páskir.

**dynamitt** h
Teir sprongdu klettin við **dynamitti**.

**dyppa** s
*dyppa, dyppaði*
Páll **dyppar** bitan niður í smeltið.

**dyr** kv flt
**Dyrnar** standa opnar.



**dyrgja** s
*dyrgja, dyrgir, dyrgdi*
Ragnar **dyrgir** eftir seiði.

**dyrka** s
*dyrka, dyrkaði*
Guðrun **dyrkar** grønmeti í garðinum.

**dystur** k
*dystur, dysts, dystir*
**Dysturin** varð leiktur í Gundadali.

**dýna** kv
*dýna, dýnu, dýnur*
Góðar **dýnur** eru fyltar við dúni.

**dýpi** h
*dýpi, dýpis, dýpi*
Toskur gongur á ávísum **dýpi**.

**dýr** h
*dýr, dýrs, dýr*
Bóndin hevur nógv **dýr** á garðinum.



**dýrd** kv
*dýrd, dýrdar, dýrdir*
Tað er **dýrd** í sjónum.





Materiál chráněný autorskými právy

## dýrgripur k



*dýrgripur, -grips, -gripir*
Ein **dýrgripur** er okkurt, ið er virðismikið.

## dýrur l

*dýrur, dýr, dýrt*
Ingrið keypti eina **dýra** súkklu.

## dæmi h

*dæmi, dæmis, – flt*
Pól hevði gott **dæmi**. Hann var væl dæmdur.

## døgg kv

*døgg, døggar, – flt*
**Døgg** legst á rútin.

## døgurði k

*døgurði, døgurða, døgurðar*
Vit fingu ræstan fisk og spik til **døgurða**.

## dølskur l

*dølskur, dølsk, dølskt*
Hann gloymir illa, hann er so **dølskur**.

## døma s



*døma, dømir, dømdi*
Dómarin **dømdi** brotsspark.

## dømi h

*dømi, dømis, dømi*
Lærarin roknaði eitt **dømi** á talvuna.


Materiál chráněný autorskými právy

**edilingur** k
*edilingur, edilings, edilingar*
At ríða **ediling** er dansispæl.

**edrúur** l
*edrúur, edrú, edrútt*
Kári er **edrúur**, so hann kann koyra.

**eftir**
Rannvá fór **eftir** súreplum.

**eftirnavn** h
*eftirnavn, -navns, -nøvn*
Martin hevur Joensen til **eftirnavn**.

**eg**
**Eg** fekk **mær** nátturða.

**egg** h
*egg, egs, egg*
Tjaldrið verpur oftast trý **egg**.



**egg** kv
*egg, eggjar, eggjar*
Tað hvassa á knívinum eitur **eggin**.
Ytst á berginum er **eggin**.

**eggja** s
*eggja, eggjaði*
Tey **eggjaðu** Gunnvør at fara at lesa.

**eggjahvíti** k
*eggjahvíti, -hvíta, -hvítar*
**Eggjahvíti** stívnar, tá ið hann verður rørdur.

**eggjareyði** k
*eggjareyði, -reyða, -reyðar*
Rørdur **eggjareyði** smakkar væl.

**egin** l
*egin, egin, egið*
At seta føtur undir **egið** borð er at fáa sær **egin** hús.



Materiál chráněný autorskými právy

**egna** s
*egna, egnir, egndi*
Jógvan **egnir** fimm stampar um dagin.

**eiður** k
*eiður, eiðar, eiðir*
Hann svór ein dýran **eið**.

**eiga** s
*eiga, eigur, átti*
Rani **eigur** eitt áttamannafar.

**eik** kv
*eik, eikar, eikir*
Kjølurin á báti er gjørdur úr **eik**.



**eimur** k
*eimur, eims, – flt*
**Eimur** er gløðandi øska.

**eina**
At leggja sær **eina** við er at gera sær ómak.

**einaferð**
Flestu ævintýr byrja við: **Einaferð** var -

**einaræði** h
*einaræði, -ræðis, -ræði*
**Einaræði** er, har ein ræður einsamallur.

**einastaðni**
**Einastaðni** í Havn er ein viðarlund.

**einbýli** h
*einbýli, einbýlis, einbýli*
Páll fangi fór í **einbýli** í Nesskorum.

**einfaldur** l
*einfaldur, einføld, einfalt*
Uppgávurnar vóru **einfaldar** og lættar at loysa.

**eingin**
*eingin, eingin, einki*
Eg helt, at **eingin** var inni, tí eg sá ongan.

**einmælt**
Tað var **einmælt** samtykt, tí øll atkvøddu fyri.



**einsamallur** l
*einsamallur, -møll, -malt*
Katrin var **einsamøll** inni.

**einstakur** l
*einstakur, -støk, -stakt*
Eg havi sæð okkurt **einstakt** tjaldur.

**einsæris**
Tey sótu **einsæris** og loystu uppgávurnar.



Materiál chráněný autorskými právy

# E

## eintak h



*eintak, eintaks, eintøk*
Bókin var prentað í 1000 **eintøkum**.

## eisini

Birgir fer **eisini** í bátin.

## eita s

*eita, eitur, æt, itu, itið*
Gentan **eitur** Guðrið.

## eitra s

*eitra, eitraði*
Fiskurin kann vera **eitraður**, tí sjógvurin er skitin.

## eitt

Rókur gav mær **eitt** bomm.

## eiturfon h

*eiturfon, eiturfons,* – flt
Flugan hongur føst í **eiturfoninum**.

## eiturkoppur k

*eiturkoppur, -kops, -koppar*
**Eiturkoppar** gera sær lokkanet (eiturfon).

## ekkó h

**Ekkó** = afturljóð = bergmál.

## el

Elektrisitet (ravmagn) verður stytt til **el**.

## elastikk h



Børnini hoppa **elastikk** (lastikk).

## eldfimur l

*eldfimur, -fim, -fimt*
Bensin er ógvuliga **eldfimt**.

## eldri **sí gamal**

## eldur k

*eldur, elds, eldar*
Lítil neisti birtir ofta stóran **eld**.

## elektrikari k



*elektrikari, elektrikara, elektrikarar*
Beinir lærir til **elektrikara**.

## elektrisitet h

= ravmagn
SEV ger **elektrisitet**.

## elevatorur **sí lyfta**

## ella

Barba kemur í dag **ella** í morgin.

## ellivu

**Ellivu** mans eru á einum fótbóltsliði.

## ellivti

*ellivti, ellivta, ellivta*
November er **ellivti** mánaður.



Materiál chráněný autorskými právy

**elska** s
*elska, elskaði*
Pápi segði, at hann **elskaði** mammu.

**elta** s
*elta, eltir, elti*
Mamma **eltir** breyð.
Hundurin **eltir** seyðamannin.

**embæti** h
*embæti, embætis, embæti*
Klæmint søkti **embæti** sum prestur í Todnesi.

**endamál** h
*endamál, -máls, -mál*
Peningurin fór til eitt gott **endamál**.

**endi** k
*endi, enda, endar*
**Endin** á søguni var góður.

**endiliga**
Tey bóðu Elsu **endiliga** koma.

**endurnýgjan** kv
*endurnýggjan, -nýggjanar, –nýggjanir*
Orðalistin verður **endurnýggjaður**.

**endurtaka** s
*endurtaka, -tekur, -tók, -tóku, -tikið*
Elin **endurtók** tað, hon fyrr hevði sagt.

**enn**
Maria er størri **enn** Una.
Vit gevast ikki **enn** at spæla.

**enni** h
*enni, ennis, enni*
Bjørn brúkar **ennis**band.



**epli** h
*epli, eplis, epli*
Tað heystið vóru **eplini** góð.

**erkvisin** l
*erkvisin, erkvisin, erkvisið*
Systirin var **erkvisin**. Hon græt um einki.

**erpin** l
*erpin, erpin, erpið*
Manningin var **erpin**, tí hon hevði vunnið.

**errin** l
*errin, errin, errið*
Barnið var **errið**, tá ið tað fór at ganga.

**erva**
Grót ruddi oman úr **erva**.


Materiál chráněný autorskými právy

## eta s

*eta, etur, át, ótu, etið*
Tey **ótu** seg mett.

## evnafrøði kv

*evnafrøði, -frøði, – flt*
Magnusi dámar væl **evnafrøði**.

## evnaligur l

*evnaligur, evnalig, evnaligt*
Finnbjørn er ein **evnaligur** drongur.

## evni h

*evni, evnis, evni*
4. flokkur arbeiðir við fleiri **evnum**.

## evning kv

*evning, evningar, – flt*
Í **evning** sótu børnini og teknaðu.



## Evropa

Vit búgva øll í **Evropa**.

## eydna kv

*eydna, eydnu, – flt*
**Eydnan** var við Kristionnu.

## eydnuríkur l

*eydnuríkur, eydnurík, eydnuríkt*
Leivur er **eydnuríkur**.

## eyðkenna s

*eyðkenna, eyðkennir, eyðkendi*
Merkið á pannuni **eyðkendi** Káin.

## eyðmýkja s

*eyðmýkja, eyðmýkir, eyðmýkti*
Tað varð **eyðmýkjandi** at ganga undir hørðu treytirnar.

## eyga h

*eyga, eygu, eygu*
Sanna hevur blá **eygu**.

## eygleiða s

*eygleiða, -leiðir, -leiddi*
Øssur **eygleiddi** kettuna, tá ið hon tók músina.

## eygnabrúgv kv

*eygnabrúgv, -brúgvar, -brýr*
Sámal hevur myrkar **eygnabrýr**.

## eygsjón

Vit mistu bátin úr **eygsjón**.

## eykalutur k

*eykalutur, -lutar, -lutir*
Súkkluhandilin selur **eykalutir** til prutl.





Materiál chráněný autorskými právy

## eyknevni h

*eyknevni, eyknevnis, eyknevni*
Von Hompesch fekk **eyknevnið** Brillumaðurin.

## eymka s

*eymka, eymkaði*
Rói **eymkar** seg. Hann er dottin av súkkluni.

## eyrhakkari k

*eyrhakkari, -hakkara, -hakkarar*
Sverri høggur kol við **eyrhakkara**.



## eyrriði k

*eyrriði, eyrriða, eyrriðar*
Dreingirnir fingu ein stóran **eyrriða** í ánni.

## eyrur k

*eyrur, eyrs, – flt*
Børnini spæla við **eyrin** í ánni.

## eystarlaga

Skálhøvdi er **eystarlaga** á Sandoynni.

## eystur

**Eystur** er ein av teimum fýra høvuðsættunum. Sólin rísur í **eystri** og setur í vestri.


Materiál chráněný autorskými právy

# F

**faðir** k

*faðir, faðirs, fedrar*

**Faðir** teirra var til skips.

**fagna** s

*fagna, fagnaði*

Landsliðið varð **fagnað**, tá ið teir vunnu á Eysturríki.

**fagur** l

*fagur, føgur, fagurt*

Veðrið var av tí **fagrasta**.

**falda** s

*falda, faldaði*

3 **faldað** við 4 = 12.

**falla** s

*falla, fellur, fall, fullu, fallið*

Mortan **fall** í fátt, tá ið Pætur flutti.

**fallskíggi** k

*fallskíggi, -skíggja, -skíggjar*

Flogskiparin leyp út í **fallskíggja**.



**falskur** l

*falskur, følsk, falskt*

Tey eru so **følsk**, at tey tora ikki at standa við tað, tey hava sagt.

**familja** sí **húski, slekt, ætt**

**fangatippi** h

*fangatippi, -tippis, -tippi*

Páll fangi rýmdi úr **fangatippinum**.

**far** h

*far, fars, før*

Feðgarnir eiga eitt áttamanna**far**.



Helgi gav sær ikki **far** um, at Høgni var komin.

**fara** s

*fara, fer, fór, fóru, farið*

Skipið er **farið** til fiskiskap.

**farmur** k

*farmur, farms, farmar*

**Farmurin** varð lossaður upp í Vági.





Materiál chráněný autorskými právy

## farvæl
Óli segði **farvæl** og leyp umborð.

## fastir kv
*fastir, fastur, fastrar*
**Fastir** mín er so góð við meg.

## fastur l
*fastur, føst, fast*
Nú er **fast** samband millum Eysturoy og Streymoy.

## fat h
*fat, fats, føt*

**Fatið** stóð fult av súreplum og appilsinum.

## favnur k
*favnur, favns, favnar*
Ein **favnur** (189 cm) = tríggjar alin.
Mass situr hendur í **favn.**

## fáa s
*fáa, fær, fekk, fingu, fingið*
Tina **fær** sær morgunmat.

## fámæltur l
*fámæltur, fámælt, fámælt*
Fangin var **fámæltur**. Hann vildi einki siga.

## fátækur l
*fátækur, fátæk, fátækt*
Í triðja heiminum er størsti partur av fólkinum **fátækur**.

## fáur
**Fáur** kann eitt barn at eiga (orðtak).

## fávitska kv
*fávitska, -vitsku, -vitskur*
Í síni **fávitsku** leit hann ikki á nakran.

## februar
2. **februar** er kyndilsmessa.

## feðgar k flt
**Feðgar** = faðir og sonur.

## fegin l
*fegin, fegin, fegið*
Sjáldan verður forvitin **fegin** (orðtak).

## feitur l
*feitur, feit, feitt*
Lombini eru **feit** í ár.

## felag h
*felag, felags, feløg*
Ítróttar**feløgini** eru mong.

## felagsskapur k
*felagsskapur, -skapar, -skapir*
Tað var góður **felagsskapur** í skúlanum.


Materiál chráněný autorskými právy

**felga** kv
*felga, felgu, felgur*
Dávur keypti nýggjar **felgur** á súkkluna.

**fella** kv
*fella, fellu, fellur*
Músin kom í **felluna**.

**fella** s
*fella, fellir, feldi*
Jákup **feldi** huldumannin.

**fepur** k
*fepur, fepurs, – flt*
Niels hevur nógvan **fepur**.

**ferð** kv
*ferð, ferðar, ferðir*
Flokkurin ætlar at gera eina **ferð** vestur í Mykines.

**ferðamannastova** kv
*ferðamannastova, -stovu, -stovur*
**Ferðamannastovur** skipa fyri ferðum í onnur lond.

**ferðasamband** h
*ferðasamband, -sambands, – flt*
Um summarið er gott **ferðasamband** í útheimin.



**ferðast** s
*ferðast, ferðaðist*
Jón og omma **ferðaðust** í Suðuroynni.

**ferðsla** kv
*ferðsla, ferðslu, – flt*
Børnini læra at ansa sær í **ferðsluni**.



**ferja** kv
*ferja, ferju, ferjur*
**Ferja** siglir um Vestmannasund.

**feskur** l
*feskur, fesk, feskt*
Tey fingu **feskt** kjøt til døgurða.

**festa** s
*festa, festir, festi*
Timburmaðurin **festir** skápið á veggin.

**fygla** ⇨

**fikta** s
*fikta, fiktaði*
Dreingirnir **fiktast** úti á bønum.

**fyl** ⇨

**fylgi** ⇨

**fylgja** ⇨

**fylla** ⇨



Materiál chráněný autorskými právy

**filmur** k
*filmur, films, filmar*
Ein spennandi **filmur** var leygarkvøldið.

**fimleikahøll** kv
*fimleikahøll, -hallar, -hallir*
Í tí nýggja skúlanum er góð **fimleikahøll**.

**fimleikur** k

*fimleikur, -leiks, – flt*
Nógv børn gera **fimleik** seinnapartin.

**fimm**
**Fimm** eru Mósebøkurnar.

**fimtan**
Ebba er **fimtan** ára gomul.

**fimti**
Helvtin av hundrað er **fimti**.

**fimur** l
*fimur, fim, fimt*
Leivur er so **fimur**, at hann ger floglop úti á bønum.

**findarglaður** l

*findarglaður, -glað, -glatt*
Ási var **findarglaður**, tá ið hann slapp við.

**fingur** k
*fingur, fingurs, fingrar*
Tummil, fremstifingur, longutong, lekifingur, lítlifingur (aftastifingur) eita **fingrarnir**.

**finna** kv

*finna, finnu, finnur*
Í talvi eru átta hvítar **finnur** og átta svartar.

**finna** s
*finna, finnur, fann, funnu, funnið*
Genturnar **funnu** ikki bóltin aftur.

**Finnland**
Á finskum eitur **Finnland** Suomi.

**fiól** kv
*fiól, fiólar, fiólir*
Dreingir og gentur spæla **fiól**.

**fyri** ⇨

**fyrigeva** ⇨

**fyrimunur** ⇨

**fyrireika** ⇨

**fyrisøgn** ⇨


Materiál chráněný autorskými právy

**fyritøka** ⇨

**firma** h
**Firma** verður stytt til fa.

**firnast** s
*firnast, firnaðist*
**Firnast** ikki myrkur svart.

**fyrr** ⇨

**fyrrapartur** ⇨

**fyrstani** ⇨

**fyrsti** ⇨

**fyrstuni** ⇨

**fyrstur** ⇨

**firtin** l
*firtin, firtin, firtið*
Súsanna var **firtin**, tí hon ikki slapp við.

**firvaldur** k
*firvaldur, firvalds, firvaldar*
Ein **firvaldur** í góðum lag.

**fysikk** ⇨

**fiska** s
*fiska, fiskaði*
Børnini **fiska** murtar á støðni.

**fiskabúr** h
*fiskabúr, -búrs, -búr*
Karl eigur eitt stórt **fiskabúr** við gullfiskum.

**fiskiskapur** k
*fiskiskapur, -skapar, – flt*
**Fiskiskapurin** er góður í ár.

**fiskur** k
*fiskur, fisks, fiskar*
Bátarnir fingu nógvan **fisk**.



**fittur** l
*fittur, fitt, fitt*
Gunnvá er **fitt** í hondunum.

**fíggindi** k
*fíggindi, fíggindа, fíggindar*
Ringt er at hava nógvar **fíggindar**.

**fíggjarætlan** kv
*fíggjarætlan, -ætlanar, -ætlanir*
**Fíggjarætlanin** hjá Løgtinginum er yvirlit yvir ætlaðar inntøkur og útreiðslur landsins í eitt ár.

**fíla** s
*fíla, fílaði*
Dánjal **fílaði** ketuna av.
Per stendur og **fílar** við snørið.



Materiál chráněný autorskými právy

**fílur** k

*fílur, fíls, fílar*



**Fílarnir** í Afrika eru størri enn teir í India.

**fínur** l

*fínur, fín, fínt*

Fía seymar við **fínum** tráð.

**fíra** s

*fíra, fírir, fírdi*

Teir **fírdu** ikki fyri at ganga í brattlendi.

**fýra** ⇨

**fýrkantur** ⇨

**físa** s

*físa, físir, físti*

Vindurin **físti** um hornið.

**fjaðursárur** l

*fjaðursárur, -sár, -sárt*

Tá ið fuglur skiftir fjaðrarnar, er hann **fjaðursárur**.

**fjala** s

*fjala, fjalir, fjaldi*

Skipar Hansen **fjaldi** seg undir Tarvasteini.

**fjall** h

*fjall, fjals, fjøll*



Slættaratindur er hægsta **fjall** í Føroyum (882 m).

**fjallløn** kv

*fjalløn -lønar, -lønir*

Sivar fekk eitt lamb í **fjallløn**.

**fjara** s

*fjara, fjaraði*

Í fjøruni **fjarar** og fløðir.

**fjarrit** h

*fjarrit, -rits, -rit*

Útvarpið lesur **fjarrit** frá skipunum.

**fjart**

**Fjart** frá øðrum londum liggja oyggjarnar.

**fjas** h

*fjas, fjas, fjas*

Fjant og **fjas**.

**fjálgur** l

*fjálgur, fjálg, fjálgt*



Frakkin var **fjálgur** at fara í.

**fjórði**

*fjórði, fjórða, fjórða*

Leypár er **fjórða** hvørt ár.

**fjórðingur** k

*fjórðingur, fjórðings, fjórðingar*

Olgar keypti ein neyta-**fjórðing**.

1852 metrar rópa vit ein **fjórðing**.



Materiál chráněný autorskými právy

# F

## **fjós** h
*fjós, fjós, fjós*
Í **fjósinum** standa tjúgu neyt á bási.

## **fjúrtan**
= 14.

## **fjúrtandi**
*fjúrtandi, fjúrtanda, fjúrtanda*
= 14.

## **Fjúrtandi september**
**14. september** er málgagn Tjóðveldisfloksins.

## **fjøður** kv
*fjøður, fjaðrar, fjaðrar*
Tjaldrið hevur svartar og hvítar **fjaðrar**.

## **fjøl** kv
*fjøl, fjalar, fjalir*
Børnini smíða smáttu av kassa**fjølum**.

## **fjølrita** s


*fjølrita, fjølritaði*
Lærarin **fjølritar** uppgávur til royndina.

## **fjør**
Í **fjør** ferðaðust vit í Íslandi.

## **fjøra** kv
*fjøra, fjøru, fjørur*
Á **fjøru** er sandurin stórur.
Í **fjøruni** er stuttligt at spæla.

## **fjørður** k
*fjørður, fjarðar, firðir*
Í Hest**firði** sæst stundum grind.

## **fjøruti**
**Fjøruti** riddarar eru 9. mars.

## **flag** h

*flag, flags, fløg*
Nógv hús hava **flag**tak.

## **flagg** h
*flagg, flags, fløgg*
Norðurlendsku **fløggini** veittra við Norðurlandahúsið.

## **flaggdagur** k
25. apríl er **flaggdagur**.

## **flagsa** s
*flagsa, flagsaði*
Lundin fer **flagsandi** eftir sjónum.

## **flak** h
*flak, flaks, fløk*
Føroyingar selja fiska**flak**.



Materiál chráněný autorskými právy

**flatur** l

*flatur, fløt, flatt*

Fyrr hildu fólk, at jørðin var **fløt**.

**flákra** s

*flákra, flákraði*

Gardinurnar **flákra** í vindinum.



**fláur** l

*fláur, flá, flátt*

**Fláir** og djúpir borðiskar standa á borðinum.

**fleingja** s

*fleingja, fleingir, flongdi*

Ringt er at verða **flongdur**.

**fleiri**

Í Suðurstreymoy búgva **fleiri** fólk enn í Norðurstreymoy.

**flekja** s

*flekja, flekir, flakti*

Kári **flekir** fisk á flakavirkinum.

**flenna** s

*flenna, flennir, flenti*

Børnini **flentu** í kíki at sjónleikinum.

**fles** kv

*fles, flesjar, flesjar*

Fleiri kópar liggja uppi á **flesini**.



**flesk** h

*flesk, flesks, – flt*

Tey fingu steikt **flesk** til døgurða.

**fletta** s

*fletta, flettir, fletti*

Teir **flettu** seyðin í kjallaranum.

**fleyga** s

*fleyga, fleygaði*

Búi **fleygar** við fleygastong.

**fliða** kv

*fliða, fliðu, fliður*

Børnini stinga **fliður** í fjøruni.

**flykra** ⇨

**flysa** ⇨

**flyta** ⇨

**flytifuglur** ⇨

**flýggja** ⇨

**flís** kv

*flís, flísar, flísar*

Terji etur tríggjar breyð**flísar** til nátturða.

**flogbóltur** k

*flogbóltur, -bólts, -bóltar*

Heindrikur spælir **flogbólt**.



Materiál chráněný autorskými právy

# F

**flogfar** h
*flogfar, flogfars, flogfør*
**Flogførini** seta seg í Vágum.



**flogvit** h
*flogvit, -vits, -vit*
Einstein var **flogvit**.

**flogvøllur** k
*flogvøllur, -vallar, -vøllir*
**Flogvøllurin** varð gjørdur undir krígnum (1939-1945).



**flokkur** k
*flokkur, floks, flokkar*
Tey reka gása**flokkin** í hagan.

**flokslærari** k
*flokslærari, -lærara, -lærarar*
Knútur er **flokslærari** í 5. flokki.

**flot** h
*flot, flots, flot*
Jórun slapp á **flot** við abbanum.
**Flotini** halda nótini uppi.

**flota** s
*flota, flotaði*
Teir **flota** tann nýggja bátin.

**floti** k
*floti, flota, flotar*
Vit hava ein stóran skipa**flota**.

**floyal** h
*floyal, floyals, – flt*
Lena fekk nýggjar **floyals**buksur.

**floyta** kv
*floyta, floytu, floytur*
Egil spælir tvør**floytu**.



**flóð** kv
*flóð, flóðar, flóðir*
Sumstaðni er stórur munur á **flóð** og fjøru.

**flógv** kv
*flógv, fláar, fláir*
Fiskurin verður saltaður í **flógv**.

**flógvur** l
*flógvur, flógv, flótt*
Tá ið ovnurin varð skrúvaður frá, gjørdist skjótt **flótt** inni.

**flórur** k
*flórur, flórs, flórar*
Mykjan fór øll í flórin.

**flóta** s
*flóta, flýtur, fleyt, flutu, flotið*
Ein tunna **flýtur** á sjónum.

**flóttafólk** h
*flóttafólk, -fólks, -fólk*
Fólk, ið eru noydd at flýggja heimanífrá, kallast **flóttafólk**.



Materiál chráněný autorskými právy

**fluga** kv
*fluga, flugu, flugur*
Ein skin**fluga** situr í vindeyganum.

**flúgva** s
*flúgva, flýgur, fleyg, flugu, flogið*
Starar **flúgva** ofta í flokki.



**flykra** kv
*flykra, flykru, flykrur*
Kava**flykrurnar** dalaðu spakuliga.

**flysa** s
*flysa, flysur, flusti*
Pápi **flysur** eplini fyri okkum.

**flyta** s
*flyta, flytur, flutti*
Bjarni **flytur** skjótt úr bygdini.

**flytifuglur** k
*flytifuglur, -fugls, -fuglar*
**Flytifuglurin** leitar sær suðureftir um veturin.

**flýggja** s
*flýggja, flýddi*
Fólk **flýddu** í fjøllini undan sjórænarum.
Keypmaðurin **flýggjar** vørur út í krambúðini.

**flætta** s
*flætta, flættaði*
Mamman **flættaði** Karini, áðrenn hon fór í skúla.

**fløða** s
*fløða, fløðir, fløddi*
Tað **fløddi** upp á brúnna í gjár.

**fløga** kv
*fløga, fløgu, fløgur*
„80'ini" var fyrsta føroyska **fløgan**.




**fløkja** kv
*fløkja, fløkju, fløkjur*
Hespan var øll ein **fløkja**.

**fløt** h
*fløt, fløts, – flt*
**Fløt** er feitt, ið legst omaná, tá ið soð kólnar.

**fløta** kv
*fløta, fløtu, fløtur*
Summardáar vaksa á grønu **fløtuni**.

**fløti** k
*fløti, fløta, – flt*
Birgir brúkar **fløta** út í kaffi.



**fløva** s
*fløva, fløvar, fløvaði*
Ovnurin **fløvaði** rúmið.


Materiál chráněný autorskými právy

**fongsul** h
*fongsul, fongsuls, fongsul*
Teir tóku tjóvin og settu hann í **fongsul**.

**fonn** kv
*fonn, fannar, fannir*
Ein kava**fonn** liggur enn í gilinum.

**forboð** h
*forboð, forboðs, forboð*
**Forboð** varð sett fyri at skjóta lomviga.

**forða** s
*forða, forðaði*
Ninna **forðar** beiggjanum at renna út á vegin.

**foreldur** h flt
**Foreldur** hennara eru og ferðast.



**forfedrar** k flt
**Forfedrar** okkara vóru víkingar.

**forherðaður** l
*forherðaður, forherðað, forherðað*
Børn kunnu vera **forherðað**.

**forlag** h
*forlag, forlags, forløg*
Bóka**forløg** geva bøkur út.

**formaður** k
*formaður, -mans, -menn*
Martin var **formaður** á bátinum.

**formur** k
*formur, forms, formar*
Tveir **formar** standa í ovninum.

**fornavn** h
*fornavn, fornavns, fornøvn*
Abbi hevur tvey **fornøvn**, hann eitur Hans Petur.

**forngripagoymsla** kv
*forngripagoymsla, -goymslu, -goymslur*
Á **forngripagoymslum** er nógv áhugavert at síggja.

**fornur** l
*fornur, forn, fornt*
**Fornir** bústaðir eru funnir í Tjørnuvík.

**fororð** h
*fororð, fororðs, fororð*
Í flestu bókum eru **fororð**.

**forsíða** kv
*forsíða, forsíðu, forsíður*
**Forsíðan** á bókini er vøkur.

**fossa** s
*fossa, fossaði*
Vatnið **fossaði** úr krananum.



Materiál chráněný autorskými právy

**fossur** k
*fossur, foss, fossar*

Bøssdalafossur er hægsti **fossur** í Føroyum.

**fostra** s
*fostra, fostraði*
Atli er upp**fostraður** hjá ommuni og abbanum.

**fostur** h
*fostur, fosturs, fostur*
Eitt **fostur** er eitt ófødd barn.

**fosturland** h
*fosturland, -lands, -lond*
Føroyar eru **fosturland** okkara.

**fotografera** s
*fotografera, fotograferaði*
Tey **fotograferaðu** dúgliga á túrinum.

**fóðra** s
*fóðra, fóðraði*
Skraddarin **fóðraði** jakkan av einslistum.

**fóður** h
*fóður, fóðurs, fóður*
Súrhoyggj er gott neyta**fóður**.
Frakkin hevur skinn**fóður**.

**fólk** h
*fólk, fólks, fólk*
Føroyingar eru eitt **fólk**.
Vit eru sjey **fólk** í húsi.

**fólkaligur** l
*fólkaligur, -lig, -ligt*
Niklas og Petra eru **fólkalig**.

**fólkaræði** h
*fólkaræði, -ræðis, -ræði*
Í Norðurlondum er stýrislagið **fólkaræði**.

**fótaspor** h
*fótaspor, -spors, -spor*

**Fótasporini** standa eftir í kavanum.

**fótbóltur** k
*fótbóltur, -bólts, -bóltar*
Børnini spæla **fótbólt** á vøllinum.

**fótur** k
*fótur, fótar, føtur*
Jóna hevur smáar **føtur**.

**fræ** ⇨

**fragd** kv
*fragd, fragdar, – flt*
Tað er ein **fragd** at síggja ein góðan dyst.

**frægur** ⇨

**frakki** k
*frakki, frakka, frakkar*

**Frakkarnir** hanga í gongini.

**frælsi** ⇨


Materiál chráněný autorskými právy

## fram
Finnur gekk aftur og **fram** á gólvinum.

## framburður k
*framburður, -burðar, -burðir*
**Framburðurin** hevur verið stórur seinast í 20. øld.

## framførsla kv

*framførsla, -førslu, -førslur*
Sjónleika**framførslan** eydnaðist væl.

## framgongd kv
*framgongd, -gongdar, -gongdir*
Síðan Marin fór at svimja, hevur **framgongdin** verið stór.

## framhjól h
*framhjól, -hjóls, -hjól*
Mikkjal setur ketur á **framhjólini**.

## frammanfyri
Hann gekk **framman fyri** henni.
Hann gekk **frammanfyri**.

## frammarlaga l
Sílið lá **frammarlaga** í kappingini.

## framsýning kv
*framsýning, -sýningar, -sýningar*
**Framsýning** er í Listaskálanum.

## framtíð kv
*framtíð, -tíðar, -tíðir*
Lítið vita vit um **framtíðina**.

## fransbreyð h
*fransbreyð, -breyðs, -breyð*

Eir fekk sær heimabakað **fransbreyð**.

## frætta ⇨

## frá
Katrin fekk ein ring **frá** Óluvu.

## frágreiðing kv
*frágreiðing, -greiðingar, -greiðingar*
**Frágreiðing** er skrivað.

## frálíkur l
*frálíkur, frálík, frálíkt*
Hetta var ein **frálíkur** dagur.

## fráskildur l
*fráskildur, -skild, -skilt*
Tey eru **fráskild** og búgva hvørt sær.



Materiál chráněný autorskými právy

**frásøgn** kv
*frásøgn, -sagnar, -sagnir*
Summar **frásagnir** eru áhugaverdar at hoyra.

**freist** kv
*freist, freistar, freistir*
**Freistin** varð sett til 14. juli, tá skuldi arbeiðið vera liðugt.

**freista** s
*freista, freistaði*
Hann læt seg ikki **freista** til at roykja.

**frekur** l
*frekur, frek, frekt*
Risar eru átu**frekir**.

**fremja** s
*fremja, fremur, framdi*
Tað, ungur nemur, hann gamal **fremur** (orðtak).

**fremmandaorð** h
*fremmandaorð, -orðs, -orð*
Demokrati er eitt **fremmmandaorð**, ið merkir fólkaræði.

**fremmandur** l
*fremmandur, fremmand, fremmant*
Ein **fremmand** kona var komin at vitja.

**fremri**
Hann er tann **fremri**.

**fremstifingur** k
Tummil, **fremstifingur**, longutong, lekifingur, lítlifingur.

**fremstur**
Hon er **fremst** av teimum øllum.

**fressur** k
*fressur, fress, fressar*
Heindrikur eigur **fressin** Murrimann.

**friðarligur** l
*friðarligur, -lig, -ligt*
Oskar er so **friðarligur**.

**friður** k
*friður, friðar, friðir*
Mong eru við í **friðar**arbeiðinum.

**frikadella** kv
*frikadella, frikadellu, frikadellur*
Mamma og pápi gera **frikadellur**.



**frysta** ⇨

**frystikassi** ⇨


Materiál chráněný autorskými právy

## frí
Leygardag hava vit **frí**.
**Fríu** Føroyar er tíðindablað.

## frídagur k
*frídagur, -dags, -dagar*
Flaggdagurin er **frídagur**.

## fríðka s
*fríðka, fríðkaði*
Tey **fríðkaðu** um húsini.

## fríður l
*fríður, fríð, frítt*
Brynhild var vøkur og **fríð**.

## fríggjadagur k
Letingin segði: **Fríggjadag** geri eg, hvat eg vil.

## fríggjari k
*fríggjari, fríggjara, fríggjarar*
**Fríggjara**ferðin hjá Jákupi á Møn endaði við, at hann fekk krakk.

## fríkorter h
*fríkorter, -korters, -korter*
Børnini hoppa band í **fríkorterinum**.

## frímerki h
*frímerki, -merkis, -merki*
**Frímerki** er á brævbjálvanum.

## frímerkjasavnari k
*frímerkjasavnari, -savnara, -savnarar*
Føroya Filatelistafelag er felagið hjá **frímerkja-savnarum**.



## frískur l
*frískur, frísk, frískt*
Nú er barnið **frískt** aftur.

## frísutur l
*frísutur, frísut, frísut*
Hárið er **frísut**.

## frítíð kv
*frítíð, frítíðar, frítíðir*
Heyst**frítíðin** er í oktober.

## frítíðarheim h
*frítíðarheim, -heims, -heim*
Á **frítíðarheim** kunnu børn koma eftir skúlatíð.

## fríur l
*fríur, frí, frítt*
Hon er ikki **frí** fyri at vera heldur forvitin.

## froskmaður k
*froskmaður, -mans, -menn*
**Froskmenn** leita eftir vrakinum.



## froskur k
*froskur, frosks, froskar*
**Froskurin** hevur long afturbein.



Materiál chráněný autorskými právy

**frost** h
*frost, frosts, – flt*
Hann legðist við kava og **frosti,** og børnini fóru at skreiða.

**fróður** l
*fróður, fróð, frótt*
Gentan er **fróð** og glað.

**frukt** kv

*frukt, fruktar, fruktir*
Eitt fat við **frukt** stendur á borðinum.

**fruktagóður** l
*fruktagóður, -góð, -gott*
Bøurin er **fruktagóður**, tá ið hann er taðaður.

**frumskógur** k
*frumskógur, -skógar, -skógir*
Í Brasil er tættur **frumskógur**.

**frúgv** kv
*frúgv, frúar, frýr/frúgvar*
Í kortspæli eru fýra **frýr**.

**fryntligur** l
*fryntligur, -lig, -ligt*
Margreta er altíð blíð og **fryntlig**.

**frysta** s
*frysta, frystir, frysti*
Tað **frysti** 5 stig í nátt.

**frystikassi** k

*frystikassi, -kassa, -kassar*
Í **frystikassanum** goyma vit frystan mat.

**fræ** h
*fræ, fræs, fræ*
Úr **frænum** kom blóman.

**frægur** l
*frægur, fræg, frægt*
Tað ikki so **frægt** sum ønti í honum.

**frælsi** h
*frælsi, frælsis, frælsi*
Síðan 1960 hava flestu hjálond í Afrika fingið **frælsi**.

**frætta** s
*frætta, frættir, frætti*
Rói **frættir** frá mammu síni.

**frøi** kv
*frøi, frøar, – flt*
**Frøin** var stór, tá ið tey sóust aftur.

**frøknutur** l

*frøknutur, frøknut, frøknut*
Hann var **frøknutur** sum barn.

**fuglasangur** k
*fuglasangur, -sangs, -sangir*
Um morgunin er hugnaligt at vakna av **fuglasangi**.



Materiál chráněný autorskými právy

**fuglur** k



*fuglur, fugls, fuglar*
Nógvur **fuglur** var at síggja.

**fullmáni** k



*fullmáni, -mána, -mánar*
Tá ið vit síggja allan mánan, er **fullmáni**.

**fullur** l
*fullur, full, fult*
Spannin er **full** av vatni.

**fundur** k
*fundur, fundar, fundir*
Ting**fundurin** var útvarpaður.

**fura** kv
*fura, furu, furur*
Borðið er úr **furu**viði.

**fúka** s
*fúka, fýkur, feyk, fuku, fokið*
Vindurin var so nógvur, at bilurin **feyk** útav.

**fúlur** l
*fúlur, fúl, fúlt*
Hann hevur tann óvana at brúka **fúl** orð.

**fygla** s
*fygla, fyglir, fylgdi*
Á Eyðunsrók **fygla** teir lomvigar.

**fyl** h



*fyl, fyls, fyl*
**Fylið** er nýfolað.

**fylgi** h
*fylgi, fylgis, fylgi*
Eitt seyða**fylgi** gongur í dalinum.

**fylgja** s
*fylgja, fylgir, fylgdi*
Tey **fylgdu** honum oman á bátin.

**fylla** s
*fylla, fyllir, fylti*
Gunnvá **fyllir** sær røtur upp í posan.
Magnus **fyllir** seks ár á kyndilsmessu.

**fyri**
Sigrun segði tað eisini **fyri** mær.

**fyrigeva** s
*fyrigeva, -gevur, -gav, -góvu, -givið*
Tey **fyrigóvu** honum mistakið.

**fyrilestur** k



*fyrilestur, -lestrar, -lestrar*
Børnini læra at halda **fyrilestur**.



Materiál chráněný autorskými právy

**fyrimynd** kv
*fyrimynd, -myndar, -myndir*
Gott er at hava góða **fyrimynd**.

**fyrireika** s
*fyrireika, fyrireikaði*
Tey **fyrireikaðu** summarleguna langt frammanundan.

**fyrisøgn** kv
*fyrisøgn, -sagnar, -sagnir*
Vit skriva **fyrisøgn** mánadagin.

**fyrr**
**Fyrr** í tíðini var ikki so lætt at ferðast sum nú.

**fyrrapartur** k
*fyrrapartur, -parts, -partar*
**Fyrrapart** leygardag hava handlarnir opið.

**fyrsti**
*fyrsti, fyrsta, fyrsta*
Marianna var **fyrst** á mál.

**fyrstur**
Grímur Kamban var **fyrstur** at búsetast í Føroyum.

**fysikk** **sí alisfrøði**

**fýra**
Tíkin legði **fýra** hvølpar.

**fýrkantur** k
*fýrkantur, -kants, -kantar*
**Fýrkantar** standa á talvuni.

**fæ** h
*fæ, fíggjar, – flt*
= seyður, neyt
= ogn, ríkidømi
= peningur

**føða** s
*føða, føðir, føddi*
Tey **føddu** lambið inni í vetur.
Olga **føddi** á sjúkrahúsinum.

**føðiland** h
*føðiland, -lands, -lond*
Gud signi mítt **føðiland** Føroyar.

**føðingardagur** k
*føðingardagur, -dags, -dagar*
Ein **føðingardags**gáva lá á borðinum, tá ið eg vaknaði.

**føla** s
*føla, følir, føldi*
Olgar **føldi**, at ovnurin var heitur.

**føra** s

*føra, førir, førdi*
Ferjan **førir** bilar um sundið.



Materiál chráněný autorskými právy

## førilús kv

*førilús, -lúsar, -lýs*
Seyður kann hava **førilýs**.

## førka s

*førka, førkaði*
Óluva **førkaði** seg á beinkinum.

## Føroyar

**Føroyar** liggja í Atlantshavinum.

## føroyingur k

*føroyingur, føroyings, føroyingar*
Vit eru **føroyingar**, serstøk tjóð.

## føroyskur l

*føroyskur, føroysk, føroyskt*
Mál okkara er **føroyskt**.

## førur l

*førur, før,ført*
**Førur** er skrivað við **førum** bókstavum.

## føsta kv

*føsta, føstu, føstur*
**Føstan** eru tær sjey vikurnar fyri páskir.



Materiál chráněný autorskými právy

**gaffil** k
*gaffil, gaffils, gaflar*
Greta leggur knívarnar og **gaflarnar** á borðið.

**gagn** h
*gagn, gagns, – flt*
Tað kom henni til **gagns**, at hon dugdi enskt.

**gala** s
*gala, gelur, gól, gólu, galið*
Hanin **gelur**, tá ið tað fer at lýsa.

**gall** h
*gall, gals, gøll*
**Gallið** situr á livrini. Tað er grønt.

**gamal** l
*gamal, gomul, gamalt*
Omma og abbi eru **gomul**.

**gaman** h
*gaman, gamans, – flt*
Øskudólgur og sópingarkona hildu sær at **gaman**.

**ganda** s
*ganda, gandaði*
Kellingin **gandaði** dreingin til ein stein.

**ganga** s
*ganga, gongur, gekk, gingu, gingið*
Í gjár **gingu** vit inn í dalin. Gunnvá setur breyðini at **ganga**, áðrenn tey fara í ovnin.



**gangur** k
*gangur, gangs, – flt*
Har var nógvur **gangur**, tí børnini spældu um hurðarnar.

**gapa** s
*gapa, gapaði*
Gunnar situr og **gapar**.

**gardina** kv
*gardina, gardinu, gardinur*
**Gardinurnar** eru vakrar.





Materiál chráněný autorskými právy

# G

**garður** k
*garður, garðs, garðar*
Grias laðar **garð.**
Jákup bóndi festi **garðin** í fjør.

**garn** h

*garn, garns, gørn*
Grettir fór at seta **gørn**.

**gass** h
*gass, gass, – flt*
Summi brúka fløsku**gass** at kóka við.

**gáa** s
*gáa, gáaði/gáddi*
Hann **gáaði** ikki snórin og datt um hann.

**gágga** kv
*gágga, gággu, gággur*
Ragnar fiskar **gággur** í dag.

**gálgi** k
*gálgi, gálga, gálgar*
Pætur Jákupsson varð hongdur í **gálga**.

**gáloysni** h
Vanlukkan stóðst av berum **gáloysni**.

**gálva** s
*gálva, gálvaði*
Illavorðið er at **gálva**.

**gána** s
*gána, gánaði*
Tey sita og **gána** heilt burtur í øðrum heimi.

**gás** kv

*gás, gásar, gæs*
Eitt **gása**par við sjey ungum gongur á bønum.

**gáta** kv
*gáta, gátu, gátur*
Stuttligt er at gita **gátur**.

**gátt** kv
*gátt, gáttar, gáttir*
Rósa stendur á **gáttini**, hon vil ikki koma inn.

**gáva** kv

*gáva, gávu, gávur*
Á jólum geva vit **gávur**.

**gávumildur** l
*gávumildur, -mild, -milt*
Tey eru so **gávumild**.

**geingi** h
*geingi, geingis, geingi*
Tá ið hált er, er ringt **geingi**.

**geislavirkin** l
*geislavirkin, -virkin, -virkið*
**Geislavirkin** evni eru hættislig fyri menniskju.



Materiál chráněný autorskými právy

**geisli** k
*geisli, geisla, geislar*
Í hálsi okkara eru sjey **geislar**.

**geispa** s
*geispa, geispaði*
Guðrun hevur **geispað** í allan dag.

**geit** kv
*geit, geitar, geitir*
Úlvurin og tey sjey **geitar**lombini eitur eitt kent ævintýr.

**genta** kv
*genta, gentu, gentur*
Tíggju **gentur** eru í 4. flokki.

**ger** kv
*ger, gerar, – flt*
**Gerin** fær breyðini at ganga.



**gera** s
*gera, ger, gjørdi*
Bilurin varð **gjørdur** aftur á verkstaðnum.

**gerandisdagur** k
*gerandisdagur, -dags, -dagar*
Seks **gerandisdagar** eru í einari viku.

**gerð** kv
*gerð, gerðar, gerðir*
Tað var ein góð **gerð** at hjálpa henni.

**gerði** h
*gerði, gerðis, gerði*
= ein trøð

**gervi** h
*gervi, gervis, gervi*
Heini skifti úr øðrum í triðja **gervi**.

**gestur** k
*gestur, gests, gestir*
**Gestirnir** skrivaðu navn sítt í bókina.

**geva** s
*geva, gevur, gav, góvu, givið*
Tey **góvu** mær súpan til náttturða.

**geyl** h
*geyl, geyls, geyl*
Har hoyrdist eitt ræðuligt **geyl**.

**giftast** s
*giftast, giftist*
Malan og Súni **giftust** í gjár.

**gikt** kv
*gikt, giktar, – flt*
Abbi var ringur av **gikt**.


Materiál chráněný autorskými právy

# G

**gil** h
*gil, gils, gil*
Kúgvin mátti yvir um tað djúpa **gilið**.

**gildi** h
*gildi, gildis, gildi*
Páll helt stórt **gildi**, tá ið hann fylti 50.
Lógin kemur í **gildi** 1. mai.

**gyllin** ⇨

**gyllinsfiskur** ⇨

**gyltur** ⇨

**gimbur** kv
*giumbur, gimbrar, gimbrar*
Haraldur eigur níggju **gimbur**lomb og sjey veður-lomb.

**gimsteinur** k
*gimsteinur, -steins, -steinar*
Diamantar eru **gimsteinar**.



**giraffur** k
*giraffur, girafs, giraffar*
**Giraffar** liva í Afrika.

**girðing** kv
*girðing, girðingar, girðingar*
Seyðurin gongur innan fyri **girðingina**.

**gisna** s
*gisna, gisnaði*
Viðurin **gisnaði**.

**gistingarhús** h
*gistingarhús, -hús, -hús*
Í Havn eru fleiri **gistingarhús**.

**gita** s
*gita, gitir, gitti*
Stuttligt er at **gita** gátur.

**gittari** k
*gittari, gittara, gittarar*
Hervør spælir **gittara**.



**gýðingur** ⇨

**gírigur** l
*gírigur, gírig, gírigt*
Hon er so **gírig**, at hon unnar ikki hundi vatn.

**gýta** ⇨

**gívur** kv
*gívur, gívrar, gívrar*
Í hellinum búðu tríggjar **gívrar**.

**gjalda** s
*gjalda, geldur, galt, guldu, goldið*
Hanna hevur **goldið** rokningina.



Materiál chráněný autorskými právy

**gjar** h
*gjar, gjars, – flt*
**Gjar** veksur á klettum fram við strondini.

**gjár**
Í **gjár** súkkladu tey kapp.

**gjógv** kv
*gjógv, gjáar, gjáir*
Kavin liggur enn í **gjónni**.



**gjósa** s
*gjósa, gýsur, geys, gusu, gosið*
Tað **gýsur** um vindeyguni.

**gjóstur** k
*gjóstur, gjósturs, – flt*
Nógvur **gjóstur** var í hjallinum.

**gjøgnum**
Hon dró tráð **gjøgnum** nálareygað.

**gjølla**
Birna kannaði **gjølla**, at alt var, sum tað átti.

**gjørð** kv
*gjørð, gjarðar, gjarðir*
Tá ið **gjørðin** fór, brotnaði øll tunnan.

**glaða** s
*glaða, glaðaði*
Áðrenn telefonin kom, vórðu boð **glaðað** millum bygdir.
Fjørðurin stóð allur í einari **glaðu**.

**glaður** l
*glaður, glað, glatt*
Jóna var **glað**, tí hon hevði fingið eina reiggju.

**glæma** ⇨

**glæra** ⇨

**glas** h
*glas, glas, gløs*
Egyptarnir vóru teir fyrstu, ið gjørdu **glas**.

**glæsiligur** ⇨

**gleða** s
*gleða, gleðir, gleddi*
Børnini **gleddu** seg til at svimja.

**gleimur** k
*gleimur, gleims, – flt*
Tey flentu øll og hildu sær á **gleimi**.



**gleiva** s
*gleiva, gleivaði*
Risin **gleivaði** um dalar og fjøll.


Materiál chráněný autorskými právy

## gleppa s
*gleppa, gleppur, glapp, gluppu, gloppið*
Illbønin **glapp** honum av munni.

## gler h
*gler, glers, – flt*
**Gler** er klárur ísur, ið t.d. legst á hyljar.

## glerpípa kv
*glerpípa, -pípu, -pípur*
Stórar **glerpípur** hanga í fossinum.

## glitra s
*glitra, glitraði*
Stjørnan **glitraði** sum sólin.

## glíða s
*glíða, glíður, gleið, gliðu, gliðið*
Tóra **gleið** í kavanum, tí hált var.

## globus k
Ein **globus** er jarðarkúlan.



## glotti k
*glotti, glottar, glottar*
Ein lítil **glotti** var fyri framman. Tá sóu teir land.

## gloyma s
*gloyma, gloymir, gloymdi*
Anna **gloymdi** at ringja til abba.

## glóð kv
*glóð, glóðar, gløður*
Árant brendi seg av **glóðini**.

## glógva s
*glógva, glógvaði*
Eyguni í Guðruni **glógvaðu** av gleði.

## gluggi k
*gluggi, glugga, gluggar*
Bárður hugdi út ígjøgnum **gluggan**.



## glúpskur l
*glúpskur, glúpsk, glúpskt*
Ringt er at møta **glúpskum** hundi.

## glæ
Snørið stendur á **glæ**.

## glæma kv
*glæma, glæmu, glæmur*
Tann fyrsta dags**glæman** sæst í eystri.

## glæra kv
*glæra, glæru, glærur*
Lærarin leggur **glærur** á uppvørpuna.



Materiál chráněný autorskými právy

**glæsiligur** l
*glæsiligur, -lig, -ligt*
Norðurlandahúsið er ein **glæsiligur** bygningur.

**gløa** s
*gløa, gløir, gløddi*
Karin **gløddi** við stórum eygum at gávuni.

**gløða** s
*gløða, gløðir, gløddi*
Plátan á komfýrinum **gløddi**, tí eingin hevði sløkt hana.

**gløggur** l
*gløggur, gløgg, gløgt*
**Gløgt** er gestsins eyga (orðtak).

**gnaga** s
*gnaga, gnagaði*
Músin hevur **gnagað** hol á leðrið.

**gníggja** s
*gníggja, gníggjaði*
Lena **gníggjar** svøvnin úr eygunum.



**gonga** kv
*gonga, gongu, gongur*
Bjørg fór til **gongu** úr Gøtu til Fuglafjarðar.
Lætt var at fáa **gonguna** í rættina.

**gongd** kv
*gongd, gongdar, gongdir*
Arbeiði gongur sína vanligu **gongd.**

**gongubreyt** kv
*gongubreyt, -breytar, -breytir*
Fram við vegnum eru **gongubreytir**.

**gongulag** h
*gongulag, -lags, -løg*
**Gongulagið** á pápa var vánaligt aftan á, at hann hevði brotið beinið.

**gonguteigur** k
*gonguteigur, -teigs, -teigar*
Ólavur fór yvir um vegin eftir **gonguteiginum.**



**gor** h
*gor, gors, gor*
Á seyði er alt etandi uttan **gor** og gall.

**gott** l
*gott, betri, best*
Veðrið er **gott** í dag, men tað var **betri** í gjár.

**goyggja** s
*goyggja, goyr, goyði*
Snar **goyr** illa eftir fólki.



Materiál chráněný autorskými právy

**goyma** s
*goyma, goymir, goymdi*
Jákup **goymir** jólagávurnar í skápinum.

**goymsla** kv
*goymsla, goymslu, goymslur*
Handilin hevur eina stóra vøru**goymslu**.

**góðgæti** h
*góðgæti, góðgætis, – flt*
Tey høvdu etið nógv **góðgæti**.

**góðs** h
*góðs, góðs, – flt*
**Góðsið** verður ført í land á plattum.

**góðsligur** l
*góðsligur, góðslig, góðsligt*
Grannin er so **góðsligur**.

**góður** l
*góður, góð, gott*
Lív lesur eina **góða** og stuttliga bók.

**gólv** h
*gólv, gólvs, gólv*
Tey vóru liðug at smyrja **gólvið**.

**gólvteppi** h
*gólvteppi, -teppis, -teppi*
**Gólvteppið** í stovuni var dustsogið.

**grækarismessa** ⇨

**grælingur** ⇨

**gramm** h
gramm = g
1000 **g** eru í einum kg.

**grammur** l
*grammur, gromm, gramt*
Tey eru **gromm** eftir gulli.

**granitt** h
**Granitt** er ljósagrátt ella reydligt grót.

**grannalag** h
*grannalag, -lags, -løg*
Nógv búðu har í **grannalagnum**.



**granni** k
*granni, granna, grannar*
**Grannarnir** vórðu bodnir í føðingardag.

**granntræ** h
*granntræ, -træs, -trø*
Jólatræið er **granntræ**.



**granska** s
*granska, granskaði*
Marin **granskar** gomul skjøl.



Materiál chráněný autorskými právy

**gras** h
*gras, gras, grøs*
Um summarið mugu vit ikki ganga í **grasinum**.

**grasvøllur** k
*grasvøllur, -vallar, -vøllir*
**Grasvøllurin** var illa farin í turkinum.

**grava** s
*grava, grevur, gróv, gróvu, grivið*
Jenis **gróv** eina veit við húsini.

**gráta** s
*gráta, grætur, græt, grótu, grátið*
Dreingirnir **grótu** av longsli at sleppa heim aftur.

**gráur** l
*gráur, grá, grátt*
Ein **gráur** frensur leyp um garðin.

**greiða** s

*greiða, greiðir, greiddi*
Ingi **greiðir** sær, áðrenn hann fer út.

**grein** kv
*grein, greinar, greinar/greinir*
Súsanna breyt eina **grein** av trænum.
7. flokkur hevur nógvar læru**greinir**.

**gremja** s
*gremja, gremur, gramdi*
Jón **gramdi** seg illa um, at hundurin var sjúkur.

**grenja** s
*grenja, grenjaði*
Tað nyttar einki at **grenja** um veðrið.

**greytur** k

*greytur, greytar, – flt*
Øllum dámar ikki líka væl havra**greyt**.

**grind** kv
*grind, grindar, grindir*
Tey fingu **grind** til døgurða.

**grindaboð** h
*grindaboð, -boðs, -boð*
**Grindaboð** hoyrdust allastaðni.

**grynna** ⇨

**gripur** k
*gripur, grips, gripir*
Ein **gripur** er ein lutur, oftast virðismikil.

**grýla** ⇨

**grýn** ⇨


Materiál chráněný autorskými právy

**grína** s
*grína, grínur, grein, grinu, grinið*
Søgan var so stuttlig, at øll fóru at **grína.**

**grípa** s
*grípa, grípur, greip, gripu, gripið*
Málmaðurin **greip** bóltin.

**grísur** k
*grísur, grís, grísar*
Ungi undan svíni eitur **grísur**.

**grýta** ⇨

**grýta** ⇨

**gron** kv
*gron, granar, granar*
Fremsta á skipinum er **gronin**.

**grovmæltur** l
*grovmæltur, grovmælt, grovmælt*
Sigurd er **grovmæltur**.

**grovur** l
*grovur, grov, grovt*
Tað kom ein grovur stoytur.

**gróður** k
*gróður, gróðrar/gróðurs, – flt*
Tá ið sirmar leingi, verður góður **gróður**.



**grógva** s
*grógva, grør, gróði, gróðu, gróð*
Grasið **grør** um várið.

**grópa** s
*grópa, grópaði*
Teir **grópaðu** túnið upp við gravkúgv.



**grót** h
*grót, gróts, – flt*
Hann laðaði garðin úr **gróti**.

**grótbrot** h
*grótbrot, -brots, -brot*
Lastbilurin fer í **grótbrotið** eftir skervi.

**grugg** h
*grugg, grugs, – flt*
Eggini, sum tey rullaðu, vórðu kókað í kaffi**gruggi**.

**gruggutur** l
*gruggutur, gruggut, gruggut*
Hann er altíð so **gruggutur** um morgunin.



Materiál chráněný autorskými právy

**gruna** s
*gruna, grunaði*
Eg **grunaði** tað alla tíðina, at hon fór ikki at koma.

**grund** kv
*grund, grundar, grundir*
Tey stoypa **grundina** í felag.

**grundlóg** kv
*grundlóg, -lógar, -lógir*
**Grundlógin** er høvuðslógin í landinum.

**grunnur** l
*grunnur, grunn, grunt*
Inni við land er **grunt.**

**grús** h
*grús, grús, – flt*
Teir bøta vegin við olju**grúsi**.

**grýn** kv
*grýn, grýns, grýn*
Mamma læt **grýn** út í røstu súpanina.



**grynna** kv
*grynna, grynnu, grynnur*
Bátarnir fáa nógv á **grynnuni**.

**grýla** kv
*grýla, grýlu, grýlur*
Á føstulávint ganga børn **grýla**.



**grýta** kv
*grýta, grýtu, grýtur*
**Grýtan** stendur og kókar á komfýrinum.



**grýta** s
*grýta, grýtir, grýtti*
Tey **grýttu** hann undir í kavabløkum.

**grækarismessa** kv
12. mars er **grækarismessa**.

**grælingur** k
*grælingur, grælings, grælingar*
Tjaldurs**grælingur** er í Føroyum.

**grøða** s
*grøða, grøðir, grøddi*
Jesus **grøddi** tey sjúku.

**grøði** kv
*grøði, grøði, – flt*
Teir tóku nógv epli upp, so **grøðin** var góð.

**Grønland**
Kalaalit Nunaat á grønlendskum.

**grønlendingur** k
*grønlendingur, grønlendings, grønlendingar*
**Grønlendingar** hava eini stuttlig hús í Havn.


Materiál chráněný autorskými právy

**grønmeti** h
*grønmeti, -metis, – flt*

Tey høvdu fleiri sløg av **grønmeti** í urtagarðinum.

**grønur** l
*grønur, grøn, grønt*
Um summarið er bøurin **grønur**.

**grøv** kv
*grøv, gravar, gravir*
Tann gamli maðurin fór til **gravar** í gjár.

**Gud**
**Gud** signi teg.

**gudstænasta** kv
*gudstænasta, -tænastu, -tænastur*

Prestur hevur **gudstænastu** hvønn sunnudag.

**gudur** k
*gudur, guds, gudar*
Óðin og Tórur vóru tveir av **gudunum** hjá norðbúgvum.

**gul** h
*gul, guls, gul*
Í morgun var eitt lítið **gul** av útsynningi.

**gularót** kv
*gularót, -rótar, -røtur*

Sigmundi dámar væl ráar **gularøtur**.

**gull** h
*gull, guls, – flt*
Sára hevur keypt sær eitt **gull**ur.

**gullfiskur** k
*gullfiskur, -fisks, -fiskar*
Sámal hevur fleiri **gullfiskar** í fiskabúrinum.

**gulur** l
*gulur, gul, gult*
Áttamannafarið hjá Súna er **gult**.

**gummi** h
*gummi, gummis,* – flt
Hann eigur svartar **gummi**skógvar við hvítum botni.

**Gunnvá**
*Gunnvá, Gunnvá, Gunnvá, Gunnváar*
Børnunum dámar væl at lurta eftir **Gunnvá**.

**guva** kv
*guva, guvu, guvur*
**Guvan** stóð úr pípuni.



Materiál chráněný autorskými právy

**gyllin** k
*gyllin, gyllins, gyllin*
Karin átti ein **gyllin** í Lítlu Dímun.

**gyllinsfiskur** k
*gyllinsfiskur, -fisks, -fiskar*
**Gyllinsfiskur** er stórur hvalur (20 skinn).

**gyltur** l
*gyltur, gylt, gylt*
Kongakrúnur eru **gyltar**.

**gýðingur** k
*gýðingur, gýðings, gýðingar*
= jødi

**gýta** s
*gýta, gýtir, gýtti*
Fiskur **gýtir** á grunninum.

**gøða** s
*gøða, gøðir, gøddi*
Bóndin **gøðir** gæsnar til jóla

**gøta** kv
*gøta, gøtu, gøtur*
Hann fór eftir bygda**gøtuni** til Hvalvíkar.

**gøtuljós** h
*gøtuljós, -ljós, -ljós*
**Gøtuljósini** verða tendrað í skýmingini.


Materiál chráněný autorskými právy

# H

## hædd ⇨

## haðan

Hann fór fyrst til Nólsoyar, og **haðan** fór hann so út í Hest.

## haft h

*haft, hafts, høft*

Seyðurin var bundin niður við **hafti**.

## hagar

Hann bað Ragnar fara yvir **hagar**, ið Uni sat.

## hagfrøði kv

*hagfrøði, -frøði, – flt*

Torstein lesur **hagfrøði** í Keypmannahavn.

## hagi k

*hagi, haga, hagar*

Neytini ganga í **haganum** um summarið.

## hagl h

*hagl, hagls, høgl*

Jákup út um dyrnar gekk, eittans **haglið** í dintilin fekk.

## hagreiða s

*hagreiða, -reiðir, -reiddi*

Fiskurin varð væl **hagreiddur** umborð.

## haki k



*haki, haka, hakar*

Tórur stendur og veltir við **haka**.

## hækka ⇨

## hald h

*hald, halds, hald*

Hann fekk ikki gingið, tí hann hevði **hald** í rygginum. **Haldið** á koppinum brotnaði.

## halda s

*halda, heldur, helt, hildu, hildið*

Tórunn **heldur** føðingardagin í morgin.



Materiál chráněný autorskými právy

**halgidagur** k
*halgidagur, -dags, -dagar*
Fyrsti og annar páskadagur eru báðir **halgidagar**.

**halgisøga** kv
*halgisøga, -søgu, -søgur*
Reprobus eitur ein kend **halgisøga**.

**hali** k
*hali, hala, halar*
Flestar kettur hava langan **hala**.

**halló**
Hálvdan tók telefonina og segði **halló**.



**Hallur**
*Hallur, Hall, Halli, Hals*
Eg møtti **Halli** í morgun.

**hælsina** ⇨

**halta** s
*halta, haltaði*
Lambið **haltaði**, tí tað var sjúkt í høgra frambeini.

**hælur** ⇨

**halvarðsøka** kv
**Halvarðsøka** er 15. mai.

**hamari** k
*hamari, hamars, hamrar*
Óli gongur í líðini undir **homrunum**.

**hamari** k
*hamari, hamara, hamarar*
Høgni smíðar við einum **hamara**.

**hampiligur** l
*hampiligur, hampilig, hampiligt*
Per er so **hampiligur**.

**handa** s
*handa, handaði*
Jóna **handaði** Atla bókina.

**handarbeiði** h
*handarbeiði, -arbeiðis, -arbeiði*
Vit taka øll **handarbeiði** við í kvøld.

**handbóltur** k
*handbóltur, -bólts, -bóltar*
Hanus spælir **handbólt** í høllini.

**handil** k
*handil, handils, handlar*
Elsa fer til **handils**.




Materiál chráněný autorskými právy

# H

**handklæði** h
*handklæði, -klæðis, -klæði*
Niklas fekk sær eitt **handklæði** úr skápinum.

**handla** s
*handla, handlaði*
Teir **handlaðu** seyðin at vita, hvussu góður hann var.
Anna er farin at **handla** við tógvi.

**handski** k
*handski, handska, handskar*
Lina er í reyðum **handskum**.

**handskrift** kv
*handskrift, -skriftar, -skriftir*
Janus hevur eina vakra **handskrift**.

**handtak** h
*handtak, -taks, -tøk*
**Handtakið** á úthurðini er úr messing.

**handtaka** s
*handtaka, -tekur, -tók, -tóku, -tikið*
Løgreglan **handtók** tjóvin.

**handverkari** k
*handverkari, -verkara, -verkarar*
Smiðir, snikkarar og bakarar eru **handverkarar**.

**hanga** s
*hanga, hongur, hekk, hingu, hingið*
Frakkarnir **hanga** í gongini.

**hani** k
*hani, hana, hanar*
Hønan skrukkar, og **hanin** gelur.



**hann**
Eg fari niðan til **hansara** í morgin.

**har**
Bólturin er ikki her, hann liggur **har** yviri á vøllinum.

**hara** kv
*hara, haru, harur*
Ymist er, sum **harurnar** trívast í Føroyum.

**harðførur** l
*harðførur, -før, -ført*
Á Heyggi er **harðført** á landnyrðingi.

**harður** l
*harður, hørð, hart*
Streymurin er **harður** í Skopunarfirði.

**harka** s
*harka, harkaði*
Hon **harkaði** at gera vart við seg.



Materiál chráněný autorskými právy

**harmonika** kv
*harmonika, harmoniku, harmonikur*
Áka dámar væl at spæla **harmoniku**.



**harpa** kv
*harpa, harpu, harpur*
Ingrið spælir **harpu**.

**hasin**
*hasin, handa, hatta*
**Hasin** drongurin.
**Handa** gentan.
**Hatta** barnið.

**hasta** s
*hasta, hastaði*
Tað **hastar** at verða liðug við bulin.

**hastverk** h
*hastverk, -verks, -verk*
**Hastverk** er lastverk (orðtak).

**hættisligur** ⇨

**hattur** k
*hattur, hats, hattar*
Lena er í reyðum **hatti**.



**hatur** h
*hatur, haturs, – flt*
Ikki verður tann glaður, ið kastar **hatur** á onnur.

**hav** h
*hav, havs, høv*
Í góðveðri um summarið kann **havið** vera slætt.

**hava** s
*hava, hevur, hevði, høvdu, havt*
Karin **hevur havt** krím.

**havbotnur** k
*havbotnur, -botns, -botnar*
Í Norðsjónum er olja í **havbotninum**.

**havn** kv
*havn, havnar, havnir*
Nú byggja tey stóra **havn** í bygdini.

**havragrýn** h
*havragrýn, -grýns, -grýn*
Sigga sýpur **havragrýn** um morgunin.

**havsneyð** kv
*havsneyð, -neyðar, –flt*
Skipið var í **havsneyð** í ódnarveðrinum.



**hábærsligur** l
*hábærsligur, hábærslig, hábærsligt*
Kongur var **hábærsligur**.



Materiál chráněný autorskými právy

H

**háða** s
*háða, háðaði*
Tey **háðaðu** hann, tá ið hann datt á sjógv.

**háhús** h
*háhús, háhús, háhús*
Í útlondum búgva nógv fólk í **háhúsum**.



**hála** s
*hála, hálaði*
Trolarin **hálaði**.

**hálendskur** l
*hálendskur, hálendsk, hálendskt*
**Hálendska** flaggið er reytt, hvítt og blátt.

**hálka** kv
*hálka, hálku, hálkur*
Í **hálku** er ringt at ganga.



**hálsur** k
*hálsur, háls, hálsar*
Hundurin hevði reim um **hálsin**.

**hálur** l
*hálur, hál, hált*
Brekkan er **hál** í kava.

**hálvgum**
Klokkan er **hálvgum** trý.

**hálvleikur** k
*hálvleikur, -leiks, -leikir*
Fyrri **hálvleikur** endaði javnur.

**hálvtak** h
*hálvtak, -taks, -tøk*
Hann hevði fisk hangandi undir **hálvtakinum**.

**hálvur** l
*hálvur, hálv, hálvt*
Teir fingu **hálvt** skinn av grind í part.

**hár** h
*hár, hárs, hár*
Súsanna hevur myrkt **hár**.

**hárfríðkanarstova** kv
*hárfríðkanarstova, -stovu, -stovur*
Elsa hevur **hárfríðkanarstovu** í kjallaranum.



**háskúli** k
*háskúli, -skúla, -skúlar*
Føroya Fólka**háskúli** byrjaði í 1899.

**háspenningur** k
*háspenningur, -spennings, – flt*
**Háspennings**linja er um Leirvíksfjørð.



Materiál chráněný autorskými právy

**hásæti** h
*hásæti, hásætis, hásæti*
Høvdingin sat í **hásæti**.

**hátalari** k
*hátalari, -talara, -talarar*
**Hátalarin** brotnaði, so vit hoyrdu ikki røðuna.



**hátíð** kv
*hátíð, -tíðar, -tíðir*
Jólini eru gleði**hátíðin** mikla.

**hátrýst** h
*hátrýst, hátrýsts, hátrýst*
**Hátrýstið** er við Asorurnar.

**háttur** k
*háttur, háttar, hættir/háttir*
Uppgávan kann loysast á ymsan **hátt**.

**hávasták** h
*hávasták, hávastáks, hávasták*
Nógv **hávasták** var, tá ið gjørt varð til brúdleyps.

**hávur** k
*hávur, hávs, hávar*
Hemari er ein **hávur**.

**hefti** h
*hefti, heftis, hefti*
Súsanna skrivaði stílin inn í tað nýggja **heftið**.

**heiði** kv
*heiði, heiðar, heiðar*
Burtur á **heiði**, har fuglurin syngur.

**heiður** k
*heiður, heiðurs, – flt*
Hann fekk bæði **heiður** og rós fyri at hava bjargað manningini.

**heilabløðing** kv
*heilabløðing, -bløðingar, -bløðingar*
Langabbi doyði av **heilabløðing**.

**heilagur** l
*heilagur, heilag, heilagt*
Fyrr vóru summi fólk hildin at vera **heilag**, tey vórðu kallað halgimenni.

**heilaskjálvti** k
*heilaskjálvti, -skjálvta, -skjálvtar*
Bjørn fekk **heilaskjálvta**, tá ið hann datt út av trappuni.

**heili** k
*heili, heila, heilar*
Tá ið vit sova, hvílir **heilin**.

**heiligdagur** k
*heiligdagur, -dags, -dagar*
Fyrsti og annar páskadagur eru báðir **heiligdagar.**


Materiál chráněný autorskými právy

# H

**heilivágur** k



*heilivágur, -vágs, – flt*
**Heilivágur** er fyri nógvar sjúkur.

**heilsa** kv
*heilsa, heilsu, – flt*
Abbi livir ikki væl, hann hevur ikki so góða **heilsu** longur.

**heilsa** s
*heilsa, heilsaði*
Eg skal **heilsa** tær frá Ólavi.

**heilsan** kv
*heilsan, heilsanar, heilsanir*
Eg havi eina **heilsan** til tín frá Øssuri.

**heilur** l
*heilur, heil, heilt*
Skálin er **heil** enn, men koppurin er brotin.

**heim**
Malan fór glað **heim** til húsa.

**heimabeiti** h
*heimabeiti, -beitis, -beiti*
Kúgvin stendur á **heimabeiti.**

**heimur** k
*heimur, heims, heimar*
Tíðindi fara um allan **heimin.**

**heingja** s



*heingja, heingir, hongdi*
Tummas **heingir** fiskin á træið.

**heinta** s
*heinta, heintaði*
At **heinta** okkurt = at fara eftir onkrum.
Tit **heintið** mær Gutta og Lágan Tór.

**heitur** l
*heitur, heit, heitt*
Sólin er **heit.**

**hekla** s
*hekla, heklaði*
Helga **heklar** sær einar gardinur.

**hekkutrolari** k
*hekkutrolari, -trolara, -trolarar*



Teir keyptu ein nýggjan **hekkutrolara.**

**heldur**
Hann skuldi **heldur** latið teg farið, tí tú ert **heldur** størri.

**hella** kv
*hella, hellu, hellur*
Tey standa á **helluni** og hyggja út á sjógv.



Materiál chráněný autorskými právy

**hella** s
*hella, hellir, helti*
Beinta **hellir** vanga.

**helmingur** k
*helmingur, helmings, helmingar*
Mamma koyrir **helmingin** av breyðinum í frystikassan.

**helvt** kv
*helvt, helvtar, helvtir*
Ása og Óli býta súreplið í **helvt.**



**henda** s
*henda, hendir, hendi*
Tað **hendir** seg ikki, at øll koma í senn.

**hending** kv
*hending, hendingar, hendingar*
Tað var ein søgulig **hending,** tá ið menn settu fótin á mánan.

**henta** s
*henta, hentaði*
Børnini **henta** ber í haganum.

**heppin** l
*heppin, heppin, heppið*
Jákup var **heppin** at vinna í happadráttinum.




**her**
Her á staðnum vaksa nógvar sóljur.

**herða** kv
*herða, herðir, herdi*
Hermenninir **herða** stríðið.

**herðar** kv flt
Maðurin hevur breiðar **herðar.**

**herja** s
*herja, herjaði*
Herurin **herjaði** á fíggindan.

**herma** s
*herma, hermir, hermdi*
Tey **hermdu** hvørt eftir øðrum.

**hermaður** k
*hermaður, -mans, -menn*
Føroyingum nýtist ikki at vera **hermenn.**



**hertaka** s
*hertaka, -tekur, -tók, -tóku, -tikið*
Føroyar vóru **hertiknar** av bretum.

**herur** k
*herur, hers, herar*
Ein **herur** av óvitum rann oman gjøgnum bøin.


Materiál chráněný autorskými právy

**herverk** h
*herverk, -verks, -verk*
**Herverk** varð gjørt í miðbýnum.

**herviligur** l
*herviligur, -lig, -ligt*
Eitt **herviligt** ódnarveður brast á.

**hesin**
*Hesin, henda, hetta*
**Hesin** drongurin spælir.
**Henda** gentan fiskar síl.
**Hetta** barnið flennir.

**hestakreftir** kv flt
Motorurin hevur átta **hestakreftir.**

**hestur** k
*hestur, hests, hestar*
**Hestur** mín er svartur.



**hetja** kv
*hetja, hetju, hetjur*
Øssur kendi seg sum eina **hetju**, tá ið hann hevði bjargað systrini.

**hetta** kv
*hetta, hettu, hettur*
Erla koyrdi **hettuna** upp á høvdið, so hon ikki bleiv køld.



**hevna** s
*hevna, hevnir, hevndi*
Sigmundur **hevndi** síns faðirs deyða.

**hevnd** kv
*hevnd, hevndar, hevndir*
Jákup lovaði **hevnd**, um tey ikki tagdu.

**heyggjur** k
*heyggjur, heygs, heyggjar*
Tjaldrið hevur reiður uppi á **heygnum**.

**heyst** h
*heyst, heysts, heyst*
Gunnvá var í Hesti í **heyst**frítíðini.

**hiðani**
Fólkini fóru **hiðani** klokkan sjey.

**higar**
Fólkini komu **higar** seint á kvøldi.

**hyggja** ⇨

**higstra** s
*higstra, higstraði*
Tú **higstrar,** tá ið tú hevur grátið illa.

**hylki** ⇨



Materiál chráněný autorskými právy

**hill** kv
*hill, hillar, hillar*
Á **hillini** standa nógvar dukkur.

**hylling** ⇨

**hylur** ⇨

**himmal** k
*himmal, himmals, himlar*
**Himmalin** er bláur.

**himprast** s
*himprast, himpraðist*
Børnini **himpraðust** at fara út í hylin.

**hin**
*hin, hin, hitt*
**Hin** drongurin.
**Hin** gentan.
**Hitt** barnið.

**hindra** s
*hindra, hindraði*
Regnið **hindrar** honum at fáa hoyggið turt.

**hinumegin**
Jórun býr **hinumegin** vegin.

**hirða** s
*hirða, hirðir, hirdi*
Tey **hirdu** ikki at svara honum aftur.

**hirði** k
*hirði, hirða, hirðar*
**Hirðarnir** sóu stjørnuna yvir Betlehem.



**hýrur** ⇨

**hýsa** ⇨

**hista** s
*hista, histaði*
Sanna fór at **hista**.

**hiti** k
*hiti, hita, – flt*
Eydna var sjúk og hevði nógvan **hita**.

**hitt** sí **hin**

**hitta** s
*hitta, hittir, hitti*
Konan og maðurin **hittust** í býnum.

**hjalli** k
*hjalli, hjalla, hjallar*
Á Sandvíka**hjalla** er brennistøð.

**hjallur** k
*hjallur, hjals, hjallar*
Í **hjallinum** hongur fitt av kjøti.





Materiál chráněný autorskými právy

## hjarta h
*hjarta, hjarta, hjørtu*
**Hjartað** í fuglinum sló hart.

## hjartaligur l
*hjartaligur, -lig, -ligt*
Gumma og gubbi eru so **hjartalig**.

## hjartari k

*hjartari, hjartara, hjartarar*
Fía meldaði í **hjartara**.

## hjartkiptur l
*hjartkiptur, -kipt, -kipt*
Dreingirnir vóru **hjartkiptir**, tí teir høvdu brotið rútin.

## hjá
**Hjá** ommu og abba fái eg ein drekkamunn.

## hjálmur k
*hjálmur, hjálms, hjálmar*
Menninir nýta **hjálm**, tá ið teir arbeiða.

## hjálpa s
*hjálpa, hjálpir, hjálpti*
Kári **hjálpir** ommuni at baka.

## hjálpari k
*hjálpari, hjálpara, hjálparar*
Omma og abbi høvdu heima**hjálpara**.

## hjálparleysur l
*hjálparleysur, -leys, -leyst*
Músin er **hjálparleys** í felluni.

## hjálpsamur l
*hjálpsamur, -som, -samt*
Sigrið er **hjálpsom**.

## hjávegur k
*hjávegur, -vegar, -vegir*
Ein **hjávegur** gongur niðan til húsini.

## hjól h
*hjól, hjóls, hjól*
**Hjólini** á flogfarinum fóru niður.

## hjún h flt
Maður og kona eru **hjún**.

## hjørtur k
*hjørtur, hjartar, hjørtir*
Ein elgur er ein stórur **hjørtur**.

## hokna s
*hokna, hoknaði*
Karl **hoknaði** niður av møði.

## hol h
*hol, hols, hol*
Eitt stórt **hol** var á hosuni.



Materiál chráněný autorskými právy

## **hola** kv

*hola, holu, holur*
Helga og Stina gera **holu** í hoynum.

## **hold** h

*hold, holds, hold*
Hol er á skjúrtuni, so tað sæst inn á bert **hold**.

## **holva** s

*holva, holvir, holvdi*
Báturin **holvdist**, tí at hann fekk ein brotasjógv.

## **hon**

**Hon** veittraði til **hennara**.

## **hond** kv

*hond, handar, hendur*
Per vaskar sær um **hendurnar**, áðrenn hann fer at eta.

## **hongja** sí **heingja**

## **hongsl** h

*hongsl, hongsls, hongsl*
**Hongslini** á hurðini vóru rustað.

## **honk** kv

*honk, hankar, henkur*
**Honkin** á spannini var slitnað.

## **hop** h

*hop, hops, hop*
Tey høvdu einki **hop** um at síggja bátin aftur.

## **hopa** s

*hopa, hopaði*
Hann **hopaði** undan, tá ið hundurin leyp á.

## **horn** h

*horn, horns, horn*
Veðrurin hevur stór **horn**.
Sonja spælir bæði á klaver og á **horn**.

## **hornaspark** h

*hornaspark, -sparks, -spørk*
Sølvi skeyt **hornasparkið** í málið.

## **hornorkestur** h

*hornorkestur, -orkesturs, -orkestur*
Øll **hornorkestrini** vóru við á stevnuni.

## **hosta** s

*hosta, hostaði*
Barba hevði krím og **hostaði** illa.

## **hotell** h

*hotell, hotels, hotell*
Tey gistu á **hotelli**, tá ið tey vóru í Spania.





Materiál chráněný autorskými právy

# H

## hovna s
*hovna, hovnaði*
Fingurin á Kára **hovnaði**, tá ið hann hevði meltað hann.

## hoyggj h
*hoyggj, hoys, hoyggj*
Kúgvin etur **hoyggj** um veturin.

## hoyggja s

*hoyggja, hoyggjaði*
Eydna hjálpir gubba sínum at **hoyggja**.

## hoyra s
*hoyra, hoyrir, hoyrdi*
Omma **hoyrir** ikki so væl longur.

## hoyrúgva kv
*hoyrúgva, -rúgvu, -rúgvur*
Tey raka hoyggið saman í stórar **hoyrúgvur**.

## hóast
Bartal varð ov seinur, **hóast** hann var tíðliga uppi.

## hógvur k
*hógvur, hóvs, hógvar*
Hestur hevur **hógvar.** **Hógvur** er nýsligin bøur.

## hólmur k
*hólmur, hólms, hólmar*

Á Tind**hólmi** eru 5 tindar, Ytsti, Arni, Lítli, Breiði, Bogni.

## hósdagur k
Suðuroyingar kalla **hósdag** tórsdag.

## hóska s
*hóska, hóskaði*
Litirnir **hóskaðu** væl saman.

## hóslag h
*hóslag, hóslags, hósløg*
Kári og Pætur vóru altíð saman. Teir vóru í **hóslag**.

## hótta s
*hótta, hóttir, hótti*
Hann **hótti** við at rýma, fekk hann ikki sín vilja.

## hóvligur l
*hóvligur, hóvlig, hóvligt*
**Hóvliga** fóru genturnar, at tær ikki skuldu órógva nakran.

## hugagóður l
*hugagóður, -góð, -gott*
Sunniva er **hugagóð** í skúlanum.

## hugflog h
*hugflog, -flogs, -flog*
Pól dugir væl at finna uppá, hann hevur gott **hugflog**.



Materiál chráněný autorskými právy

**hugi** k
*hugi, huga, hugar*
Bókin fór Jóni ikki úr **huga**.

**hugna** s
*hugna, hugnaði*
Tey sita og **hugna** sær í stovuni.

**hugnaligur** l
*hugnaligur, -lig, -ligt*
Omma er ein **hugnalig**, gomul kona.

**hugsa** s
*hugsa, hugsaði*
Unna **hugsar** seg altíð væl um, áðrenn hon fer til verka.

**hugsanarsamur** l
*hugsanarsamur, -som, -samt*
Sigrið er sera **hugsanarsom**.

**hugskot** h
*hugskot, -skots, -skot*
Árni fekk **hugskotið** at stovna nýtt felag.

**hugtaka** s
*hugtaka, -tekur, -tók, -tóku, -tikið*
Vestmannabjørgini hava **hugtikið** mangan.

**hugur** k
*hugur, hugs, hugir*
Hann etur við góðum **hugi**.
Tað kom henni ikki til **hugs**, at hon hevði mistikið seg.

**huldufólk** h
*huldufólk, -fólks, -fólk*
Fyrr varð sagt, at **huldufólk** hildu til í haganum.

**hunangur** k
*hunangur, hunangs, – flt*
Bjørnum dámar væl **hunang**.



**hundrað**
V.U. Hammershaimb stendur á **hundrað**krónuseðlinum.

**hundadagar** k
**Hundadagarnir** eru 23. juli - 23. august.

**hundur** k
*hundur, hunds, hundar*
Per eigur ein **hund**, ið eitur Snar.

**hungur** k el. h
*hungur, hungurs, – flt*
Nógvastaðni í heiminum líða fólk **hungur**.

**hungursneyð** kv
*hungursneyð, -neyðar, – flt*
Í árinum 1808 var **hungursneyð** í Føroyum.


Materiál chráněný autorskými právy

**hurð** kv
*hurð, hurðar, hurðar*
Sveinur málaði **hurðarnar** reyðar.

**hurlivasi** k
*hurlivasi, hurlivasa, hurlivasar*
Har vóru so nógvir bilar, at ferðslan var tann beri **hurlivasi**.

**hurra** s
*hurra, hurraði*
Bilarnir **hurra** allan dagin.

**hurrá**
Tey rópa **hurrá** fyri føðingardagsbarninum.

**húð** kv
*húð, húðar, húðir*
Fyrr seymaðu menn **húðar**skógvar.

**húgva** kv
*húgva, húgvu, húgvur*
Hákun gongur ofta í topp**húgvu**.

**húka** s
*húka, hýkur, heyk, huku, hokið*
Bárður situr og **hýkur** yviri í horninum.

**hús** h
*hús, hús, hús*
Tey eru farin í nýggj **hús**.

**húsfólk** h
*húsfólk, -fólks, -fólk*
Alt **húsfólkið** situr og etur døgurða.

**húsi** k
*húsi, húsa, húsar*
Blýantarnir liggja í penna**húsanum**.

**húskallur** k
*húskallur, -kals, -kallar*
Snopprikkur var **húskallur** hjá Giljabóndanum.

**húski** h
*húski, húskis, húski*
Tvey **húski** búgva í teimum stóru húsunum.



**húsligur** l
*húsligur, húslig, húsligt*
Páll er sera **húsligur**, hann hjálpir ofta mammu síni.

**hvaðan**
**Hvaðan** er Oddur ættaður?

**hvaðna**
Ringur var hann, men hann gjørdist **hvaðna** verri eftir vanlukkuna.

**hvagar**
**Hvagar** fara tit at halda summarfrí?



Materiál chráněný autorskými právy

**hvalspýggja** kv
*hvalspýggja, -spýggju, -spýggjur*
**Hvalspýggjan** livir í sjónum.

**hvalur** k
*hvalur, hvals, hvalir*
Hundrað **hvalir** løgdu beinini á sandinum.



**hvalvág** kv
*hvalvág, -vágar, -vágir*
Hvalba er góð **hvalvág**.

**hvar**
Kári spurdi, **hvar** grindin var.

**hvassur** l
*hvassur, hvøss, hvast*
Øksin er sera **hvøss**.

**hvat**
Hann visti ikki, **hvat** hann skuldi gera.

**hveiti** kv
*hveiti, hveiti, – flt*
**Hveiti**mjøl verður brúkt til breyð.

**hveppa** s
*hveppa, hveppir, hvepti*
Hann **hvepti** seg við at leypa útí, tí tað var so kalt.

**hvessa** s
*hvessa, hvessir, hvesti*
Hann **hvessir** knívin á brýni.

**hviril** k
*hviril, hvirils, hvirlar*
Ásbjørn hevur **hviril** í nakkanum.

**hvirla** kv
*hvirla, hvirlu, hvirlur*
Við hvørt kemur vindurin í **hvirlum**.

**hví**
Jón visti ikki, **hví** hann gjørdi tað.

**hvíla** s
*hvíla, hvílir, hvíldi*
Kári legði seg altíð at **hvíla** seg eftir døgurða.

**hvíld** kv
*hvíld, hvíldar, hvíldir*
Arbeiðsmenninir fingu sær eina stutta **hvíld** hvønn tíma.



**hvína** s
*hvína, hvínur, hvein, hvinu, hvinið*
Hvølpurin **hvein** illa eftir mammu síni.

**hvíta** kv
*hvíta, hvítu, – flt*
Bjarni sýpur **hvítu**.



Materiál chráněný autorskými právy

**hvíta** s
*hvíta, hvítir, hvítti*
Tað **hvítir** ikki við land, tað er púra logn.

**hvíti** k
*hvíti, hvíta, hvítar*
Í einum eggi eru **hvíti** og reyði.

**hvítkál** h
*hvítkál, -káls, -kál*
Jónas keypti tvey **hvítkál**.

**hvítklæddur** l
*hvítklæddur, -kløðd, -klætt*
Menninir ganga **hvítklæddir** í tí góða veðrinum.

**hvítta** s
*hvítta, hvíttaði*
Dreingirnir **hvíttaðu** garðin fyri Tummas.



**hvítur** l
*hvítur, hvít, hvítt*
Húsini eru **hvít**.

**hvonn** kv
*hvonn, hvannar, hvannir*
**Hvannir** vaksa væl í Føroyum.

**hvussu**
**Hvussu** eitur tú?

**hvøkka** s
*hvøkka, hvøkkur, hvakk, hvukku, hvokkið*
Eg **hvakk** við, tá ið eg hoyrdi teg rópa.

**hvølja** kv
*hvølja, hvølju, hvøljur*
**Hvølja** er uttan á spikinum á hvali.

**hvøllur** l
*hvøllur, hvøll, hvølt*
Har var ein **hvøllur** brestur, tá ið skotið small.

**hvølpur** k
*hvølpur, hvølps, hvølpar*
Marin eigur ein so fittan lítlan hunda**hvølp**.

**hvølva** s
*hvølva, hvølvir, hvølvdi*
Árant **hvølvdi** glasið, so mjólkin rann á gólvið.

**hvønn**
**Hvønn** sást tú?

**hvør**
*hvør, hvønn, hvørjum, hvørs*
**Hvør** er hasin, ið situr har?

**hvørgin**
**Hvørgin** teirra kendi gentuna.



Materiál chráněný autorskými právy

**hvørjum**
Hvørjum vart tú hjá?

**hvørki**
**Hvørki** Kristianna ella Óli vildi fara við.

**hvørs**
**Hvørs** troyggja er hetta?

**hvørva** s
*hvørva, hvørvur, hvarv, hvurvu, horvið/hvorvið*
Báturin **hvarv**, og vit sóu hann ikki aftur.

**hyggja** s
*hyggja, hyggur, hugdi, hugdu, hugt*
Árni stendur og **hyggur** at veltuni.

**hylki** h
*hylki, hylkis, hylki*
Ormveran ger sær **hylki** at vera í.

**hylling** kv
*hylling, hyllingar, hyllingar*
Hann hevur **hylling** á at lesa.

**hylur** k
*hylur, hyljar/hyls, hyljar*
Børnini hava byrgt **hyljar** í ánni.

**hýrur** k
*hýrur, hýrs, – flt*
Teir vóru í góðum **hýri**, tí teir høvdu fiskað so væl.

**hýsa** kv
*hýsa, hýsu, hýsur*
Teir fingu 400 pund av **hýsu**.

**hýsa** s
*hýsa, hýsir, hýsti*
Eingin vildi **hýsa** Uppsala Pæturi.

**hædd** kv
*hædd, hæddar, hæddir*
Andras og Lena eru eins til **hæddar**.

**hækka** s
*hækka, hækkaði*
Prísirnir **hækkaðu** nógv í fjør.

**hælsina** kv
*hælsina, hælsinu, hælsinur*
**Hælsinan** gongur úr hælinum og upp í tjúkkan.

**hælur** k
*hælur, hæls, hælir*
Bjarni fekk ilt í vinstra **hæl**.
Abbi bant tjóðrið á kúnni um **hælin**.
Tveir **hælir** eru í hesum orvinum.



Materiál chráněný autorskými právy

# H

## hættisligur l

*hættisligur, hættislig, hættisligt*
Tað er **hættisligt** at standa í báti.

## høgga s



*høgga, høggur, høgdi*
Birgir **høggur** brenni.

## høgguslokkur k

*høgguslokkur, -sloks, -slokkar*
Bátarnir fingu væl av **høgguslokki**.

## høgl sí hagl

## høgri l

*høgri, høgra, høgra*
Mortan breyt **høgra** fót.

## høgtíð kv

*høgtíð, -tíðar, -tíðir*
Ársins stóru **høgtíðir** eru jól, páskir og hvítusunna.

## høgur l

*høgur, høg, høgt*
Skælingsfjall er meira enn 700 metrar **høgt**.

## høgætt kv

*høgætt, -ættar, -ættir*
**Høgættirnar** koma norðaneftir millum eystan og vestan.

## høka kv

*høka, høku, høkur*
Dávur datt og skurslaði seg í **høkuna**.

## høll kv

*høll, hallar, hallir*
Nú er ítrótta**høll** í nógvum bygdum.

## hølva s

*hølva, hølvaði*
Hanus dugir væl at **hølva**.

## høna kv



*høna, hønu, hønur*
Durita eigur átta **hønur**.

## hørð sí harður

## høsn h flt

**Høsnini** ganga í túninum.

## høvd h

*høvd, høvuðs, høvd*
Einar setti húgvuna á **høvdið** og fór út.

## høvdi k

*høvdi, høvda, høvdar*
Skál**høvdi** er eystast á Sandoynni.



Materiál chráněný autorskými právy

**høvdingi** k
*høvdingi, høvdinga, høvdingar*
Í Føroyum búðu **høvdingar** tveir, Tróndur og Sigmundur itu teir.

**høvdu** sí **hevði**

**høvi** h
*høvi, høvis, høvi*
Meðan eg var í Havn, nýtti eg **høvið** at síggja Norðurlandahúsið.

**høvla** sí **hølva**

**høvuðpína** kv
*høvuðpína, -pínu,* – flt
Ringt er at hava **høvuðpínu**.

**høvuðsleiklutur** k
*høvuðsleiklutur, -lutar, -lutir*
Súsanna hevur **høvuðsleiklutin** í sjónleikinum.

**høvuðsstaður** k
*høvuðsstaður, -staðar, -staðir*
Tórshavn er **høvuðsstaður** okkara.

**høvil** k
*høvil, høvils, høvlar*
Djóni eigur fleiri **høvlar**.



**høvur** h
*høvur, høvuðs, høvur*
Hatta fái eg ikki **høvur** upp á = hatta skilji eg ikki.



Materiál chráněný autorskými právy

## ið
Hatta er barnið, **ið** var her í gjár.

## iðra s
*iðra, iðraði*
Tey **iðraðu** seg um gerðina.

## igulker h
*igulker, igulkers, igulker*
**Igulkerið** hevur tindar. Tað er í fjøruni.

## ikki
Kemur tú **ikki** nú, sleppur tú **ikki** við.

## il kv
*il, iljar, iljar*
Hanna kitlast illa undir **ilini**.



## illa
*illa, verri, verst*
Tað ber mær **illa** til at koma í dag, men tað ber **verri** til í morgin.

## illsintur l
*illsintur, -sint, -sint*
Hann er so **illsintur**, at sinnið kemur í hann av næstan ongum.

## illur l
*illur, ill, ilt*
Hon varð **ill**, tá ið hon sá, hvat tey høvdu gjørt.

## ilt
Barnið datt og fekk **ilt** í knæið.

## ymiskur ⇨

## ymissur ⇨

## ymsastaðni ⇨

## ynda ⇨

## indari k
*indari, indara, indarar*
Fólk úr India eru **indarar**.



**indiáni** k
*indiáni, indiána, indiánar*
Tá ið tey hvítu komu til Amerika, hittu tey **indiánar**.



**yndisligur** ⇨

**indur** h
*indur, indurs, indur*
**Indrini** verða kókað.

**Ingi**
*Ingi, Inga, Inga, Inga*
Lærarin spurdi **Inga**, um hann kom við til Klaksvíkar.

**yngri** ⇨

**yngul** ⇨

**inn**
Nú fer at regna, og tey fara **inn**.

**inna** s
*inna, innir, inti*
Óli Rami **inti** avreksverk, tá ið hann feldi risan.

**innan**
Húsini vórðu málað **innan**.

**innandura**
**Innandura** var bæði heitt og fjálgt.

**innanhýsis**
Tey høvdu tað hugnaligt **innanhýsis**.

**innbúgv** h
*innbúgv, -bús, -búgv*
**Innbúgvið** er tryggjað fyri eld- og vatnskaða.



**inni**
Súkklan stendur **inni** í kjallaranum.

**innlegg** h
*innlegg, -legs, -legg*
Inga fekk **innlegg** í skógvarnar.

**innspræning** kv
*innspræning, -spræningar, -spræningar*
Páll fekk eina **innspræning** fyri bruna.

**inntøka** kv
*inntøka, -tøku, -tøkur*
Nýggja arbeiðið gav Evu góða **inntøku**.

**innvølur** k
*innvølur, -vøls, -vølar*
**Innvølurin** er m. a. vombin og vilini.

**ynskja** ⇨

**yrkadagur** ⇨


Materiál chráněný autorskými právy

**yrking** ⇨

**yrkja** ⇨

**yrkjari** ⇨

**ivaleyst**
Tað er **ivaleyst** til av lunda.

**ivast** s
*ivast, ivaðist*
Ester **ivaðist** í at fara við til Havnar.

**ivi** k
*ivi, iva, – flt*
Dáin stendur í **iva**.

**yvir** ⇨

**yvirlit** ⇨

**yvirvaksin** ⇨



Materiál chráněný autorskými právy

**í**
Anna er **í** nýggjum klæðum.

**í áðni** sí áðni

**íbúð** kv
*íbúð, íbúðar, íbúðir*
Systrarnar fingu eina góða **íbúð**.

**íbygdur** l
*íbygdur, íbygd, íbygt*
Tað sigst, at í summum steinum er **íbygt** = har búgva vættrar.

**ídnaður** k
*ídnaður, ídnaðar, ídnaðir*
Uppi á Hálsi er **ídnaðar**øki.



**ídni** h
*ídni, ídnis, – flt*
Sigvør vísti **ídni** í arbeiðinum.

**íðin** l
*íðin, íðin, íðið*
Sámal var **íðin** at lesa.

**íðka** s
*íðka, íðkaði*
Bjørg **íðkar** ítrótt.

**ígjøgnum**
Bólturin fór **ígjøgnum** rútin.

**íkorni** k
*íkorni, íkorna, íkornar*
**Íkornin** savnar sær nøtir til vetrarmat.

**ílat** h
*ílat, ílats, íløt*
Mamman setti **ílatið** á hillina.



**ímeðan**
**Ímeðan** Ása vaskaði sær, pyntaði omma seg.

**ímillum**
Mjóvanes er **ímillum** Gøtuvík og Lambavík.

**ímóti**
Eirikur rann **ímóti** abbanum.



Materiál chráněný autorskými právy

# Í

## íroknað
Tilfarið til bátin er **íroknað** prísin.

## ísbrótari k
*ísbrótari, ísbrótara, ísbrótarar*
**Ísbrótarin** hjálpti skipinum ígjøgnum ísin.



## Ísland
Í **Íslandi** eru gosfjøll og heitar keldur.

## íslendingur k
*íslendingur, íslendings, íslendingar*
Trummusláarin var **íslendingur**.

## íspegil k
*íspegil, íspegils, íspeglar*
Pætur er ein verrri **íspegil**, hann fær skemt burtur úr øllum.

## ísur k
*ísur, ís, ísar*
Øll børnini skreiddu á **ísinum**.

## ítastur l
*ítastur, ítast, ítast*
Sørin er **ítastur** at renna.

## ítriv h
*ítriv, ítrivs, ítriv*
Til **ítriv** spældu tey kort.

## ítróttastevna kv
*ítróttastevna, -stevnu, -stevnur*
Á sumri eru nógvar **ítróttastevnur** í Føroyum.

## ítrótt kv
*ítrótt, ítróttar, ítróttir*
Tey íðka **ítrótt** tveir tímar um vikuna.



Materiál chráněný autorskými právy

**ja**
Børnini søgdu **ja** takk, tá ið tey vóru boðin í føðingardag.

**jagstra** s
*jagstra, jagstraði*
Sveinur **jagstraði** músina, til hon hvarv.



**jakki** k
*jakki, jakka, jakkar*
Gubbi fekk sær nýggjan **jakka** til ólavsøku.

**januar**
25. **januar** er pálsmessa.

**jarða** s
*jarða, jarðaði*
Tey **jarðaðu** hundin í garðinum.

**jarðarbrúk** h
*jarðarbrúk, -brúks, -brúk*
Fyrr var **jarðarbrúk** einasti vinnuvegur okkara.

**jarðarferð** kv
*jarðarferð, -ferðar, -ferðir*
Nógv fólk var til **jarðarferðina** hjá langabba.



**jarðber** h
*jarðber, -bers, -ber*
Okkum dámar væl **jarðberja-**greyt.

**jarðskjálvti** k
*jarðskjálvti, -skjálvta, -skjálvtar*
**Jarðskjálvtar** krevja ofta nógv mannalív.

**jarma** s
*jarma, jarmaði*
Seyðurin **jarmar** á bønum.

**jarn** h
*jarn, jarns, jørn*
Teir leggja **jarn**tak á húsini.

**jarnbreyt** kv
*jarnbreyt, -breytar, -breytir*
Tok koyra á **jarnbreyt.**


Materiál chráněný autorskými právy

# J

**jarnbrot** h
*jarnbrot, -brots, -brot*
Teir nýttu **jarnbrot** at fáa steinin leysan.



**jass**
Heina dámar væl **jass**tónleik.

**jassur** k
*jassur, jass, jassar*
Teir eru nakrir verri **jassar** at gera ónáðir.

**javnaldri** k
*javnaldri, -aldra, -aldrar*
Niklas og Kári eru **javnaldrar**, teir eru 12 ára gamlir.

**javngamal** l
*javngamal, -gomul, -gamalt*
Hans er **javngamal** við Trinu.

**javnvág** kv
*javnvág, -vágar, – flt*
Karl misti **javnvágina** og datt niður av garðinum.

**játta** s
*játta, játtaði*
Peri varð **játtað** eitt lærupláss í smiðjuni.

**jettflogfar** h
*jettflogfar, -fars, -før*
**Jettflogfør** flúgva skjótt.



**jogurt** kv
*jogurt, jogurtar, – flt*
**Jogurt** er eitt slag av súrari mjólk.

**jolla** kv
*jolla, jollu, jollur*
Teir fóru út á skipið í eini lítlari **jollu**.

**jóansøka** kv
24. juni er **jóansøka**.



**jól** h flt
**Jólini** gleða vit okkum øll til.

**jólaaftan** k
*jólaaftan, -aftans, -aftanar*
**Jólaaftan** dansa vit um jólatræ.

**jóladagur** k
*jóladagur, -dags, -dagar*
Jesus var føddur **jóladag**.

**jótra** s
*jótra, jótraði*
Kúgvin liggur og **jótrar** á bønum.

**juni**
Longsti dagur er 21. **juni**.

**juli**
29. **juli** er ólavsøka.



Materiál chráněný autorskými právy

## **júgur** h

*júgur, júgurs, júgur*
**Júgrið** á kúnni er fult av mjólk.

## **júst**

Hann kom innum **júst**, tá ið klokkan sló 5.

## **jødi** k

*jødi, jøda, jødar*
Nógvir **jødar** búgva í Ísrael.

## **jøkul** k

*hjøkul, jøkuls, jøklar*
Í Íslandi eru **jøklar**.

## **jørð** kv

*jørð, jarðar, jarðir*
**Jørðin** er rund.
Bóndin eigur nógva **jørð**.


Materiál chráněný autorskými právy

# K

**kaðal** k
*kaðal, kaðals, kaðlar*
Telefon**kaðal** liggur millum londini.

**kaffi** h
*kaffi, kaffis, – flt*
Omma drekkur **kaffi** oman á døgurðan.



**kaffistova** kv
*kaffistova, -stovu, -stovur*
Arbeiðsmenninir hittast hvønn morgun á **kaffistovuni**.

**kaga** s
*kaga, kagaði*
**Kaga** upp í himmalin.

**kajakk** kv
*kajakk, kajakkar, kajakkir*
Grønlendingar eru kringir at rógva í **kajakk**.



**kakao** h
*kakao, kakaos, – flt*
Heitt **kakao** er gott at fáa.

**kaldur** l
*kaldur, køld, kalt*
**Kalt** er í veðrinum.

**kalendari** **sí álmanakki**

**kalla** s
*kalla, kallaði*
Tey **kallaðu** sonin upp eftir abbanum.

**kalvi** k
*kalvi, kalva, kalvar*
Fleiri bátar eru við **kalva**línu.

**kamar** h
*kamar, kamars, kømur*
**Kømrini** eru bæði stór og ljós.



**kambur** k
*kambur, kambs, kambar*
Hann hevur altíð **kamb** í lummanum.
Drúgt er at ganga niðan á **Kamb**.

**kamelur** k
*kamelur, kamels, kamelar*
**Kamelar** eru í Afrika.

**kanel** h
*kanel, kanels, – flt*
Eiriki dámar væl greyt við **kanel**sukri omaná.

**kanin** kv
*kanin, kaninar, kaninir*
Hergerð eigur tvær hvítar **kaninir**.

**kanón** kv
*kanón, kanónar, kanónir*
**Kanónin** á hvalabátinum stendur frammi á bakkanum.



**kanska**
Petra fer **kanska** at koma til jóla.

**kantur** k
*kantur, kants, kantar*
Hann sló seg í **kantin** á borðinum.

**kapell** h
*kapell, kapels, kapell*
Jarðarferðin var úr **kapellinum**.

**kappast** s
*kappast, kappaðist*
Børnini **kappaðust** um at verða fyrst liðug.

**kappi** k
*kappi, kappa, kappar*
Nólsoyar Páll var ein rættur **kappi** á sjónum.

**karamella** kv
*karamella, karamellu, karamellur*
Børnini fingu **karamellu** frá Hálvdani.

**karða** l
*karða, karðaði*
Tey lærdu seg at **karða**.

**kærleiki** ⇨

**kaskett** kv
*kaskett, kaskettar, kaskettir*
Politimaðurin hevur **kaskett** á høvdinum.



**kasta** s
*kasta, kastaði*
Trolarin **kastaði** fyrstu ferð í gjár.
Dreingirnir **kastaðu** til máls við kavabløkum.

**kava** s
*kava, kavaði*
Grindin **kavaði** og hvarv.
Tað **kavaði** í morgun, so nú er gott at skreiða.



Materiál chráněný autorskými právy

K

**kavamaður** k

*kavamaður, -mans, -menn*

Hallgerð gjørdi sær ein stóran **kavamann** í garðinum.



**kavari** k

*kavari, kavara, kavarar*

Fleiri **kavarar** royndu at fáa skipið upp aftur.

**kavi** k

*kavi, kava, kavar*

**Kavin** liggur heilt oman í mølina.

**kálka** s

*kálka, kálkaði*

Petur **kálkar** grundina.

**kálvur** k

*kálvur, kálvs, kálvar*

**Kálvurin** stendur tjóðraður á bønum.

**kátur** l

*kátur, kát, kátt*

Lombini spæla so **kát**.

**keddur** l

*keddur, kedd, kett*

Hon var **kedd** um úrslitið.

**keðiligur** l

*keðiligur, -lig, -ligt*

Hann helt, at bókin var **keðilig** at lesa.

**keikja** s

*keikja, keikir, kokti, koktu, kokt*

Sigmar **kokti** fótin í fótbóltsdystinum.

**keipur** kv flt

Herborg ger **keipur** framman fyri speglinum.

**keisari** k

*keisari, keisara, keisarar*

Napoleon Bonaparte var **keisari** í Fraklandi.

**kekkur** k

*kekkur, keks, kekkar*

Pápi rindar alt við **kekki**.



**keks** kv

*keks, keksar, keksir*

Tey fáa **keks** aftur við drekkamunninum.

**kelda** kv

*kelda, keldu, keldur*

Tey løgdust øll at drekka úr **kelduni**, tí tey vóru so tyst.

**kelling** kv

*kelling, kellingar, kellingar*

Risin og **kellingin** ætlaðu at draga Føroyar til Íslands.

**kemba** s

*kemba, kembir, kembdi*

Ásla **kembir** vinkonu síni.



Materiál chráněný autorskými právy

**kemi** **sí evnafrøði**

**kenna** s
*kenna, kennir, kendi*
Jákup Sibbi **kendi** ikki S fyri K.

**kensla** kv
*kensla, kenslu, kenslur*
**Kenslan** fyri heimlandinum er ofta sterkast, tá ið tú ert burturstaddur.

**keta** kv
*keta, ketu, ketur*
Hjartað hekk í eini **ketu** um hálsin.

**ketil** k
*ketil, ketils, ketlar*
Beinanvegin vit komu, setti fastir **ketilin** útá.



**ketsjari** k
*ketsjari, ketsjara, ketsjarar*
Súni fekk nýggjan **ketsjara** frá gubba sínum.

**ketta** kv
*ketta, kettu, kettur*
**Kettan** hjá okkum er snjóhvít.

**kettlingur** k
*kettlingur, kettlings, kettlingar*
Kettan legði fimm **kettlingar**.

**kettueyga** h
*kettueyga, -eyga, -eygu*
**Kettueygu** skulu vera á súkkluni.

**keypa** s
*keypa, keypir, keypti*
Petur fer at **keypa** fyri mammu.

**keypsamtøka** kv
*keypsamtøka, -samtøku, -samtøkur*
**Keypsamtøka** er í fleiri bygdum.

**keypsprísur** k
*keypsprísur, -prís, -prísir*
**Keypsprísurin** liggur um 100 krónur.

**kyka** ⇨

**kikari** k
*kikari, kikara, kikarar*
Seyðamaðurin gongur við **kikara** um herðarnar.



**kikhosti** k
*kikhosti, -hosta, – flt*
Beiggi liggur við **kikhosta**.

**kikka** s
*kikka, kikkaði*
Hálvdan **kikkaði** eftir ondini.

**kykna** ⇨


Materiál chráněný autorskými právy

# K

**kykt** ⇨

**kilo** h
**Kilo** merkir túsund.

**kimiligur** l
*kimiligur, kimilig, kimiligt*
Hóast abbi er gamal, er hann **kimiligur**.

**kynda** ⇨

**kyndil** ⇨

**kyndilsmessa** ⇨

**kinn** kv
*kinn, kinnar, kinnar*
**Kinnar** hennara vóru reyðar.

**kiosk** kv
*kiosk, kioskar, kioskir*
**Kioskir** selja bløð og góðgæti.

**kippa** s
*kippa, kippir, kipti*
Líggjas **kipti** lundan.

**kirkja** kv
*kirkja, kirkju, kirkjur*
**Kirkja** er í flestu bygdum.



**kyrrindi** ⇨

**kirsuber** h
*kirsuber, -bers, -ber*
**Kirsuberja**sós smakkar væl.

**kyrtil** ⇨

**kyssa** ⇨

**kista** kv
*kista, kistu, kistur*
Ringurin hjá Sigmundi varð funnin í eini **kistu** hjá Torgrími.



**kistil** k
*kistil, kistils, kistlar*
Ása og Óli eiga hvør sín spari**kistil**.

**kitla** s
*kitla, kitlaði*
Tað er ringt at verða **kitlaður** undir ilina.

**kýli** ⇨

**kína** s
*kína, kínir, kíndi*
Omma **kíndi** mær um ennið.

**kísta** s
*kísta, kístaði*
Abbi **kístaði** hønurnar burtur.





Materiál chráněný autorskými právy

**kjaftur** k

*kjaftur, kjafts, kjaftar*
Hundur hevur **kjaft**.
Hann fylti posan í **kjaft**.

**kjakast** s

*kjakast, kjakaðist*
Næmingarnir **kjakaðust** um frálæruna.

**kjallari** k

*kjallari, kjallara, kjallarar*
Í **kjallaranum** stóð súkklan.

**kjarni** k



*kjarni, kjarna, kjarnar*
Innast í súreplinum eru nógvir **kjarnar**.

**kjálki** k

*kjálki, kjálka, kjálkar*
Hann skar **kjálkan** frá geilatíkini.

**kjóli** k



*kjóli, kjóla, kjólar*
**Kjólin** hjá Sunnrið var sera vakur.

**kjølur** k

*kjølur, kjalar, kjølir*
**Kjølurin** er úr eik.

**kjøt** h

*kjøt, kjøts, – flt*
Okkum dámar stak væl skerpi**kjøt**.

**kladda** kv

*kladda, kladdu, kladdur*
Tórunn hevur tvær **kladdu**bøkur í taskuni.

**klædnaskáp** ⇨

**klædningur** ⇨

**klæði** ⇨

**klaga** s

*klaga, klagaði*
Hann **klagaði** dreingin fyri stuldur.

**klamsa** s

*klamsa, klamsaði*
Sjúrður **klamsaði** hurðina aftur.

**klænur** ⇨

**klappa** s

*klappa, klappaði*
Øll **klappaðu** fyri røðaranum.

**klaver** h

*klaver, klavers, klaver*
Jóannes dugir væl at spæla **klaver**.

**kláa**

*kláa, kláaði*
Mostir **kláaði** sær aftan fyri oyrað.


Materiál chráněný autorskými právy

**klettur** k



*klettur, klets, klettar*
Sagt varð, at **kletturin** var íbygdur.

**kleystur** h
*kleystur, kleysturs, kleystur*
Eitt nunnu**kleystur** er í Havn.

**kleyvari** k
*kleyvari, kleyvara, kleyvarar*
Sjúrður meldaði fimm í **kleyvara**.

**klintra** s



*klintra, klintraði*
Dreingirnir **klintra** í homrunum.

**klippa** s
*klippa, klippir, klipti*
Helgi hevur verið og **klipt** sær.

**klippfiskur** k
*klippfiskur, -fisks, -fiskar*
**Klippfiskur** er turkaður saltfiskur.

**klips** h
*klips, klips, klips*
Ørkini vórðu heft saman við **klipsum**.

**klistra** s
*klistra, klistraði*
Heri **klistrar** myndir í bókina.

**klíggja** l
*klíggja, klíggjaði*
Systir **klíggjaði** og vildi spýggja.

**klíva** s
*klíva, klívur, kleiv, klivu, klivið*
Børnum dámar væl at **klíva** í homrunum.

**kloakk** kv
*kloakk, kloaks, kloakkir*
**Kloakkin** varð løgd langt út á sjógv.

**klokka** kv



*klokka, klokku, klokkur*
**Klokkan** hongur á bróstinum.

**klostur** **sí kleystur**

**klovnur** k



*klovnur, klovns, klovnar*
**Klovnurin** er stuttligur at síggja.

**klógv** kv
*klógv, klóar, kløur*
Ørnin tók lambið í **kløurnar** og fleyg avstað.

**klókur** l
*klókur, klók, klókt*
Hundur er eitt **klókt** dýr.



Materiál chráněný autorskými právy

**klóra** s
*klóra, klóraði*
Kettan **klóraði** Armgarð í armin.

**klukka** kv
*klukka, klukku, klukkur*
Ein svarta**klukka** rennur á gólvinum.

**klúgva** s
*klúgva, klývur, kleyv, kluvu, klovið*
Hann **kleyv** stabban við einum høggi.

**klúkur** k
*klúkur, klúks, klúkar*
Grasið liggur alt í **klúki** á bønum.

**klútur** k
*klútur, klúts, klútar*
**Klúturin** liggur á borðinum.

**klædnaskáp** h
*klædnaskáp, -skáps, -skáp*
Frakkin hongur í **klædnaskápinum**.



**klædningur** k
*klædningur, klædnings, klædningar*
Oskar fekk nýggjan **klædning** til ólavsøku.

**klæði** h
*klæði, klæðis, klæði*
Pápi legði **klæði** út yvir alt innbúgvið, tá ið hann málaði stovuna.

**klænur** l
*klænur, kløn, klænt*
Øssur er so **klænur**.

**kløkkur** l
*kløkkur, kløkk, kløkt*
Árant gjørdist **kløkkur**, tá ið hurðin brast upp.

**knæ** ⇨

**knappliga**
Glasið er **knappliga** fult.

**knarvakot** h
*knarvakot, -kots, -kot*
Gott er at eiga **knarvakot**, tá ið kalt er.



**knasa** s
*knasa, knasaði*
Hvalurin **knasaði** bátin við sveivini.

**knáur** l
*knáur, kná, knátt*
Føroyska rossið var lítið og **knátt**.



Materiál chráněný autorskými právy

**kneppi** h
*kneppi, kneppis, kneppi*
Abbin tók Bárð upp í **kneppið**.

**knetti** h
*knetti, knettis, knetti*
Álvur gjørdi **knetti** úr fiskinum, teir høvdu fingið.

**knívur** k
*knívur, knívs, knívar*
Hann stakk **knívin** í slíðrarnar, tá ið teir høvdu skorið upp.

**knoða** s
*knoða, knoðaði*
Omma mín **knoðar** drýl.

**knokkur** k
*knokkur, knoks, knokkar*
Tann gamli er ein serur **knokkur**.
Hann rendi **knokkin** í bitan.

**knúgvi** k
*knúgvi, knúgva, knúgvar*
Hann sló **knúgvarnar** í borðið.

**knýti** h
*knýti, knýtis, knýti*
Hann hevði viðførið í einum **knýti** á bakinum.

**knæ** h
*knæ, knæs, knø*
Áki hevur sár á **knænum**.

**koddi** k
*koddi, kodda, koddar*
Sára sovnaði straks, hon legði høvdið á **koddan**.

**kollur** k
*kollur, kols, kollar*
Tóra legði **koll** í sátuna.
Pápi hevði nýggjan **koll** á høvdinum.
Uni feyk um **koll** í vindinum.

**kollvelta** s
*kollvelta, -veltir, -velti*
Jón **kollvelti** allar ætlanirnar, tá ið hann kom aftur.

**kolsvartur** l
*kolsvartur, -svørt, -svart*
**Kolsvartur** roykur stendur upp úr skorsteininum.

**koma** s
*koma, kemur, kom, komu, komið*
Abbi og omma **koma** við Smyrli í dag.

**kombikk** h
*kombikk, kombiks, kombikk*
Børnini høvdu **kombikk** í glasi.



Materiál chráněný autorskými právy

**komfýrur** k



*komfýrur, komfýrs, komfýrar*
**Komfýrurin** er nýggjur.

**kommuna** kv
*kommuna, kommunu, kommunur*
Havnar **kommuna** er tann størsta í Føroyum.

**kompressari** k
*kompressari, kompressara, kompressarar*
Ein **kompressari** stendur og larmar í túninum.

**konfirmatión** kv
*konfirmatión, konfirmatións, konfirmatiónir*
**Konfirmatión** er um várið og um heystið.

**kongur** k
*kongur, kongs, kongar*
Sverri **kongur** var føddur í Føroyum.

**konufólk** h
*konufólk, -fólks, -fólk*
Nógv **konufólk** standa á bryggjuni.

**korn** h
*korn, korns, korn*
Fyrr veltu tey **korn** í Føroyum.

**kort** h



*kort, korts, kort*
Eitt veraldar**kort** hongur í stovuni.
Tey spæla **kort** hvørt kvøld.

**kortini**
Pauli kemur **kortini** ikki fyrr enn í morgin.

**kot** h
*kot, kots, kot*
Fleiri gamlir menn ganga í **koti**.

**koyggja** kv



*koyggja, koyggju, koyggjur*
Umborð á skipi eru **koyggjur**.

**koyra** s
*koyra, koyrir, koyrdi*
Sveinur **koyrir** í skúla í bussi.

**koyril** k
*koyril, koyrils, koyrlar*
Onkuntíð sæst onkur nýta **koyril**, tá ið hann ríður kapp.

**kódna** s
*kódna, kódnaði*
Hann mundi **kódnað** í royki.

**kór** h
*kór, kórs, kór*
**Kórið** sang skúlanum.
Prestur stendur inni í **kóri**.


Materiál chráněný autorskými právy

**kragi** k
*kragi, kraga, kragar*
Prestur hevur hvítan **kraga**.

**krakkur** k
*krakkur, kraks, krakkar*
Turið situr á einum **krakki**.
Genturnar brendu **krakk** eftir Jákupi á Møn.



**krækjlingur** ⇨

**krambúð** kv
*krambúð, -búðar, -búðir*
**Krambúðin** er ikki opin sunnudag.

**krani** k
*krani, krana, kranar*
**Kranin** lyftir fleiri tons.
**Kranin** í køkinum lekur.



**kransur** k
*kransur, krans, kransar*
Nógvir **kransar** liggja á grøvini.

**krapi** k
*krapi, krapa, – flt*
Tað er ringt at ganga í **krapa**.

**kræsin** ⇨

**krem** h
*krem, krems, – flt*
Sigvør smyr **krem** upp á andlitið.

**krevja** s
*krevja, krevur, kravdi, kravdu, kravt*
Hon hevur **kravt** at fáa svar í dag.

**kringseta** s
*kringseta, -setir, -setti*
Fíggindin **kringsetti** býin.

**kringur** l
*kringur, kring, kringt*
Ólavur var **kringur** í mállæru.

**kristin** l
*kristin, kristin, kristið*
Føroyingar gjørdust **kristnir** í árinum 1000.

**krit** h
*krit, krits, krit*
Tú skrivar á talvuna við **kriti**.

**kríatúr** h
*kríatúr, kríatúrs, kríatúr*
Í fjósinum stóðu nøkur **kríatúr**.

**kríggj** h
*kríggj, krígs, kríggj*
Seinna veraldar**kríggj** vardi í fimm ár.



**krím** h
*krím, kríms, krím*
Sólvá liggur í seingini við **krími**.



Materiál chráněný autorskými právy

**kroppur** k
*kroppur, krops, kroppar*
Hanna líkist mammuni upp á **kropp**.

**krossmessa** kv
**Krossmessa** er 3. mai.

**krossur** k
*krossur, kross, krossar*
Jesus doyði á **krossinum**.



**krógva** s
*krógva, krógvaði*
Børnini spæla **krógva** og blunda.

**króna** kv
*króna, krónu, krónur*
Dánjal eigur hundrað **krónur**.

**krúna** kv
*krúna, krúnu, krúnur*
Kongur hevur **krúnu** á høvdinum.

**kryvja** s
*kryvja, kryvur, kruvdi*
Tey **kryvja** seiðin í kjallaranum.

**kræklingur** k
*kræklingur, kræklings, kræklingar*
Knútur hevur **krækling** til agn.

**kræsin** l
*kræsin, kræsin, kræsið*
Dánjal var so **kræsin**. Hann át ikki lagkøku.

**krøkja** s
*krøkja, krøkir, krøkti*
Janus **krøkti** sjálvur seiðin av.

**krøktur** l
*krøktur, krøkt, krøkt*
At vera **krøktur** = ongul í reyv = einki at fáa.

**kubbi** k
*kubbi, kubba, kubbar*
Hann sagaði ein **kubba** av bjálkanum.

**kuldi** k
*kuldi, kulda, kuldar*
Hann hevur ligið við **kulda** í fleiri vikur.

**kunna** s
*kunna, kann, kundi*
Hann hevur ongantíð **kunnað** torgað mjørka.

**kumpass** kv
*kumpass, kumpassar, kumpassir*
Hann hevði **kumpass** við, tá ið hann var á floti.




Troyggjan hjá Onnu er eisini vøkur á **ranguni**.



**rapa** s
*rapa, rapaði*
Korthúsið **rapaði**, tí at gjósturin tók tað.



Materiál chráněný autorskými právy

**ræsa** ⇨

**raskur** l
*raskur, røsk, raskt*
Gunnvør er **røsk** at svimja.

**ræstur** ⇨

**rætt** ⇨

**rætta** ⇨

**rættiliga** ⇨

**rættur** ⇨

**rá** kv
*rá, ráar, ráir*
Seglið hongur í **ránni**.

**ráð** h
*ráð, ráðs, ráð*
Eg spurdi mammu til **ráðs**, tá ið hundahvølpurin skuldi hava navn.
Súkklan er so dýr, at eg havi ikki **ráð** at keypa mær hana.

**ráða** s
*ráða, ræður, ráddi, ráddu, rátt*
Tað **ræður** um at vera væl ílatin.

**rán** h
*rán, ráns, rán*
Ránsmaðurin stjól í bankanum, tað er **rán**.

**rás** kv
*rás, rásar, rásir/ræsur*
Seyðurin gongur á **rásini**.



**ráur** l
*ráur, rá, rátt*
**Ráa** kjøtið var reytt.

**regla** kv
*regla, reglu, reglur*
Á síðuni vóru 13 **reglur**.

**regn** h
*regn, regns, – flt*
**Regnið** stoytir niður.



**regna** s
*regna, regnaði*
Nú **regnar**.

**reiðiligur** l
*reiðiligur, reiðilig, reiðiligt*
Jógvan kanst tú líta á, tí hann er **reiðiligur**.

**reiður** h
*reiður, reiðurs, reiður*
Eg veit eitt **reiður** við trimum eggjum.



**reiggja** s
*reiggja, reiggjaði*
Pæturi dámdi væl at **reiggja**.





Materiál chráněný autorskými právy

**reinur** l
*reinur, rein, reint*
Klæðini liggja **rein** í skápinum.

**reip** h
*reip, reips, reip*
Abbi ber **reipið** á økslini.

**reipslongd** kv
*reipslongd, -longdar, -longdir*
**Reipslongd** er o.u. 8 favnar.

**reisa** s
*reisa, reisir, reisti*
Húsini vórðu **reist** í gjár.



**reka** s
*reka, rekur, rak, róku, rikið*
Grindin varð **rikin** inn á Miðvág.

**rekavætti** h
*rekavætti, -vættis, -vætti*
Uppsala-Pætur var eitt **rekavætti**.

**reki** k
*reki, reka, rekar*
Klávus leitar eftir **reka** í fjøruni.

**rekja** s
*rekja, rekir, rakti*
Mamma bant troyggjuna ov lítla og mátti tí **rekja** hana upp aftur.

**reksa** s
*reksa, reksaði*
Elsa **reksaði** mangan upp: eitt heitt feitt nýbakað byggbreyð.

**renna** s
*renna, rennur, rann, runnu, runnið*
Vit kunnu øll at **renna** dyst.

**revsa** s
*revsa, revsaði*
Liðið varð revsað við **brotssparki**.

**reydlingar** k flt
Eyðálvur var heima, tí hann hevði **reydlingar**.

**reyðfiskur** k
*reyðfiskur, -fisks, -fiskar*
Tey fáa nógvan **reyðfisk** fram við landi.

**reyðsprøka** kv
*reyðsprøka, -sprøku, -sprøkur*
Vit fingu steikta **reyðsprøku** til døgurða.

**reyður** l
*reyður, reyð, reytt*
Troyggjan er **reyð** við bláum mynstri.



Materiál chráněný autorskými právy

**reystmenni** h
*reystmenni, -mennis, -menni*
Sigmundur Brestisson var eitt **reystmenni**.

**riddari** k

*riddari, riddara, riddarar*
Jóhan skákaði við **riddaranum**.

**ryggur** ⇨

**rykkja** ⇨

**riklingur** k
*riklingur, riklings, riklingar*
**Riklingur** er kalvi, skorin í álir og turkaður.

**ringja** s
*ringja, ringir, ringdi*
Katrin **ringdi** seg saman av pínu.
Tá ið klokkan **ringir**, er fríkorterið liðugt.

**ringur** k
*ringur, rings, ringar*
Olga hevur **ringar** í oyrunum.

**ringur** l
*ringur, ring, ringt*
Hetta var ein **ringur** dagur.

**ripa** s
*ripa, ripaði*
Tummas var illur og **ripaði** taskuna í ein krók.

**ryssa** ⇨

**rista** s
*rista, ristir, risti*
Tóra **ristir** koddan.

**rithøvundur** k
*rithøvundur, -høvunds, -høvundar*
William Heinesen er kendur **rithøvundur**.

**ríða** s

*ríða, ríður, reið, riðu, riðið*
Tummas **ríður** kapp á hvørjari ólavsøku.

**ríkur** l
*ríkur, rík, ríkt*
Abbi tín er **ríkur**.

**ríma** kv
*ríma, rímaði*
Børnini **rímaðu** rímur.

**rýma** ⇨

**rína** s
*rína, rínur, rein, rinu, rinið*
Tó at tað regnaði illa, **rein** tað ikki við hann.


Materiál chráněný autorskými právy

R

**rísa** s
*rísa, rísur, reis, risu, risin*
Sólin **rísur** í eystri.

**ríva** kv
*ríva, rívu, rívur*
**Rívurnar** liggja eftir úti á bønum.

**ríva** s
*ríva, rívur, reiv, rivu, rivið*
Tey **rivu** gularøtur til salat.

**rívutindur** k
*rívutindur, -tinds, -tindar*
Abbi telgir ein **rívutind** í rívuna hjá Jákupi.

**rjóta** s
*rjóta, rýtur, reyt, rutu, rotið*
Mamma og pápi **rutu** hart, meðan tey svóvu.

**rodna** s
*rodna, rodnaði*
Gentan **rodnaði**, tá ið drongurin hugdi upp á hana.



**roð** h
*roð, roðs, roð*
**Roð** verður nýtt til rotuskógvar.

**roðsla** kv
*roðsla, roðslu, roðslur*
**Roðslan** verjir fiskin.

**rogn** h
*rogn, rogns, rogn*
Toskur hevur **rogn** um várið.

**rokna** s
*rokna, roknaði*
Børnini læra at **rokna** í skúlanum.

**rommum**
Hann lá fram eftir **rommum** og las.



**rong** kv
*rong, rangar, rengur*
Hanus sat afturi í **rong** og stýrdi bátinum. Hallur sat frammi í **rong**.

**ropa** s
*ropa, ropaði*
Tað er ikki fólkaligt at sita og **ropa** við borðið.

**ross** h
*ross, ross, ross*
Jákup eigur trý **ross**, tveir hestar og eina ryssu.



**rotin** l
*rotin, rotin, rotið*
**Rotin** egg lukta illa.

**rotta** kv
*rotta, rottu, rottur*
**Rottan** er eitt skaðadjór.





Materiál chráněný autorskými právy

**roykja** s
*roykja, roykir, roykti*
Tað er ringt fyri heilsuna at **roykja**.

**roykur** k
*roykur royks, – flt*
Tá ið bál verður kynt, er ofta nógvur **roykur**.

**royna** s
*royna, roynir, royndi*
Hallgrímur **roynir** at rokna heima hvønn dag.

**roynd** kv
*roynd, royndar, royndir*
Teir gjørdu eina **roynd** at fiska svartkjaft.

**royndur** l
*royndur, roynd, roynt*
Dómarin er **royndur**, tí hann hevur dømt nógvar dystir.

**roysni** h
*roysni, roysnis, roysni*
Tað var eitt **roysni** at bjarga manningini.

**royta** s
*royta, roytir, roytti*
Mamman lærdi børnini at **royta** fugl.

**rógva** s
*rógva, rør, róði, róðu, róð*
Hans **rør** um fjørðin næstan hvønn dag.

**rókur** k

*rókur, róks, rókar*
**Rókur** er ein fuglur.
Eitt av talvfólkunum eitur **rókur**.

**rómastampur** k
*rómastampur, -stamps, -stampar*
**Rómastampur** er samanlopin mjólk.

**rómi** k

*rómi, róma, – flt*
Pætur nýtir **róma** út í kaffi.

**rópa** s
*rópa, rópaði/rópti*
Mamman **rópti** eftir Anju og Halli, tí tey skuldu eta døgurða.

**rósa** kv

*rósa, rósu, rósur*
**Rósa** er ein vøkur blóma.

**rósa** s
*rósa, rósti*
Lærarin **rósar** børnunum fyri sjónleikin.


Materiál chráněný autorskými právy

**rót** kv
*rót, rótar, røtur*
Tað finnast nógv ymisk sløg av **rótum**.

**ruðuleiki** k
*ruðeiki, ruðuleika, – flt*
Tað var ein **ruðuleiki**, tá ið 10. flokkur tveitti karamellur til tey yngru børnini.

**rugbreyð** h
*rugbreyð, -breyðs, -breyð*
Vit eta **rugbreyð** hvønn dag.



**rumpa** kv
*rumpa, rumpu, rumpur*
Sólvá datt á **rumpuna** í kavanum.

**run** h
*run, runs, – flt*
Tað er **run** í sjónum, og tí er ikki lendandi.

**runa** kv
*runa, runu, – flt*
Børnini smurdu **runu** upp á veggin.

**rundur** l
*rundur, rund, runt*
Bólturin er **rundur**.



**runnur** k
*runnur, runs, runnar*
Í urtagarðinum eru nakrir smáir **runnar**.

**rusk** h
*rusk, rusks, rusk*
Náttúran verður undirdíkt við øllum møguligum **ruski**.
Gunnar fekk **rusk** í eygað.

**rúgva** kv
*rúgva, rúgvu, rúgvur*
Børnini spæla í hoy**rúgvuni**.

**rúka** kv
*rúka, rýkur, reyk, ruku, rokin*
Her **rýkur** av kristnamanna-blóði, segði risin.

**rúm** h
*rúm, rúms, rúm*
**Rúmið** var stórt og gott at spæla í.

**rúmdarmaður** k
*rúmdarmaður, -mans, -menn*
**Rúmdarmenninir** vóru eina viku úti í rúmdini.



**rútari** k
*rútari, rútara, rútarar*
Rútari er ein av litunum í kortspæli.

**rútur** k
*rútur, rúts, rútar/rútir*
Janus breyt **rútin** í úthurðini av óvart.





Materiál chráněný autorskými právy

**ryggur** k
*ryggur, ryggjar/rygs, ryggir*
Júst hevur sterkan **rygg**.

**rykkja** s
*rykkja, rykkir, rykti*
Pól **rykti** blýantin úr hondini á Ásu.

**ryssa** kv

*ryssa, ryssu, ryssur*
**Ryssan** gongur í haganum við einum fyli.

**rýma** s
*rýma, rýmir, rýmdi*
Burtur úr túninum hundurin **rýmir**.

**ræddur** l
*ræddur, rædd/rødd, rætt*
Jóhanna er **rødd** í myrkri.

**ræða** s
*ræða, ræðir, ræddi*
Grýlurnar **ræddu** tey smáu børnini.

**ræðsla** kv
*ræðsla, ræðslu, – flt*
Gisli rópti av **ræðslu**, tá ið hann hoyrdi toruna.

**ræðuligur** l
*ræðuligur, -lig, -ligt*
Filmurin var **ræðuligur** at síggja.

**rækja** kv

*rækja, rækju, rækjur*
Nógvir trolarar veiða **rækjur.**

**ræna** s
*ræna, rænir, rændi*
Í Skúvoy **ræna** teir bjørgini.

**ræsa** s
*ræsa, ræsir, ræsti*
Sveinur heingir fisk upp at **ræsa**.

**ræstur** l
*ræstur, røst, ræst*
**Ræstur** fiskur smakkar væl.

**rætt** kv
*rætt, rættar, rættir*
Seyðurin verður rikin í **rætt**.

**rætta** s
*rætta, rættaði*
Páll **rættar** stílarnar hjá næmingunum.

**rættiliga**
Heri er ikki **rættiliga** frískur enn.

**rættur** l
*rættur, røtt, rætt*
Andras er ein **rættur** kollfirðingur.


Materiál chráněný autorskými právy

**røða** kv

*røða, røðu, røður*

Á ólavsøku verður **røða** hildin á Tinghúsvøllinum.



**røkka** s

*røkka, røkkur, rakk, rukku, rokkið*

Árni **rakk** ikki upp á hillina eftir smákøkunum.

**røra** s

*røra, rørir, rørdi*

Fríða **rørdi** seg ikki, men stóð pinnastill.



Materiál chráněný autorskými právy

## S.E.V.
Vit fáa ravmagn frá **S.E.V.**

## saðil k
*saðil, saðils, saðlar*
Elsa tók **saðilin** av rossinum.

## sag kv
*sag, sagar, sagir*
Hann sagaði við **sagini**.

## sakna s
*sakna, saknaði*
Marjun **saknaði** mammu sína.

## saktans
Tú kanst **saktans**, tí tú hevur altíð okkurt at takast við.

## salt h
*salt, salts, sølt*
Skipini taka **salt**, áðrenn tey fara á saltfiskaveiði.

## salta s
*salta, saltaði*
Bjarni **saltaði** grindina.

## saltfiskur k
*saltfiskur, -fisks, -fiskar*
Vit flyta út nógvan **saltfisk**.

## saman
Barba og Malan sita **saman** í skúlanum.

## samband h
*samband, -bands, -bond*
Sam røkir **sambandið** um Vestmannasund.



## samdur l
*samdur, samd, samt*
Maðurin og konan vóru **samd** um, at nú skuldu tey fara at ferðast.

## samdøgur h
*samdøgur, -døgurs, -døgur*
Í einum **samdøgri** eru 24 tímar.

## sami
Tær sita og binda **sama** mynstur í vøttirnar.



Materiál chráněný autorskými právy

**samkoma** kv
*samkoma, -komu, -komur*
Foreldrini høvdu eina **samkomu**, tá ið tey høvdu verið gift í tíggju ár.

**samrøða** kv
*samrøða, -røðu, -røður*
Í útvarpinum er ofta **samrøða** við gomul fólk.

**samstundis**
Óluva og Annika komu **samstundis** á mál.

**samsýning** kv
*samsýning, -sýningar, -sýningar*
Erla fekk **samsýning** fyri arbeiðið.

**samtykkja** s
*samtykkja, -tykkir, -tykti*
Børnini **samtyktu** at halda veitslu.

**samvitska** kv
*samvitska, -vitsku, – flt*
Drongurin fekk ringa **samvitsku**, tá ið hann hevði tikið pengarnar.

**sandeyga** h
*sandeyga, -eyga, -eygu*
Fiskur stendur ofta í **sandeygum**.

**sandur** k
*sandur, sands, sandar*
Børnunum dámar væl at spæla á **sandinum**.

**sangur** k
*sangur, sangs, sangir*
Vit syngja ein **sang** í skúlanum hvønn dag.



**sær** ⇨

**særa** ⇨

**særdur** ⇨

**sætti** ⇨



**savn** h
*savn, savns, søvn*
Skúlin hevur stórt bóka**savn**.

**sáa** s
*sáa, sáaði/sáddi*
Blómufræið verður **sáað** í garðinum.

**sál** kv
*sál, sálar, sálir*
Ólavur sang við lív og **sál**.

**sálmur** k
*sálmur, sálms, sálmar*
Í kirkjuni verða **sálmar** sungnir.



Materiál chráněný autorskými právy

## **sápa** kv
*sápa, sápu, sápur*
Børnum dámar væl at blása **sápu**bløðrur.

## **sár** h
*sár, sárs, sár*
Ólavur hevur **sár** á knænum.

## **sáta** kv
*sáta, sátu, sátur*
Tey gera **sátur** á bønum.

## **seðil** m
*seðil, seðils, seðlar*
Øll børnini settu **seðlar** á bøkurnar.

## **seg**
Teitur datt á trappuni og meiddi **seg**.

## **segl** h
*segl, segls, segl*
Tórfinnur siglir ofta við **seglum**.

## **seglskip** h
*seglskip, -skips, -skip*
Eitt fremmant **seglskip** liggur á vágni.



## **seiður** k
*seiður, seiðs, seiðir*
Sólrun og Sjúrður hava ofta fiskað **seið**.

## **seinnapartur** k
*seinnapartur, -parts, -partar*
Dávur gongur í skúla **seinnapart** á degi.

## **seinni**
Eg havi ikki tíð at rudda nú, tað má bíða til **seinni**.

## **seinur** l
*seinur, sein, seint*
Øssur var ov **seinur** í skúla í morgun.

## **seks**
Janus hevur **seks** tenn.

## **sekstan**
**Sekstan** myndir eru í bókini.

## **seksti**
Tey vóru gift í **seksti** ár.

## **seksæringur** k
*seksæringur, seksærings, seksæringar*
Knútur og teir róðu út við **seksæringi**.

## **sekta** s
*sekta, sektaði*
Maðurin varð **sektaður** fyri at koyra ov skjótt.


Materiál chráněný autorskými právy

**sekund** h
*sekund, sekunds, sekund*
Í minuttinum eru 60 **sekund**.

**selja** s
*selja, selur, seldi*
Ketil mátti **selja** kúnna.

**sement** h
*sement, sements, – flt*
Tá ið vit stoypa hús, nýta vit **sement**, sand og vatn.



**semingsmaður** k
*semingsmaður, -mans, -menn*
Ein **semingsmaður** roynir at fáa partarnar at semjast.

**senda** kv
*senda, sendir, sent*
Tey **sendu** hvør øðrum jólakort.

**sentimetur (cm)** k
*sentimetur, -meturs, -metrar*
Linjuálin er tjúgu **sentimetrar** long.

**september**
29. **september** er mikkjalsmessa.

**serkønur** l
*serkønur, -køn, -kønt*
Læknin er **serkønur** í barnasjúkum.

**serutt** kv
*serutt, seruttar, seruttir*
Páll roykir ofta **serutt**.



**seta** s
*seta, setur/setir, setti, settu, sett*
Malan **setur** døgurðan á borðið.

**setepli** h
*setepli, -eplis, -epli*
Grímur keypti ein posa av **seteplum**.

**sethús** h flt
**Sethúsini** vórðu bygd yvir av handlinum.



**sev** h
*sev, sevs, sev*
Nógv **sev** veksur niðri við tjørnina.

**seyðamaður** k
*seyðamaður, -mans, -menn*
Ein **seyðamaður** røktar seyðin í haganum.

**seyður** k
*seyður, seyðar, seyðir*
**Seyðurin** gongur í haganum.



Materiál chráněný autorskými právy

**seyma** s
*seyma, seymaði*
Tú sparir nógvan pening, um tú **seymar** tíni klæði sjálv.



**seytjan**
Sunnuva er **seytjan** ár.

**siffur** h
*siffur, siffurs, siffur*
Tólv (12) hevur tvey **siffur.** Hundrað (100) hevur trý **siffur**.

**syfta** ⇨

**syftunsøka** ⇨

**siga** s
*siga, sigur, segði, søgdu, sagt*
Sigga **segði**, at hon fer til Sumbiar í summar.

**sigar** kv
*sigar, sigarar, sigarir*
Mass roykir ofta **sigar**.



**sigarett** kv
*sigarett, sigarettar, sigarettir*
Læknin bað hann gevast at roykja **sigarettir**.

**sigla** s
*sigla, siglir, sigldi*
Í ánni **siglir** skipið mítt.

**signa** s
*sina, signaði*
Omma **signaði** meg, tá ið hon legði meg at sova.

**sigur** k
*sigur, sigurs, sigrar*
Napoleon keisari vann nógvar **sigrar** á vígvøllum.

**sild** kv
*sild, sildar, sildir*
Ofta fæst nógv **sild** á føroysku fjørðunum.

**sylindari** ⇨

**silvur** h
*silvur, silvurs, – flt*
Liðið vann eitt **silvur**steyp.



**syndarligur** ⇨

**sindur** h
*sindur, sindurs, – flt*
Honum dámar ikki so væl lagkøku, so hann etur bara eitt **sindur**.

**syngja** ⇨

**sinni** h
*sinni, sinnis, sinni*
Tey argaðu hann, til **sinnið** kom í hann, og hann rýmdi. Heldur ikki á hesum **sinni** slapp hann við.


Materiál chráněný autorskými právy

**syrgja** ⇨

**sirkul** k
*sirkul, sirkuls, sirklar*
Erlendur teknar **sirklar** á talvuna.



**sirkus** h
*sirkus, sirkus, sirkus*
Jógvani dámdi best klovnin, tá ið hann var í **sirkusi**.

**sirma** s
*sirma, sirmaði*
Í morgun regnaði, men nú **sirmar**.

**sissa** s
*sissa, sissaði*
Jóannes **sissaði** dreingirnar báðar.

**systir** ⇨

**systkin** ⇨

**systkinabarn** ⇨

**sita** s
*sita, situr, sat, sótu, sitið*
Knútur **situr** við borðið og etur.

**sitrón** kv
*sitrón, sitrónar, sitrónir*
**Sitrónir** eru súrar.



**síða** kv
*síða, síðu, síður*
Nú eru vit á **síðu** 176.

**síðan**
Fyrst fór eg, **síðan** fór hann.
Tað hendi fyri langari tíð **síðan**.

**síðst**
**Síðst**, ið eg sá teg, vart tú ússaligur.

**síður** l
*síður, síð, sítt*
Ebba hevur **sítt** hár.

**síga** s
*síga, sígur, seig, sigu, sigið*
Maðurin **sígur** niður í bergið.



**síggja** s
*síggja, sær, sá, sóu, sæð*
Músin rann avstað, tá ið hon **sá** kettuna.

**síl** h
*síl, síls, síl*
Í ánni eru **síl** og maðkapirrur.

**sín**
Teir býttu peningin ímillum **sín**.

**sýn** ⇨



Materiál chráněný autorskými právy

## sínar
Eg tók mínar bøkur, og hann tók **sínar.**

## sýsla ⇨

## sýta ⇨

## sjafførur **sí bilførari**

## sjáldan
Fyrr var hon altíð og vitjaði meg, men nú kemur hon **sjáldan**.

## sjáldsamur l
*sjáldsamur, -som, -samt*
Janus og tey eiga ein **sjáldsaman** hund.

## sjálvandi
**Sjálvandi** skulu tey út at spæla.

## sjálvur
*sjálvur, sjálv, sjálvt*
Hon vil gera alt **sjálv**.

## sjey
Tær eru **sjey** gentur í flokkinum.

## sjeyti
Abbi fyllir **sjeyti**.

## sjokuláta kv
*sjokuláta, sjokulátu, – flt*
Vit fingu **sjokulátu**, tá ið mamma kom aftur.

## sjógvur k
*sjógvur, sjós, sjógvar*
Veðrið var vánaligt, og **sjógvur** breyt inn yvir bátin.

## sjón kv
*sjón, sjónar, sjónir*
Eygnalæknin segði, at **sjónin** var ikki í lagi.
Tað var so stuttligt, at eg gloymi ongantíð ta **sjónina**.

## sjónarringur k
*sjónarringur, -rings, -ringar*
**Sjónarringurin** er har, ið himmal og hav síggjast koma saman.

## sjónleikur k
*sjónleikur, -leiks, -leikir*
Børnini spældu **sjónleik** fyri foreldrunum.

## sjónvarp h
*sjónvarp, -varps, -vørp*
Hanus hyggur eftir barnaløtuni í **sjónvarpinum**.




Materiál chráněný autorskými právy

**sjórænari** k

*sjórænari, -rænara, -rænarar*
**Sjórænarar** rændu í Føroyum fyrr.

**sjóvarfall** h
*sjóvarfall, -fals, -føll*
Eitt **sjóvarfall** er tann tíð, umleið 6 tímar, ið streymurin rekur eystur (eystfall) ella vestur (vestfall).

**sjóvarmáli** k
*sjóvarmáli, -mála, – flt*
Genturnar spæla í **sjóvarmálanum**.

**sjóverkur** k
*sjóverkur, sjóverks, – flt*
Sámal er ringur av **sjóverki**.

**sjúka** kv
*sjúka, sjúku, sjúkur*
Heðin lá av krím**sjúku**.

**sjúklingur** k

*sjúklingur, sjúklings, sjúklingar*
**Sjúklingarnir** liggja á sjúkrahúsinum.

**sjúkrabilur** k
*sjúkrabilur, -bils, -bilar*
**Sjúkrabilurin** varð boðsendur, tá ið Símun fekk skaða.

**sjúkrahús** h
*sjúkrahús, -hús, -hús*
Marjun hevði brotið armin og varð flutt á **sjúkrahúsið**.

**sjúkur** l
*sjúkur, sjúk, sjúkt*
Hákun er **sjúkur** í rygginum.

**skaði** k
*skaði, skaða, skaðar*
Skipið sigldi á land og fekk stóran **skaða**.

**skaka** s
*skaka, skakaði*
Vanlukkan **skakaði** alla bygdina.

**skalla** s

*skalla, skallaði*
Jógvan **skallaði** bóltin í málið.

**skalli** k
*skalli, skalla, skallar*
Jákup datt og fekk hol á **skallan**.

**skamt**
**Skamt** frá húsunum rennur ein á.

**skansi** k
*skansi, skansa, skansar*
Teir bygdu **skansan**, so teir betur kundu verja seg fyri sjórænarum.



Materiál chráněný autorskými právy

**skapa**
*skapa, skapaði/skapti*
**Skapa** tær ikki.

**skarð** h
*skarð, skarðs, skørð*
Rossini fóru um **skarðið**.

**skarvur** k
*skarvur, skarvs, skarvar*
**Skarvur** er tunguleysur, tí hann dugdi ikki at tiga.

**skáldkoppar** k flt
Birita liggur við **skáldkoppum**.

**skáp** h
*skáp, skáps, skáp*
Vit heingja klæðini í **skápið**.

**skegg** h
*skegg, skegs, – flt*
Tróndur í Gøtu hevði reytt **skegg**.



**skeið** h
*skeið, skeiðs, skeið*
Pápi Gunnvá var á **skeiði** síðstu viku.

**skeið** kv
*skeið, skeiðar, skeiðir*
Bergur fær eina **skeið** av lýsi hvønn morgun.

**skeivur** l
*skeivur, skeiv, skeivt*
Øll roknistykkini vóru **skeiv**.

**skelda** s
*skelda, skeldaði*
Málmaðurin **skeldaði**, tí at teir ikki vardu.

**skelkur** k
*skelkur, skelks, skelkar*
Vár fekk **skelk**, tá ið hon sá vanlukkuna.

**skellilátur** k
*skellilátur, -láturs, -látrar*
Øll sótu í **skellilátri** og hugdu at sjónleikinum.



**skelva** s
*skelva, skelvur, skalv, skulvu, skolvið*
Børnini **skulvu** í kulda.

**sker** h
*sker, skers, sker*
Báturin sigldi á eitt **sker** og sakk.

**skera** s
*skera, sker, skar, skóru, skorið*
Omma **sker** mær ein kjøtbita.

**skerja** s
*skerja, skerjir, skerdi*
Leivur **skerdi** gásina.


Materiál chráněný autorskými právy

**skerpikjøt** h
*skerpikjøt, -kjøts, – flt*
Hera dámar væl **skerpikjøt**.

**skervur** k
*skevur, skervs, – flt*
**Skervur** lá í túninum.

**skifta** s
*skifta, skiftir, skifti*
Grindin varð **skift** til bygdina.
Tummas mátti heim at **skifta**,
tí hann var vátur.

**skyggja** s ⇨

**skikkiligur** l
*skikkiligur, -lig, -ligt*
Beinta er ein **skikkilig** genta.

**skil** h
*skil, skils, skil*
Óli hevur gott **skil** fyri
rokning.

**skylda** ⇨

**skyldfólk** ⇨

**skilja** s
*skilja, skilur/skilir, skildi/skilti*
Einar **skilir** eitt sindur av
enskum.

**skimast** s
*skimast, skimaðist*
Hann **skimaðist** rundan um
seg at vita, um nakar sá seg.

**skyn** ⇨

**skyna** ⇨

**skinn** h
*skinn, skins, skinn*
Petra hevur eitt seyða**skinn**
hangandi á vegginum.
Eitt **skinn** í grind er 50 kg av
tvøsti og 25 kg av spiki.

**skip** h
*skip, skips, skip*
**Skipið** sigldi inn á fjørðin.



**skipa** s
*skipa, skipaði*
Allur seyðurin varð **skipaður**
inn í bátin.
Høgni **skipar** Brestis kvæði.

**skipari** k
*skipari, skipara, skiparar*
Pápi Sáru er **skipari** á stórum
ferðamannaskipi.



**skitin** l
*skitin, skitin, skitið*
Menninir vóru **skitnir**, tá ið
teir vóru lidnir at stoypa.



Materiál chráněný autorskými právy

**skittur** k
*skittur, skits, skittar*
Rørið tiptist, tí **skittur** sat í tí.

**skíggi** k
*skíggi, skíggja, skíggjar*
Árni var á sjónvarps**skíggjanum**.

**skýggj** ⇨

**skýggja** ⇨

**skýma** ⇨

**skína** s
*skína, skínur, skein, skinu, skinið*
Sólin **skínur** bæði oman og niðan.

**skíta** s
*skíta, skítur, skeit, skitu, skitið*
Kúgvin **skítur** í flórin.

**skjal** h
*skjal, skjals, skjøl*
Á **skjala**savninum verða goymd gomul **skjøl**.



**skjóta** s
*skjóta, skjýtur, skeyt, skutu, skotið*
Øssur **skjýtur** fugl.

**skjótur** l
*skjótur, skjót, skjótt*
Regin er **skjótur** at hjálpa til.

**skjúrt** h
*skjúrt, skjúrst, skjúrt*
Genturnar vóru farnar í sítt **skjúrt**.



**skjúrta** kv
*skjúrta, skjúrtu, skjúrtur*
Dreingirnir vóru í hvítari **skjúrtu**.

**skola** s
*skola, skolaði*
Sjógvurin **skolaði** inn á dekkið.

**skomm** kv
*skomm, skammar, skammir*
Tey hildu tað vera **skomm** at roykja.

**skordýr** h
*skordýr, -dýrs, -dýr*
Flugan er eitt **skordýr**.

**skorpa** kv
*skorpa, skorpu, skorpur*
Rugbreyðið hevði harða **skorpu**.


Materiál chráněný autorskými právy

**skortur** k
*skortur, skorts, skortar*
Á føstulávint er vanligt, at børn ganga í gekka**skorti** og spæla grýlu.

**skot** h
*skot, skots, skot*
Á nýggjárinum eru nógv **skot** at hoyra.
Eitt trongt **skot** er millum húsini.

**skoyta** s
*skoyta, skoytir, skoytti*
Hann **skoytir** leidningin, at hann skal røkka.

**skógur** k
*skógur, skógar, skógir*
Í Føroyum vaksa eingir **skógir**.



**skógvur** k
*skógvur, skós, skógvar*
Turið hevur fingið nýggjar **skógvar**.

**skóti** k
*skóti, skóta, skótar*
**Skótarnir** ganga uppi í haganum.

**skraddari** k
*skraddari, skraddara, skraddarar*
**Skraddarin** sat á borðinum og seymaði.

**skrá** kv
*skrá, skráar, skráir*
Abbi fær sær eina **skrá**.
Elsa las fundar**skránna**.

**skrála** s
*skrála, skrálaði*
Karin **skrálaði** so hart, sum hon orkaði.



**skráseting** kv
*skráseting, -setingar, -setingar*
Ingigerð fæst við **skráseting** á bókasavninum.

**skreiða** s
*skreiða, skreiðir, skreiddi*
Óluva **skreiðir** á sleðu.



**skreyt** h
*skreyt, skreyts, – flt*
Prinsessan eigur nógv skart og **skreyt**.

**skriva** s
*skriva, skrivaði*
Børnini sótu so hugagóð og **skrivaðu**.

**skrýddur** ⇨



Materiál chráněný autorskými právy

**skríða** s
*skríða, skríður, skreið, skriðu, skriðið*
Snigilin **skríður** sera spakuliga.

**skríggja** s
*skríggja, skríggjaði*
Barnið lá og **skríggjaði** og græt.



**skróvturrur** l
*skróvturrur, -turr, -turt*
Klæðini vóru **skróvturr**.

**skrubba** kv
*skrubba, skrubbu, skrubbur*
Dreingirnir plagdu at fiska **skrubbur**.

**skrubba** s
*skrubba, skrubbaði*
Marna **skrubbar** gólvið.

**skrúva** kv
*skrúva, skrúvu, skrúvur*
Signar hevur sett borðið saman við **skrúvum**.

**skrædla** s
*skrædla, skrædlaði*
Mamma **skrædlaði** fiskin.

**skræða** kv
*skræða, skræðu, skræður*
Fiskur hevur **skræðu**.

**skræða** s
*skræða, skræðir, skræddi*
Kári **skræddi** pappírið.

**skrøgga** s
*skrøgga, skrøggaði*
Tórður er tiltikin at **skrøgga**.

**skuggi** k
*skuggi, skugga, skuggar*
Tá ið heitt er, er gott at sita í **skugganum**.

**skula** s
*skula, skal, skuldi, skuldu, skulað*
Lærarin segði, at tey **skuldu** ikki koma í morgin.

**skursla** s
*skursla, skurslaði*
Jóan datt og **skurslaði** knæið.

**skutil** k
*skutil, skutils, skutlar*
Grindin varð givin upp til **skutils**.

**skutur** k
*skutur, skutar, skutir*
Børnini sótu hvørt í sínum **skuti** í bátinum.

**skúli** k
*skúli, skúla, skúlar*
Lærararnir gleddu seg til at fara í **skúla** aftur.



Materiál chráněný autorskými právy

**skyggja** s
*skyggja, skyggir, skygdi*
Sólin **skyggir** í vindeygað.

**skylda** s
*skylda, skyldaði*
Hann **skyldar** mær tíggju krónur.

**skyldfólk** h
*skyldfólk, -fólks, -fólk*
Bæði **skyldfólk** og kenningar vóru í føðingardegi hjá Marjuni.

**skyn** h
*skyn, skyns, – flt*
Orðið stendur í Orða**skyni**.

**skyna** s
*skyna, skynaði*
Dugir tú á at **skyna** klokku?

**skýggj** h

*skýggj, skýs, skýggj*
Eitt **skýggj** rekur eftir luftini.

**skýggja** s
*skýggja, skýggjaði*
Hann **skýggjar** á luftina.
Abbasystir **skýggjar** fólk, sum hon ikki kennir.

**skýma** s
*skýma, skýmir, skýmdi*
Um jóltíðir **skýmir** longu klokkan trý um dagin.

**skøltur** k

*skøltur, skølts, skøltar*
**Skøltur** er høvdið á menniskjum.
**Skøltur** er ein rundur, høgur klettur.

**skøta** kv
*skøta, skøtu, skøtur*
Pápi og teir fingu tvær **skøtur**, seinast teir vóru á útróðri.

**skøvningur** k

*skøvningur, skøvnings, skøvningar*
Urið er oftast á vinstra **skøvningi.**

**slag** h
*slag, slags, sløg*
Heðin gav Jákupi eitt **slag** undir vangan.
Vit eiga tvey **sløg** av borðiskum.

**slaktari** k

*slaktari, slaktara, slaktarar*
Heini keypti oksasteik frá **slaktaranum**.

**slættur** ⇨

**slavin** l
*slavin, slavin, slavið*
Veggurin er **slavin** at nerta við.



Materiál chráněný autorskými právy

**sláa** s
*sláa, slær, sló, slógu, sligið*
Um summarið **slær** bóndin bøin.

**sleingja** s
*sleingja, sleingir, slongdi*
Dávid **slongdi** ein stein eftir Goliati.

**sleiskur** l
*sleiskur, sleisk, sleiskt*
Hann er øgiliga smikrutur og **sleiskur**.

**slekt** kv
*slekt, slektar, slektir*
Hann taldi **slekt** sína aftur til harra Klæmint.

**sleppa** s
*sleppa, sleppur, slapp, sluppu, sloppið*
Báturin **sleppur** ikki inn í havnina.

**sleppa** s
*sleppa, sleppir, slepti*
Drongurin **slepti** hondini á mammuni.

**slíðrar** k flt
Knívurin var í **slíðrunum**.



**slitna** s
*slitna, slitnaði*
Línan **slitnaði** av teirri tungu byrðini.

**slíkur** l
*slíkur, slík, slíkt*
Vit ferðast ikki aftur í **slíkum** veðri.

**slímutur** l
*slímutur, slímut, slímut*
Snigilin er **slímutur** at nerta við.

**slíta** s
*slíta, slítur, sleit, slitu, slitið*
Tógvið var lætt at **slíta**.
Pápi **slítur** nógvar skógvar um árið.

**slóttur** k
*slóttur, slótturs, – flt*
**Slóttur** er, tá ið grasið verður sligið.

**slupp** kv
*slupp, sluppar, sluppir*
Fyrsta **sluppin** kom til Føroya í 1872.



**slættur** l
*slættur, sløtt, slætt*
Vøllurin er **slættur**.


Materiál chráněný autorskými právy

**sløð** h
*sløð, sløðs, sløð*
Tey høvdu bara eitt **sløð** av sukri eftir.

**sløða** s
*sløða, sløðir, sløddi*
Barnið **sløðir** um seg við sínum leikum.

**sløðra** s

*sløðra, sløðraði*
Tann fulli maðurin fór **sløðrandi** eftir vegnum.

**sløga** s
*sløga, sløgir, sløgdi*
At **sløga** er at taka garnarnar úr fiski, tá ið kruvt verður.

**sløkkja** s
*sløkkja, sløkkir, sløkti*
Tað ræður um at **sløkkja** sum skjótast, tá ið eldur er komin í hús.

**smæðin** ⇨

**smalur** l
*smalur, smøl, smalt*
Gøtan var **smøl**.

**smæra** ⇨

**smábarn** h
*smábarn, -barns, -børn*
**Smábørn** ganga í 1. flokki.

**smádýr** h
*smádýr, -dýrs, -dýr*
**Smádýr** eru at síggja undir steinum.

**smátta** kv

*smátta, smáttu, smáttur*
Børnini hava bygt sær eina lítla **smáttu** á bønum.

**smáur** l
*smáur, smá, smátt*
Nýlembd lomb eru **smá** og fitt.

**smella** s
*smella, smellur, small, smullu, smollið*
Hann misti vitið og **small** í gólvið.

**smetta** s
*smetta, smettaði*
Jákup **smettar** fyri læraranum, at Hanus hevur gjørt sær ónáðir.

**smiðja** kv
*smiðja, smiðju, smiður*
Í Lítluvík var ein **smiðja**.

**smiður** k
*smiður, smiðs, smiðir*
Herman ætlar at læra til **smið**.

**smyrja** ⇨



Materiál chráněný autorskými právy

**smitta** s
*smitta, smittaði*
Spýggisjúka **smittar** illa.

**smíða** s
*smíða, smíðaði*
Tveir húsasmiðir s**míðaðu** húsini hjá okkum.



**smolt** h
*smolt, smolts, – flt*
Yngul verður til **smolt**.

**smúgva** s
*smúgva, smýgur, smeyg, smugu, smogið*
Hundurin **smýgur** sær burtur.

**smyrja** s
*smyrja, smyr, smurdi*
Pápi **smyr** bilmotorin við smyrjiolju.
Egil **smurdi** sær upp á tvær breyðflísar.

**smæðin** l
*smæðin, smæðin, smæðið*
Smá børn eru ofta **smæðin** fyri fremmandafólki.

**smæra** kv
*smæra, smæru, smærur*
Sanna gav mammu síni eitt tyssi av **smærum**.

**smør** h
*smør, smørs, – flt*
**Smør** verður kirnað úr róma.



**snælda** ⇨

**snara** kv
*snara, snaru, snarur*
Nú er ikki loyvt at veiða lomviga við **snaru**.

**snara** s
*snara, snaraði*
Mamman biður Elsu hjálpa sær at **snara** bandið.

**sneiða** s
*sneiða, sneiðir, sneiddi*
Bilurin **sneiddi** inn á høvuðsvegin við nógvari ferð.

**sneis** kv
*sneis, sneisar, sneisar*
Bergur leitar eftir **sneisum** at brenna í ovninum.

**snella** kv
*snella, snellu, snellur*
Snorra dámar betur at fiska við **snellu** enn við snøri.

**snið** h
*snið, sniðs, snið*
**Sniðið** á buksunum hjá Katrini er nýmótans.


Materiál chráněný autorskými právy

**snigil** k
*snigil, snigils, sniglar*
Pinocchio bíðaði leingi eftir **sniglinum**.

**snildur** l
*snildur, snild, snilt*
Pápi Bjørg er so **snildur**, hann veit altíð ráð.

**snýði** ⇨

**sníkja** s
*sníkja, sníkir, sníkti*
Hann **sníkir** seg fram við garðinum.



**snýsa** ⇨

**snjókelling** kv
*snjókelling, -kellingar, -kellingar*
Børnini brendu **snjókelling** á bønum.

**snúgva** s
*snúgva, snýr, snúði, snúðu, snúð*
Søgan **snúði** seg um tubbak.

**snýði** h
*snýði, snýðis, snýði*
Anna hevur so fitt **snýði**.



**snýsa** s
*snýsa, snýsir, snýsti*
Sigrið **snýsti** sær. Hon hevði krím.

**snælda** kv
*snælda, snældu, snældur*
Tógvið verður spunnið á **snældu**.

**snøggur** l
*snøggur, snøgg, snøgt*
Tá ið pápi klippir av skegginum, er hann so **snøggur** um andlitið.

**snøri** h
*snøri, snøris, snøri*
Abbi og Oddmar fara út í fjørðin við **snøri**.

**sodavatn** h
*sodavatn, sodavatns, – flt*
Børnini drekka **sodavatn**.



**soð** h
*soð, soðs, – flt*
Kálvurin fekk **soð** at drekka.

**soleiðis**
Tú skalt gera **soleiðis**, tí at tað er lættari.

**soltin** l
*soltin, soltin, soltið*
Kjøt er **soltið**, tá ið eingin fiti er í tí.



Materiál chráněný autorskými právy

**song** kv
*song, songar/seingjar, sengur/ seingir*
Una svevur í **songini** hjá ommu síni.



**sonur** k
*sonur, sonar, synir*
Jákup er **sonur** Jógvan á Breyt.

**sorg** kv
*sorg, sorgar, sorgir*
Tað var stór **sorg** í bygdini, tá ið báturin gekk burtur.

**Sosialurin**
**Sosialurin** er málgagn Javnaðarfloksins.

**sova** s
*sova, svevur, svav, svóvu, sovið*
Smábørn **sova** ofta um dagin.

**sovna** s
*sovna, sovnaði*
Lisa lítla **sovnar** ikki um kvøldið.

**sovorðið**
**Sovorðið** seyðaslag, sum er í Føroyum, er onga aðrastaðni.

**sókn** kv
*sókn, sóknar, sóknir*
Í hvørji **sókn** er kirkja.

**sóknarkrókur** k
*sóknarkrókur, -króks, -krókar*
Teir høgdu **sóknarkrókin** í tann stóra hvalin og drógu hann upp á sandin.



**sól** kv
*sól, sólar, sólir*
Í dag skínur **sólin** oman og niðan.



**sólbrendur** l
*sólbrendur, -brend, -brent*
Tá ið vit eru úti í sólini, verða vit **sólbrend**.

**sólgul** h
*sólgul, -guls, -gul*
**Sólgul** er eitt sindur av vindi mitt um dagin, tá ið sólin stendur hægst á luftini.

**sólja** kv
*sólja, sólju, sóljur*
**Sólja** er navn á ymiskum gulum blomstrum.



**sóljukoppur** k
*sóljukoppur, -kops, -koppar*
**Sóljukoppur** er blað og leggur á sólju.


Materiál chráněný autorskými právy

## sólskinsdagur k

*sólskinsdagur, -dags, -dagar*
Ein fagran **sólskinsdag** fóru skúlabørnini í hagan.



## sópa s

*sópa, sópaði*
Bóndin **sópar** undan neytunum.

## spaðari k

*spaðari, spaðara, spaðarar*
Signar hevur fingið 6 **spaðarar** og 2 rútarar.

## spakuliga

Tað skalt tú siga so **spakuliga**.

## spæl ⇨

## spæla s ⇨

## spara s

*spara, sparir, spardi*
Sørin **sparir** sær pening til eina súkklu.



## sparka s

*sparka, sparkaði*
Ólavi dámar væl at **sparka** bólt.

## spáa s

*spáa, spáaði/spáddi*
At **spáa** er at siga frá frammanundan, at okkurt fer at henda.

## spegil k

*spegil, spegils, speglar*
Lítli **spegil** á vegginum har, hvør er vakrast í landinum her.



## speiskur l

*speiskur, speisk, speiskt*
Sveinur var so **speiskur** við meg, tá ið eg ikki vildi fara við.

## spelkin l

*spelkin, spelkin, spelkið*
Hanin gongur har so **spelkin**.

## spenna s

*spenna, spennir, spenti*
Hanus **spenti** snórin ímillum bæði húsini.
Hann **spenti** seg út og varð fyrstur á mál.

## sperðil k

*sperðil, sperðils, sperðlar*
Hann stakk ein góðan **sperðil**.

## spik h

*spik, spiks, – flt*
Hann saltaði eina **spik**fjós.



Materiál chráněný autorskými právy

**spilla** s
*spilla, spillir, spilti*
Tá ið vit tosa ilt um onnur, **spilla** vit tey út.
Hann **spilti** tíðina burtur.

**spiltur** l
*spiltur, spilt, spilt*
Hetta súreplið er **spilt**, tú mást ikki eta tað.

**spyrja** s ⇨

**spýggja** s ⇨

**spíska** s
*spíska, spískaði*
Jóna **spískaði** allar blýantarnar heima.



**spýta** ⇨

**spjaða** s
*spjaða, spjaðir, spjaddi*
Hundahvølpurin **spjaddi** øll bløðini útum í køkinum.

**spjaldrastavur** k
*spjaldrastavur, -stavs, -stavir*
HETTA ER ALT SKRIVAÐ VIÐ **SPJALDRASTAVUM**.

**sporl** h
*sporl, sporls, sporl*
Summum dámar best **sporl**.

**spotta** s
*spotta, spottaði*
Tú eigur ikki at **spotta** onnur, um tey ikki eru sum tú.

**spógvi** k
*spógvi, spógva, spógvar*
**Spógvi** er heiðafuglur.

**spónur** k
*spónur, spónar, spønir/spónar*
Hann telgdi, so at **spønirnir** ruku frá.
Hann vendi pannukakuni við flat**spóninum**.



**sprakla** s
*sprakla, spraklaði*
Fiskurin **spraklaði** so illa, at Sámal misti hann.

**spreingja** s
*spreingja, spreingir, sprongdi*
Menninir **spreingja** grót í grótbrotinum.
Hann **spreingir** seg, sum hann rennur.

**spretta** s
*spretta, sprettur, spratt, spruttu, sprottið*
Blómurnar **spretta** um várið.

**springa** s
*springa, springur, sprakk, sprungu, sprungið*
Pól **sprakk** av stað í skúla.


Materiál chráněný autorskými právy

**spríkja** s
*spríkja, spríkir, spríkti*
Sveittin **spríkir** út um andlitið.

**sprøklutur** l
*sprøklutur, sprøklut, sprøklut*
Eitt klæði, ið hevur fleiri litir, er **sprøklut**.

**spyrja** s
*spyrja, spyr, spurdi*
Karin **spyr** mammu sína, um hon kann sleppa út at spæla.

**spýggja** s
*spýggja, spýr, spýði, spýðu, spýð*
Bogi hevði ilt í búkinum og **spýði**.



**spýta** s
*spýta, spýtir, spýtti*
Í bókini Gummi-Tarzani royndu dreingirnir at **spýta** langt.

**spæl** h
*spæl, spæls, spøl*
Í fríkorterinum spæla børnini mong ymisk **spøl**.

**spæla** s
*spæla, spælir, spældi*
Anna situr so hugagóð og **spælir** við dukkur.

**spøkilsi** h
*spøkilsi, spøkilsis, spøkilsi*
Hvørja nátt leikaðu **spøkilsini** á borgini.

**staddur** l
*staddur, stødd, statt*
Pápi er **staddur** í Grønlandi.

**stað** h
*stað, staðs, støð*
Tað eru nógv **støð** í fjøruni, har gott er at fiska murt.

**standa** s
*standa, stendur, stóð, stóðu, staðið*
Anna situr, men Elsa **stendur** uppi.
Per og Jákup **stóðu** fyri skótaleguni.

**stanga** s
*stanga, stangaði*
Tarvurin **stangaði** Ólav.



**stara** s
*stara, starir, stardi*
Katrin **stardi** at Gunnu, tá ið hon segði frá hendingini.

**starv** h
*starv, starvs, størv*
Sigrun hevur fingið **starv** á kommunuskrivstovuni.



Materiál chráněný autorskými právy

**stavnur** k
*stavnur, stavns, stavnar*
Báturin sigldi á, og **stavnurin** brotnaði.
Snopprikkur var ein verri **stavnur**.

**stavur** k
*stavur, stavs, stavir/stavar*
Omma gongur við **stavi**.

**stál** h
*stál, stáls, stál*
Flestir maskinlutir verða gjørdir úr **stáli**.

**steðga** s
*steðga, steðgaði*
Marjun **steðgaði** uttan fyri handilsgluggan at hyggja.

**steikja** s
*steikja, steikir, steikti*
Mamma **steikir** kjøt í ovninum.

**steingja** s
*steingja, steingir, stongdi*
Búi **steingir** hurðina um náttina.

**steinur** k
*steinur, steins, steinar*
Í fjøruni er ein hópur av **steinum**, bæði stórum og smáum.



**sterkur** l
*sterkur, sterk, sterkt*
Pápi mín er ógvuliga **sterkur**, hann orkar at lyfta handa stóra steinin.

**stevna** kv
*stevna, stevnu, stevnur*
Um summarið verða **stevnur** hildnar í nógvum bygdum.

**stevna** s
*stevna, stevnir, stevndi*
Skipið **stevnir** inn gjøgnum fjørðin.

**steyp** h
*steyp, steyps, steyp*
Sílið vann **steypið** til ognar.



**styðja** ⇨

**stig** h
*stig, stigs, stig*
Tær gingu nøkur **stig**, men steðgaðu so.
Í gjár var heitt, eini 18 hita**stig**.

**styggur** ⇨

**stykki** ⇨

**stillur** l
*stillur, still, stilt*
Óli situr heilt **stillur**.


Materiál chráněný autorskými právy

**stinga** s
*stinga, stingur, stakk, stungu, stungið*
Ása **stakk** seg í fingurin av nálini.

**stynja** ⇨

**stinnur** l
*stinnur, stinn, stint*
Statt tú **stinnur** og reystur og vikast ikki.

**stirðil** k
*stirðil, stirðils, – flt*
Eingin **stirðil** er í hasin lambinum.

**styrki**

**stivlar** k flt
Hol var á **stivlunum**.



**stíga** s
*stíga, stígur, steig, stigu, stigið*
Tá ið eg **steig** á gólvið í morgun, mundi eg dottið.

**stjala** s
*stjala, stjelur, stjól, stjólu, stolið*
Tjóvurin **stjól** bilin hjá Móritsi.

**stjóri** k
*stjóri, stjóra, stjórar*
Tey fingu nýggjan **stjóra** á verksmiðjuni.

**stjórn** kv
*stjórn, stjórnar, stjórnir*
Eftir val verður skipað nýggj **stjórn**.

**stjørna** kv
*stjørna, stjørnu, stjørnur*
Vit síggja **stjørnurnar** á luftini.



**stokkutur** l
*stokkutur, stokkut, stokkut*
Ein **stokkut** løta er ein stutt løta.

**stoltur** l
*stoltur, stolt, stolt*
Anna er so **stolt**, hon hirðir ikki at tosa við okkum.

**stong** kv
*stong, stangar, stengur*
Tá ið Mortan fylti, vundu vit flaggið á **stong**.

**stova** kv
*stova, stovu, stovur*
Í húsunum vóru tvær stórar **stovur**.



Materiál chráněný autorskými právy

**stoypa** s



*stoypa, stoypir, stoypti*
Í Føroyum eru nógv **stoypt** hús.

**stólur** k
*stólur, stóls, stólar*
Marin og tey keyptu nýggjar **stólar** í køkin.

**stórur** l
*stórur, stór, stórt*
Steinurin var **stórur** sum ein klettur.

**straks**
Kom higar **straks**.

**strangur** l
*strangur, strong, strangt*
Veturin var langur og **strangur**.

**strá** h
*strá, strás, strá*
Kjartan fekk sær eitt gras**strá** í munnin.
**Stráið** er ein partur av rokkinum.

**streingja** s
*streingja, streingir, strongdi*
Heimaliðið **strongdi** nú á og fekk umsíðir mál.
At **streingja** heiti er at geva lyfti.

**strekki** h
*strekki, strekkis, strekki*
Seinasta **strekkið** var eg móður.

**stremba** s
*stremba, strembaði*
Vit **strembaðu** móti kavaódnini.

**strev** h
*strev, strevs, – flt*
Eftir alt hetta **strevið** vóru vit móð.

**streymur** k
*streymur, streyms, streymar*
Á nesinum var **streymurin** stríður.

**strika** kv
*strika, striku, strikur*
Nú ræður um at fáa **strikuna** beina.



**strika** s
*strika, strikaði*
Kom, lat meg **strika** fyri.

**stríð** h
*stríð, stríðs, stríð*
Um allan heim er **stríð** og bardagi.

**stríggin** l
*stríggin, stríggin, stríggið*
Arbeiðið var sera **stríggið**.


Materiál chráněný autorskými právy

# S

**strond** kv
*strond, strandar, strendur*
Sum teir nærkaðust **strondini**, sóu teir betur brimið.

**strongur** k
*strongur, streingjar, streingir*
Í morgun slitnaði ein **strongur** á gittara mínum.
Út úr nesinum gongur ein **strongur** langt til havs.

**stroya** s
*stroya, stroyir, stroyddi*
Elsa **stroyddi** sukur upp á breyðflísina.



**strúka** s
*strúka, strýkur, streyk, struku, strokið*
Omma **streyk** mær um ennið.
Bilurin **streyk** avstað eftir vegnum.

**studentur** k
*studentur, students, studentar*
Í summar verður Sára **studentur**.

**stuðul** k
*stuðul, stuðuls, stuðlar*
Landsliðið fekk dyggan **stuðul**.

**stuttligur** l
*stuttligur, stuttlig, stuttligt*
Tað er so **stuttligt** at spæla sjónleik.

**stuttur** l
*stuttur, stutt, stutt*
Tað er **stutt** millum Skopun og Sand.

**styðja** s
*styðja, studdi/styðjaði*
Páll **styðjaði** seg at einum steini, tí at hann hevði keikt fótin.

**styggur** l
*styggur, stygg, stygt*
Lambið var so **stygt**, at ikki fekst hond á tað.

**stykki** h
*stykki, stykkis, stykki*
Krovið varð býtt í tjúgu **stykki**.



**styrki** kv
Vektlyftarin sýndi **styrki**.

**støddfrøði** kv
*støddfrøði, støddfrøði, – flt*
Summi halda, at **støddfrøði** er spennandi at fáast við.

**suður**
Sumba er **syðsta** bygd í Føroyum.

**summar** h
*summar, summars, summør*
Um **summarið** er ljóst og lýtt.



Materiál chráněný autorskými právy

**sunnudagur** k
**Sunnudagur** er heiligdagur.

**súgva** s
*súgva, sýgur, seyg, sugu, sogið*
Barnið **sýgur** dúgliga.

**súkkla** s
*súkkla, súkklaði*
Nógv børn **súkkla** í skúla.



**súpa** s
*súpa, sýpur, seyp, supu, sopið*
Ásvør **sýpur** havragreyt hvønn morgun.

**súrepli** h
*súrepli, -eplis, -epli*
Kjartan etur eitt **súrepli** um dagin.

**súrevni** h
*súrevni, -evnis, -evni*
Fimtiparturin av luftini er **súrevni**.

**sút** kv
*sút, sútar, sútir*
**Sút** er tað sama sum sorg.

**svangur** l
*svangur, svong, svangt*
Jens var **svangur**, tá ið hann kom aftur um kvøldið.

**svara** s
*svara, svaraði*
Tá ið tú verður spurd, skalt tú **svara**.

**svartkjaftur** k
*svartkjaftur, -kjafts, – flt*
Mikkjal er skipari á **svartkjafta**skipi.

**svartur** l
*svartur, svørt, svart*
Húsini vóru málað **svørt**.



**svæva** ⇨

**sveiggja** s
*sveiggja, sveiggjaði*
Flaggstongin **sveiggjaði** nógv í vindinum, áðrenn hon brotnaði.

**sveitta** s
*sveitta, sveittaði*
Fjallmenninir **sveittaðu** illa, tá ið teir komu á rættina.

**sveiv** kv
*sveiv, sveivar, sveivar/sveivir*
Aftasti parturin á grindahvali er **sveivin**.

**sviði** k
*sviði, sviða, sviðar*
Um vit brenna okkum, fáa vit **sviða**.


Materiál chráněný autorskými právy

**svika** s
*svika, svikaði*
Annfinnur **svikar** illa, tá ið hann spælir kort.

**svimja** s
*svimja, svimur, svam, svumu, svomið*
Tað er stuttligt at **svimja**.

**svimjihøll** kv
*svimjihøll, -hallar, -hallir*
Í fleiri bygdum eru nú **svimjihallir**.



**svinta** kv
*svinta, svintu, svintur*
Arbeiðsfólkið á flakavirkinum er í **svintu**.

**svíða** s
*svíða, svíður, sveið, sviðu, sviðið*
Tað **svíður** í sárinum á beininum.

**svíkja** s
*svíkja, svíkur, sveik, sviku, svikið*
Drongurin **sveik** gentuna.

**svæva** s
*svæva, svævir, svævdi*
Bóndin **svævdi** allan seyðin.

**svølgja** s
*svølgja, svølgir, svølgdi*
Eingin skal kanna sær bitan, áðrenn hann er **svølgdur**. (Orðtak)

**svølla** s
*svølla, svøllur, svall, svullu, svollið*
Rúni noyddist til lækna, tí hann **svall** í fingrinum.

**svørð** h
*svørð, svørðs, svørð*
Sigmundur aftur um gjónna sprakk, **svørðið** úr hans hondum stakk.



**Svøríki** h
Í **Svøríki** búgva sviar.

**svørja** s
*svørja, svør, svór, svóru, svorið*
Pætur **svór**, at hann ikki kendi Jesus.

**svøvnur** k
*svøvnur, svøvns, – flt*
Langabbi lá í fasta**svøvni** og reyt.

**syfta** s
*syfta, syftir, syfti*
Súni royndi at **syfta** reyðfiskin, men tráðan brotnaði.





Materiál chráněný autorskými právy

## syftunsøka kv
2. juli er **syftunsøka**.

## sylindari k
*sylindari, sylindara, sylindarar*
Nógvir bilmotorar hava fýra **sylindarar**.

## syndarligur l
*syndarligur, -lig, -ligt*
Tey fingu eina **syndarliga** lagnu.

## syngja s

*syngja, syngur, sang, sungu, sungið*
Systkini hava **sungið** í kórinum.

## syrgja s
*syrgja, syrgir, syrgdi*
Øll í húsinum **syrgdu**, tá ið abbin doyði.

## systir kv
*systir, systur, systrar*
**Systir** mín er eldri enn eg.

## systkin h flt
Elin og Ólavur eru **systkin**.

## systkinabarn h
*systkinabarn, -barns, -børn*
Inga og eg eru **systkinabørn**.

## sýn kv
*sýn, sýnar, sýnir*
Neytini dagaðu um **sýnina**.

## sýsla kv
*sýsla, sýslu, sýslur*
Í Føroyum eru sjey **sýslur**.

## sýta s
*sýta, sýtir, sýtti*
Løgreglan **sýtti** fremmanda-manninum innfaraloyvi.

## sær
Jóannes hevur pípuna uppi á **sær**.

## særa s
*særa, særir, særdi*
Áki **særdi** fuglin av óvart; hann rakti hann við trænum.

## særdur l
*særdur, særd, sært*
Hermenninir lógu **særdir** á vígvøllinum.

## sætti
*sætti, sætta, sætta*
Edvard gongur í **sætta** flokki.

## søga kv
*søga, søgu, søgur*
Tá ið eg fór til songar, segði mamma mær eina **søgu**.



Materiál chráněný autorskými právy

**søkja** s

*søkja, søkir, søkti*

Gunna **søkti** starvið og fekk tað.

**søkka** s

*søkka, søkkur, sakk/søkk, sukku, sokkið*

Hol kom á skipið, og tað **sakk**.



**søkkja** s

*søkkja, søkkir, søkti*

Í gjár **søktu** teir ta gomlu sluppina.



Materiál chráněný autorskými právy

**ta**

Vit sóu **ta** nýggju kirkjuna í bygdini.

**tað**

Vit sóu **tað** nýggja skipið fyri løtu síðan.

**tagna** s

*tagna, tagnaði*

Barnið **tagnaði** ikki, men græt alla tíðina.

**tak** h

*tak taks, tøk*

Tað var eitt rimmar**tak** at fara undir at smíða bátin.

**taka** s

*taka, tekur, tók, tóku, tikið*

Hvør hevur **tikið** bók mína?

Í gjár **tók** eg eina mynd av Beinisvørði.

**tal** h

*tal, tals, tøl*

Fróði skrivar **tøl** á talvuna.

**talvfólk** h



*talvfólk, -fólks, -fólk*

Sekstan **talvfólk** eru hvít og sekstan eru svørt.

**tamarhald**

*tamarhald, -halds, – flt*

Sløkkiliðið fekk skjótt **tamarhald** á eldinum.

**tamur** l

*tamur, tom, tamt*



Fuglurin var so **tamur**, at hann setti seg á hondina á mær.

**tangi** k

*tangi, tanga, tangar*

Báturin rør út um **tangan**.

**tann**

**Tann** maðurin, ið var her í áðni, er prúður.



Materiál chráněný autorskými právy

# T

## **tannlækni** k



*tannlækni, -lækna, -læknar*
Oddmar hevði tannapínu og fór til **tannlækna**.

## **tær** ⇨

## **tari** k

*tari, tara, tarar*
Ymisk sløg av **tara** vaksa fram við strondum okkara.

## **tarvur** k

*tarvur, tarvs, tarvar*
Í haganum er ein **tarvur**, sum vanur er at stanga.

## **tættur** ⇨

## **tá** kv

*tá, táar, tær*
Vit hava fimm **tær** á hvørjum fóti.

## **tá**

Abbi tosaði um gamlar dagar og segði, at **tá** í tíðini var ofta ringt veður.

## **tá ið**

**Tá ið** eg komi heim, skulu vit fara at spæla.

## **tálg** kv

*tálg, tálgar, – flt*
Mær dámar væl knetti við nógvari **tálg**.

## **tám** h

*tám, táms, – flt*
Eitt **tám** lá á sjónum, og tí sóu vit ikki hinar bátarnar.

## **tápuligur** l

*tápuligur, -lig, -ligt*
Jóan var **tápuligur** ikki at fyrireika seg til próvtøkuna.

## **tár** h

*tár, társ, tár*
**Tárini** runnu niður eftir kjálkunum á henni.

## **tátíð** kv

*tátíð, -tíðar, -tíðir*
Sagnorð kunnu standa í **tátíð**.

## **te** h



*te, tes, – flt*
Lat meg fáa ein kopp av **tei**.

## **teg**

Heiti eg á **teg**, rættir tú mær kanska eina hond.



Materiál chráněný autorskými právy

**teigur** k
*teigur, teigs, teigar*
Millum **teigarnar** á bønum eru veitir.
Í orðabókini eru tveir **teigar** á hvørji blaðsíðu.

**teimum**
**Teimum** dámar ræstan fisk.

**teinur** k
*teinur, teins, teinar*
Úr Føroyum til Grønlands er langur **teinur** at sigla.

**tekja** kv
*tekja, tekju, tekjur*
Fuglarnir lótu á **tekjuni**.

**tekja** s
*tekja, tekir, takti*
Hús okkara eru **takt** av nýggjum.



**tekkja** s
*tekkja, tekkir, tekti*
Tað var so myrkt, at tað var ikki meira, enn teir **tektu** bátin.

**telda** kv
*telda, teldu, teldur*
Sigga hevur **teldu**læru í skúlanum.



**telgja** s
*telgja, telgir, telgdi*
Ásmund **telgir** sær ein lítlan bát.

**telja** s
*telja, telur, taldi*
Lítli Pól dugir at **telja** upp í 10.

**teljari** k
*teljari, teljara, teljarar*
Í brotrokning er talið á brotstrikuni **teljari**.

**telva** s
*telva, telvar/telvir, telvaði/ telvdi*
Ingi **telvar** javnan og er tí limur í talvfelagnum.



**tempul** hv
*tempul, tempuls, tempul*
Eitt **tempul** er ein halgidómur.

**tendring** kv
*tendring, tendringar, tendringar*
Tá ið mánin fer at vaksa aftur, er **tendring**.

**tennis**
Árant og Ásbjørn spæla **tennis**.


Materiál chráněný autorskými právy

# T

## terna kv

*terna, ternu, ternur*

Higar kemur **ternan** á halvarðsøku.

## ternumurtur k

*ternumurtur, -murts, -murtar*

Um summarið er nógvur **ternumurtur** at síggja.

## terri k

*terri, terra, – flt*



Í dag skínur sólin, og tí er góður **terri**.

## teska s

*teska, teskaði*

Katrin **teskaði** mær í oyrað, at eingin annar skuldi hoyra.

## tespiligur l

*tespiligur, -lig, -ligt*

Tað er ikki **tespiligt** hjá bátunum at vera úti í hesum ódnarveðrinum.

## teymur k

*teymur, teyms, teymar*

Hann stýrdi rossinum við **teymunum**.

Millum teinin og húkin á einum fiskisnøri er **teymurin**.

Sluppin verður løgd fyri **teym**.

## tiga s

*tiga, tigur, tagdi, tagdu, tagt*

Hann **tigur** ikki eina løtu.

## tyggja ⇨

## tygum ⇨

## tykkara ⇨

## tykkum ⇨

## tiltak h

*tiltak, tiltaks, tiltøk*

Ásla helt tað vera eitt gott **tiltak** at byggja barnagarð.

## tindur k

*tindur, tinds, tindar*



Hægsti **tindur** í Føroyum er Slættaratindur.

## Tingakrossur

**Tingakrossur** er málgagn Sjálvstýrisfloksins.

## tinganest h

*tinganest, tinganests, – flt*

= gáva

Tá ið pápi kemur aftur av ferð uttanlands, hevur hann eitthvørt **tinganest** við til mín.

## tinna kv

*tinna, tinnu, tinnur*

Vakrir steinar verða nevndir **tinnur**.



Materiál chráněný autorskými právy

**tynna** ⇨

**tippa** s
*tippa, tippir, tipti*
Rørið **tiptist**, og tí rann vatnið ikki frá.

**tyrla** ⇨

**tyssi** ⇨

**tystur** ⇨

**tit**
**Tit** eiga øll at verða til reiðar, tá ið farið verður.

**tí**
Hann kemur ikki, **tí** at veðrið er so ringt.

**tíbetur**
**Tíbetur** var eg ikki ov seinur í skúla.

**týdningur** ⇨

**tíð** kv
*tíð, tíðar, tíðir*
Fyrr í **tíðini** gingu føroyingar í húðarskóm.

**týða** ⇨

**tíðindakelda** kv
*tíðindakelda, -keldu, -keldur*
AP er ein **tíðindakelda** hjá Útvarpi Føroya.



**tíðindi** h flt
Í gjár bórust tey **tíðindi**, at royndin var miseydnað.

**tíggju**
Marin fyllir **tíggju** leygardagin.

**tíggjundi**
*tíggjundi, tíggjunda, tíggjunda*
**Tíggjunda** hvørt umfar í bulinum var einkult.

**tík** kv
*tík, tíkar, tíkar*
**Tíkin** hjá gubba legði fimm hvølpar.



**tílíkur** l
*tílíkur, tílík, tílíkt*
**Tílíka** mynd havi eg ikki sæð áður.

**tíma** s
*tíma, tímir, tímdi*
**Tímir** tú at hjálpa mær?

**tími** k
*tími, tíma, tímar*
Eyðun var inni hjá mær tveir **tímar** í dag.


Materiál chráněný autorskými právy

T

**tín**
Bók **tín** liggur á borðinum.

**týna** ⇨

**týsdagur** ⇨

**títtur** l
*títtur, títt, títt*
Lærarin var ov **títtur**, so at ringt var at skilja hann.

**tíverri**
Nei, **tíverri**, ikki havi eg sæð son tín.

**tjald** h
*tjald, tjalds, tjøld*
Elsa og Ása fara í hagan við **tjaldi**.



**tjaldur** h
*tjaldur, tjaldurs, tjøldur*
**Tjaldrið** er tjóðfuglur okkara.

**tjóð** kv
*tjóð, tjóðar, tjóðir*
Føroyingar eru ein **tjóð**.

**tjóðra** s
*tjóðra, tjóðraði*
Kúgvin varð **tjóðrað** niðan fyri fjósið.

**tjógv** h
*tjógv, tjóvs, tjógv*
Trý **tjógv** hanga í hjallinum.



**tjóvur** k
*tjóvur, tjóvs, tjóvar*
Tveir **tjóvar** og eitt tjógv.

**tjúgu**
**Tjúgu** næmingar eru í sætta flokki.

**tjúkkur** l
*tjúkkur, tjúkk, tjúkt*
Ein **tjúkk** bók liggur á borðinum.

**tjøra** kv
*tjøra, tjøru, – flt*
Vit tjøra húsini við **tjøru**.

**tjørn** kv
*tjørn, tjarnar, tjarnir*
Ein **tjørn** er eitt lítið vatn.

**tog** h
*tog, togs, tog*
Teir bundu bátin við einum **togi**.



**toga** s
*toga, togaði*
Skipið **togaði** trolið.



Materiál chráněný autorskými právy

**tok** h

*tok, toks, tok*
Í øðrum londum koyra fólk í **toki**.

**tol** h
*tol, tols, – flt*
Hann, sum einki **tol** hevur, verður óður av lítlum og ongum.

**tolin** l
*tolin, tolin, tolið*
Jákup er ein **tolin** drongur.

**tollaksmessudagur** k
23. desember er **tollaks-messudagur**.

**tollur** k
*tollur, tols, – flt*
**Tollurin** á tubbaki er høgur.

**tollur** k

*tollur, tols, tollar*
Seksmannafarið hevur seks **tollar.**

**tonn** kv
*tonn, tannar, tenn*
Vit fáa **tenn** tvær reisir, fyrst barna**tenn**, síðan vaksnamanna**tenn**.

**tora** kv
*tora, toru, – flt*
Í Føroyum gongur **toran** sjáldan um summarið.

**tora** s
*tora, torir, tordi*
Sørin **torir** ikki at ganga úti í myrkri.

**torn** h
*torn, torns, torn*
Flestar kirkjur okkara hava **torn**.

**torna** s
*torna, tornaði*
Finnur sat og bíðaði, meðan hosurnar **tornaðu**.

**torv** h
*torv, torvs, – flt*
Nú á døgum skera fá fólk **torv**.

**torva** kv
*torva, torvu, torvur*
Skipið rendi seg í eina stóra silda**torvu**.
Hon legði eina **torvu** aftur at eldinum.

**tosa** s
*tosa, tosaði*
Flokkurin **tosaði** nógv um ferðina, tey ætlaðu at fara.


Materiál chráněný autorskými právy

# T

**toskur** k
*toskur, tosks, toskar*
Nógvur **toskur** verður veiddur í Atlantshavi.

**tosti** k
*tosti, tosta, – flt*
**Tosti** kom á hann, tí hann hevði fingið saltfisk til døgurða.

**toyggja** s
*toyggja, toyggir, toygdi*
Børnini **toyggja** seg yvir ímóti kálvinum.

**tól** h
*tól, tóls, tól*
Ása hevur fingið nýtt mynda**tól**.



**tólv**
Pætur átti **tólv** høsnarungar.

**tóni** k
*tóni, tóna, tónar*
Ragnar dugir at fáa nógvar vakrar **tónar** fram úr urguni.

**tórsdagur**
Letingin segði: **Tórsdag** gangi eg tonkum í.

**træ** ⇨

**traðka** s
*traðka, traðkaði*
Maðurin **traðkar** ein bøkk leysan.

**trælur** ⇨

**trampa** s
*trampa, trampaði*
Rúni **trampar** í gólvið, tá ið hann ikki fær sín vilja.



**tráða** kv
*tráða, tráðu, tráður*
Børnini fara á seiðaberg við **tráðu**.

**tráður** k
*tráður, tráðar, træðrir*
Børnini snaraðu í **tráð**.

**trefsutur** l
*trefsutur, trefsut, trefsut*
Teppið var vorðið **trefsut**.

**trettan**
Teir sótu **trettan** til borðs.

**trettandi** k
**Trettandi** dagur jóla er 6. januar.

**treystur** l
*treystur, treyst, treyst*
Matur, sum er **treystur**, sodnast ikki so væl.



Materiál chráněný autorskými právy

**triði**
*triði, triðja, triðja*
**Triði** jóladagur er gerandis-dagur.

**tryggja** ⇨

**tristur** k
*tristur, trists, tristar*
Ein **tristur** er bátur við trimum bekkjum.

**trý** ⇨

**tríati**
Kvæðið er **tríati** ørindi.

**tríggir**
*tríggir, tríggjar, trý*
**Tríggir** vóru vísmenninir.

**tríkantur** k
*tríkantur, -kants, -kantar*
Í geometri læra vit um **tríkantar**.

**trílemba** kv
*trílemba,-lembu,-lembur*
**Trílemba** er ein ær, ið lembir trý lomb sama vár.



**trýsta** ⇨

**tríva** s
*tríva, trívur, treiv, trivu, trivið*
Teir **trivu** í Hørpurímu.

**trívast** s
*trívast, trívst, treivst, trivust, trivist*
Júst **trívst** sera væl úti hjá Gerdu.

**trog** h
*trog, trogs, trog*
**Trogið** stendur á borðinum við mati í.

**trol** h
*trol, trols, trol*
Tá ið **trolið** skrædnaði, mistu teir allan fiskin.

**trolari** k
*trolari, trolara, trolarar*
Janus gleddi seg at sleppa við **trolara**.



**trongur** l
*trongur, trong, trongt*
Troyggjan var ov **trong**.

**troyggja** kv
*troyggja, troyggju, troyggjur*
Omman bant Jóannesi **troyggju**.



**Tróndur**
*Tróndur, Trónd, Tróndi, Tróndar*
Vit fóru øll at vitja **Trónd**.

**tróta** s
*tróta, trýtur, treyt, trutu, trotið*
Ikki **trýtur** honum pening.

**trúgva** s
*trúgva, trýr, trúði*
Arnbjørn **trýr** hvørjum orði, sum Per sigur.

**trúlovaður** l
*trúlovaður, trúlovað, trúlovað*
Tey vóru **trúlovað** í átta ár, áðrenn tey giftust.

**tryggja** s
*tryggja, tryggjaði*
Hanus **tryggjaði** húsini fyri 900.000 kr.

**trý**
Abbabørni vóru **trý**.

**trýsta** s
*trýsta, trýstir, trýsti*
Elin **trýsti** tað seinasta úr tupuni.

**træ** h
*træ, træs, trø*
Børnini plantaðu eitt **træ.**



**trælur** k
*trælur, træls, trælir*
Víkingar høvdu nógvar **trælir**.

**trøð** kv
*trøð, traðar, traðir*
Úti á **trøðni** gingu tveir seyðir.

**tumma** s
*tumma, tummaði*
Jóhan **tummaði** seyðin.

**tummil**
**Tummil**, fremstifingur, longutong, lekifingur, lítlifingur.

**tunga** kv
*tunga, tungu, tungur*
Kristianna beit seg í **tunguna**.

**tungur** l
*tungur, tung, tungt*
Loddið var **tungt**.



**tunna** kv
*tunna, tunnu, tunnur*
Á føstulávint sláa tey **tunnu.**

**tunnur** l
*tunnur, tunn, tunt*
Óluva seymar skjúrt úr **tunnum** toy.

**turka** s
*turka, turkaði*
Ata **turkaði** sær um hendurnar.



Materiál chráněný autorskými právy

**turriklæði** h



*turriklæði, -klæðis, -klæði*
Sára bant **turriklæðið** um hálsin.

**turrur** l

*turrur, turr, turt*
Ida læt seg í **turrar** sokkar.

**tuska** s

*tuska, tuskaði*
Børnini **tuskaðu** úti á bønum.

**tutla** s

*tutla, tutlaði*
Gunnvá **tutlaði** mær nakað í oyrað.

**tú**

Tá ið **tú** ert sjúk, fert **tú** til lækna.

**túgva** kv

*túgva, túgvu, túgvur*
Í bønum eru nógvar **túgvur**.

**tún** h



*tún, túns, tún*
Børnini spæla í **túninum**.

**túrur** k

*túrur, túrs, túrar/túrir*
Fjúrtan ára gamal fór Hans fyrsta **túr** til skips.

**túsund**

Pápi og teir fingu **túsund** pund í gjár.

**tvætl** ⇨

**tveita** s

*tveita, tveitir, tveitti*
Dreingirnir **tveittu** seg á vøllin.

**tvey**

Tey eru **tvey** í húsi.

**tvinga** s

*tvinga, tvingaði*
Tey **tvingaðu** hann at lata seg væl í.

**tvíburar** h flt



Súsanna og Hans vóru **tvíburar.**

**tvífaldur** l

*tvífaldur, -føld, -falt*
Bandið var lagt saman **tvífalt**.

**tvílemba** kv

*tvílemba, -lembu, -lembur*
Í fjør átti bóndin á Heyggi fleiri **tvílembur**.

**tvíspora** s

*tvíspora, tvísporaði*
Rossini **tvísporaðu** gjøgnum dalin.


Materiál chráněný autorskými právy

**tvætla** s
*tvætla, tvætlaði*
Beiggi **tvætlaði** við meg.

**tvørtur**
Omma tók **tvørtur** um meg.

**tvørur** l
*tvørur, tvør, tvørt*
Tit akta ikki, tit eru **tvør**.

**tvøst** h
*tvøst, tvøsts, – flt*
Nielsi dámar væl turt **tvøst** og spik.



**tyggja** s
*tyggja, tyggur, tugdi, tugdu, tugt*
Oddur **tugdi** tyggigummi í heilum.

**tygum**
Eg kenni ikki **tygum**, men **tygum** kenna kanska meg.

**tykkara**
Vit koma til **tykkara** at eta døgurða í dag.

**tykkum**
Heima hjá **tykkum** er hugnaligt.

**tynna** s
*tynna, tynnir, tynti*
Karin **tynti** róman við mjólk.

**tyrla** kv
*tyrla, tyrlu, tyrlur*
**Tyrlan** flýgur út í Mykines.



**tyssi** h
*tyssi, tyssis, tyssi*
Kristin gav mostur síni eitt sólju**tyssi**.



**tystur** l
*tystur, tyst, tyst*
Kristin drakk vatn, tí at hann var so **tystur**.

**týdningur** k
*týdningur, týdnings, týdningar*
Fiskinnan hevur stóran **týdning** hjá okkum.

**týða** s
*týða, týðir, týddi*
Robinson Crusoe var fyrsta barnabók, ið **týdd** varð til føroyskt.

**týna** s
*týna, týnir, týndi*
Nógv mannalív vórðu **týnd** undir krígnum.

**týsdagur** k
Letingin segði: **Týsdag** havi eg góða tíð.

**tær**
Eg vil heldur fylgjast við **tær**.



Materiál chráněný autorskými právy

**tættur** l

*tættur, tøtt, tætt*

Teirra bátur lekur, men okkara er **tættur**.

**tørva** s

*tørva, tørvaði*

Mær **tørvar** nýggjan frakka.

**tøva** s

*tøva, tøvir, tøvdi*

Børnini **tøva** vøttirnar.



Materiál chráněný autorskými právy

**ugga** s

*ugga, uggaði*

Mamma **uggaði** dreingin, hann græt so illa.



**ulka** kv

*ulka, ulku, ulkur*

**Ulkur** eru inni við land.

**ull** kv

*ull, ullar, ull*

**Ull** er Føroya gull.

**ulpa** kv

*ulpa, ulpu, ulpur*

Anna hevur keypt sær nýggja **ulpu**.



**um**

Eg tók **um** hálsin á pápa.

**umdømi** h

*umdømi, -dømis, -dømi*

Børnini fáa **umdømi** til jóla.

**umframt**

**Umframt** Rúna var eisini Símun umborð á skipinum.

**umhvørvi** h

*umhvørvi, -hvørvis, -hvørvi*

Í bygdini ansaðu tey eftir, at **umhvørvið** var reint.

**umleið**

Eg fekk boð um at vera heima aftur **umleið** kl. 9.

**ummæli** h

*ummæli, ummælis, ummæli*

Bókin fekk gott **ummæli**.

**umsíðir**

Eg bíðaði leingi, men **umsíðir** kom hon.

**undan**

Eg tímdi ikki at bíða, so eg fór **undan** honum.
Vit fáa mjólk **undan** kúnni.

**undir**

Skógvarnir stóðu **undir** seingini.
Hann fór **undir** kav.



Materiál chráněný autorskými právy

**undirtøka** kv
*undirtøka, -tøku, -tøkur*
Málið fekk onga **undirtøku** og fall tí.

**unglingur** k
*unglingur, unglings, unglingar*
Nógvir **unglingar** eru við skipinum.

**ungur** l
*ungur, ung, ungt*
Súni hevur einki koyrikort enn, tí hann er ov **ungur**.

**unnast** s
*unnast, unnaðist*
Tóra mátti vera inni hjá ommuni, tí hon **unnaðist** so illa.

**upp**
Hann fór **upp** á takið at mála.

**uppi**
Fuglurin situr **uppi** á mønuni.

**uppskot** h
*uppskot, -skots, -skot*
Børnini komu við **uppskotum** um, hvar tey skuldu fara.

**uppvørpa** kv
*uppvørpa, uppvørpu, uppvørpur*
Tá ið lærarin skal sýna glærur, brúkar hann eina **uppvørpu**.

**upsi** k
*upsi, upsa, upsar*
Prísurin á **upsa** er góður í løtuni.

**ur** h
*ur, urs, ur*
**Urið** hjá mær gongur so snórabeint.

**urð** kv
*urð, urðar, urðar*
Grótið rapaði niður í **urðina**.

**urga** kv
*urga, urgu, urgur*
Ein næmingur spældi á **urgu**, hinir sungu.



**urt** kv
*urt, urtar, urtir*
Í bø og haga vaksa nógvar **urtir**.

**urtagarður** k
*urtagarður, -garðs, -garðar*
Í **urtagarðinum** vaksa berjatrø og nógvar aðrar plantur.

**uttan**
Húsini eru klædd við timbri **uttan**.


Materiál chráněný autorskými právy

# Ú

**úrslit** h

*úrslit, úrslits, úrslit*

Bilarnir koyrdu ov skjótt, og **úrslitið** varð, at ein fór út av vegnum.

**úrtøka** kv

*úrtøka, -tøku, -tøkur*

Teir fiskaðu væl og fingu tí góða **úrtøku**.

**ússaligur** l

*ússaligur, -lig, -ligt*

Hann var so **ússaligur**, at hann mátti fara í song, tá ið hann kom úr skúlanum.

**út**

Rúna fór **út** at spæla í áðni.

**úti**

Tá ið veðrið er gott, spæla vit **úti**.

**útjaðari** k

*útjaðari, -jaðara, -jaðarar*

Tey, ið búgva í **útjaðaranum** í býnum, hava langan veg inn í miðbýin.

**útlit** h

*útlit, útlits, útlit*

**Útlit** er til, at veðrið verður gott í morgin.

**útnyrðingur** k

*útnyrðingur, útnyrðings, – flt*

Ættin, ið er millum norðan og vestan, eitur **útnyrðingur**.

**útróður** k

*útróður, -róðrar, – flt*



Um veðrið verður gott, so fara vit til **útróðrar** við báti okkara.

**útsynningur** k

*útsynningur, -synnings, – flt*

Ættin millum vestan og sunnan eitur **útsynningur**.

**útvegur** k

*útvegur, -vegar, -vegir*

Torfinnur roynir at finna **útvegir** fyri, at øll sleppa at ferðast í summar.



Materiál chráněný autorskými právy

**vaða** s
*vaða, veður, vóð, vóðu, vaðið*
Tú verður vátur, um tú **veður** har, ið áin er djúp.

**vagga** s

*vagga, vaggaði*
Lítlasystir sovnaði, tá ið eg **vaggaði** henni.

**vaksa** s
*vaksa, veksur, vaks, vuksu, vaksið*
Bananir **vaksa** í heitum londum.

**vaksin** l
*vaksin, vaksin, vaksið*
Tvey **vaksin** fólk skreiða saman við børnunum.

**vakstrarhús** h

*vakstrarhús, -hús, -hús*
Í **vakstrarhúsum** vaksa bæði agurkur og tomatir.

**vakur** l
*vakur, vøkur, vakurt*
Ása vísti mær eina **vakra** mynd.

**val** h
*val, vals, val*
Løgtings**val** er vanliga fjórða hvørt ár.

**væl** ⇨

**vælkomin** ⇨

**vælsigna** ⇨

**vanda** s
*vanda, vandaði*
Tá ið tú **vandar** tær um eitt arbeiði, so gert tú tað so væl sum møguligt.

**vandamikil** l
*vandamikil, -mikil, -mikið*
Tað er **vandamikið** at sigla í ringum veðri.


Materiál chráněný autorskými právy

# V

**vandi** k
*vandi, vanda, vandar*
Báturin var í **vanda** í ódnarveðrinum.



**vandin** l
*vandin, vandin, vandið*
Ver ikki so **vandin**, et tað, tú hevur fingið.
Jákup er sera **vandin**, hann ger sær ómak.

**vani** k
*vani, vana, vanar*
Um tú gert okkurt ógvuliga ofta, so verður tað ein **vani**.

**vanligur** l
*vanligur, vanlig, vanligt*
Vestan er **vanlig** ætt hjá okkum.

**vanlukka** kv
*vanlukka, -lukku, -lukkur*
Tað kundi verið stór **vanlukka**, tí bilurin koyrdi ov skjótt.

**vanta** s
*vanta, vantaði*
Øll eru ikki komin enn, eitt **vantar** í.

**vænta** ⇨

**vanur** l
*vanur, von, vant*
Árni er **vanur** at ganga í sunnudagsskúla.

**vanvirða** s
*vanvirða, -virðir, -virdi*
Tú eigur ikki at **vanvirða** onnur.

**vara** s
*vara, varir, vardi*
Tað **vardi** meg ikki í morgun, at tað fór at regna í dag.
Talan **vardi** so leingi, at lítlasystir sovnaði.

**varði** k
*varði, varða, varðar*
Tá ið mjørkin kom, gingu tey eftir **varðunum**.



**varhugi** k
*varhugi, -huga, -hugar*
Marianna hevði **varhugan** av, at okkurt spennandi fór at henda.

**varin** l
*varin, varin, varið*
Spurvurin er sera **varin** fyri kettuni.

**varliga**
Tá ið tú gongur í brattlendi, mást tú ganga **varliga**.



Materiál chráněný autorskými právy

**varskógva** s
*varskógva, -skógvaði*
Teir **varskógvaðu**, áðrenn teir sprongdu steinin.

**vassa** s
*vassa, vassaði*
Tað er stuttligt at **vassa** á sandinum.



**væta** ⇨

**vættur** ⇨

**vátaslettingur** k
*vátaslettingur, -slettings, – flt*
Útvarpið boðaði frá regni og **vátaslettingi**.

**vatn** h
*vatn, vatns, vøtn*
Mamma setur **vatn** útá til drekkamunn.
Størsta **vatnið** í Føroyum eitur Sørvágsvatn.

**vatnskorpa** kv
*vatnskorpa, -skorpu, -skorpur*
Træsprekið fleyt í **vatnskorpuni**.

**vág** kv
*vág, vágar, vágir*
Bátarnir liggja á **vágni.**



**vága** s
*vága, vágaði*
Pápin **vágaði** lívið at bjarga soninum.

**vála** s
*vála, válaði*
Tey høvdu ongastaðni at fara og gingu tí og **válaðu**.

**vánaligur** l
*vánaligur, -lig, -ligt*
Veðrið var so **vánaligt**, at vit tímdu ikki at fara út.

**vánir** kv flt
Smálambið var so ússaligt, at abbi helt tað vóru ringar **vánir** um lív.

**vár** h
*vár, várs, vár*
Eftir vetur kemur **vár**.

**vársjavndøgur** h
**Vársjavndøgur** er í mars mánaði.

**vátligur** l
*vátligur, -lig, -ligt*
Í Føroyum er **vátligt**, tí her regnar illa.

**vátur** l
*vátur, vát, vátt*
Børnini høvdu vaðað í ánni og vóru tí **vát**.


Materiál chráněný autorskými právy

# V

**veðrur** k
*veðrur, veðrar, veðrar*
**Veðrar** hava vanliga stór horn.

**veður** h
*veður, veðurs, – flt*
Í dag er gott **veður**.

**veðurgarður** k
*veðurgarður, -garðs, -garðar*
**Veðurgarður** er ringur um sól ella mána.

**veðurlag** h
*veðurlag, -lags, – flt*
**Veðurlagið** í Føroyum er ólíkt **veðurlagnum** í Suðurevropa.

**veðurlamb** h
*veðurlamb, -lambs, -lomb*
Á mikkjalsmessu verða **veðurlombini** tikin.

**vegleiða** s
*vegleiða, -leiðir, -leiddi*
Kanst tú ikki **vegleiða** meg, tí eg skilji ikki vegleiðingina, sum fylgdi við maskinuni.

**vegur** k
*vegur, vegar, vegir*
Nú eru næstan allir **vegir** asfalteraðir.



**veiða** kv
*veiða, veiðu, veiður*
**Veiðan** hjá útróðrarbátunum var stór henda dagin.



**veiða** s
*veiða, veiðir, veiddi*
Teir hava **veitt** nógvan fugl.

**veit** kv
*veit, veitar, veitir*
Í bønum eru nógvar **veitir**.

**veita** s
*veita, veitir, veitti*
Áin skal **veitast** henda vegin.
Tey **veittu** honum hjálp.

**veitsla** kv
*veitsla, veitslu, veitslur*
Næmingarnir skipaðu fyri **veitslu**.

**vekja** s
*vekja, vekur, vakti*
Pápi vekur **meg** klokkan sjey.

**velja** s
*velja, velur, valdi*
Abbi **velur** bestu eplini til set.

**velta** kv
*velta, veltu, veltur*
Óli hevur eina reina**veltu** uppi í bønum.



Materiál chráněný autorskými právy

**velta** s

*velta, veltir, velti*

Í ár hava vit einki **velt**, men í fjør høvdu vit eina stóra eplaveltu.

**vena** s

*vena, venaði*

Gentan fekk ilt og **venaði** seg illa.

**vend** kv

*vend, vendar, vendir*

Gjørd gerð fær onga **vend**.

**venda** s

*venda, vendir, vendi*

Jákup **vendir** plátuni.

**venja** s

*venja, venur, vandi*

Ilt er av **venja** gamlan hund uppi at sita (orðtak).

**vera** s

*vera, er, var, vóru, verið*

Tú **ert** størri enn Einar.

**verdur** l

*verdur, verd, vert*

Hesin bilurin er einki **verdur**.

**verð** kv

*verð, verðar, verðir*

Hann sigldi **verðina** runt við seglskipi.

**verða** s

*verða, verður, varð, vórðu, vorðið*

Eg noyðist at **verða** heima í dag.

**verja** s

*verja, verjir, vardi*

Hann **vardi** seg manniliga móti bjørnini.

**verjugarður** k

*verjugarður, -garðs, -garðar*

Brimgarður er **verjugarður** fyri brimi.

**verkfrøðingur** k

*verkfrøðingur, -frøðings, -frøðingar*

**Verkfrøðingurin** stóð fyri vegarbeiðinum.



**verksmiðja** kv

*verksmiðja, -smiðju, -smiðjur*

Áki arbeiðir á eini **verksmiðju**, ið ger skáp.

**verpa** s

*verpa, verpur, varp, vurpu, vorpið*

Tjaldrið **verpur** fyrra partin í mai.



Materiál chráněný autorskými právy

# V

## veruleiki k

*veruleiki, -leika, -leikar*
**Veruleikin** er ofta beiskur.

## vestan

Bátarnir vóru á útróðri fyri **vestan**.

## vestur

**Vestur** er ein av teimum fýra høvuðsættunum.
Sólin rísur í eystri og setur í **vestri**.

## vetur k

*vetur, vetrar, vetrar*
Um **veturin** er ofta ringt veður.



## veturnætur kv flt

14. oktober rópa vit **veturnætur**.

## veva s

*veva, vevur, vav, vóvu, vovið*
Súsanna **vav** Biritu eitt turriklæði.

## vevja s

*vevja, vevur, vavdi*
Hann **vevur** alt saman til ein greyt.

## vevur k

*vevur, vevs, vevir*
Halla eigur ein góðan **vev**.

## við

Haraldur fylgdist heim **við** Álvi.

## viðarlund kv

*viðarlund, -lundar, -lundir*
**Viðarlundin** í Havn fór illa í eini ódn í 1988.

## viðferð kv

*viðferð, -ferðar, -ferðir*
Mikkjal fekk eina ringa **viðferð** av tí stóra dreinginum.

## viðføri h

*viðføri, -føris, – flt*
Tey høvdu nógv í **viðføri**, tá ið tey fóru.



## viðganga s

*viðganga, -gongur, -gekk, -gingu, -gingið*
Rannvá **viðgekk** at hava brotið rútin.

## viðgerð kv

*viðgerð, -gerðar, -gerðir*
Á sjúkrahúsinum fekk Hervør **viðgerð** fyri gikt.

## viðgitin l

*viðgitin, -gitin, -gitið*
Niels Finsen er **viðgitin** um allan heim.



Materiál chráněný autorskými právy

**viðmerking** kv
*viðmerking, -merkingar, -merkingar*
Dánjal skrivaði eina **viðmerking** í bókina.

**viðra** s
*viðra, viðraði*
Tað **viðraði** ikki hjá Atlantsflog at seta seg í gjár.

**viðskeri** k
*viðskeri, -skera, – flt*
Kristin hevur egg og pylsu til **viðskera**.

**viður** k
*viður, viðar, viðir*
Tað er góður **viður** í hesum trænum.



**vika** kv
*vika, viku, vikur*
Í næstu **viku** fer Jónhild at ferðast.

**vilja** s
*vilja, vil, vildi, vildu, viljað*
Signar hevur ongantíð **viljað** latið meg sloppið við.

**villa** kv
*villa, villu, villur*
Í roknistykkinum vóru tvær **villur**.

**villast** s
*villast, viltist*
Árant og Bjarni **viltust** í mjørkanum.

**vinaligur** l
*vinaligur, -lig, -ligt*
Dánjal er altíð so **vinaligur**.

**vinda** s
*vinda, vindur, vant, vundu, vundið*
Merkið varð **vundið** í húnar hátt.

**vindeyga** h
*vindeyga, -eyga, -eygu*
Durita hyggur út gjøgnum **vindeygað**.



**vindil** k
*vindil, vindils, vindlar*
Mass roykir **vindil**.

**vindur** k
*vindur, vinds, vindar*
Í dag er nógvur **vindur.**

**vinkona** kv
*vinkona, -konu, -konur*
Sanna er **vinkona** mín.

**vinmaður** k
*vinmaður, -mans, -menn*
**Vinmaður** Honnu fór til skips í gjár.

**vinna** kv
*vinna, vinnu, vinnur*
Fyrr var kolið ein týðandi **vinna** í Hvalba.

**vinna** s
*vinna, vinnur, vann, vunnu, vunnið*
GÍ **vann** dystin 1-0.

**vinningur** k
*vinningur, vinnings, vinningar*
Størsti **vinningur** var eitt krov.

**vinstri** l
*vinstri, vinstra, vinstra*
Eg havi ilt í **vinstra** oyra.

**vinur** k
*vinur, vinar, vinir*
Heðin og Helgi eru **vinir**.

**violin** **sí fiól**

**virði** h
*virði, virðis, virði*
Gull hevur nógv **virði**.

**virðing** kv
*virðing, virðingar, virðingar*
Vit eiga at hava **virðing** fyri hvør øðrum.

**virðisløn** kv
*virðisløn, -lønar, -lønir*
Rithøvundurin fekk **virðisløn** fyri barnabókina.

**virka** s
*virka, virkaði*
Tólini **virka** væl.
Elin **virkaði** eini hosubond.



**virki** h
*virki, virkis, virki*
Í Føroyum eru nógv flaka**virki**.

**virkin** l
*virkin, virkin, virkið*
Oddvá hevur altíð okkurt at takast við, hon er sera **virkin**.

**vissur** l
*vissur, viss, vist*
Ræst kjøt og súpan var **vissur** døgurði 2. jóladag.

**vist** kv
*vist, vistar, vistir*
Abbi var fjúrtan dagar á **vistar**heiminum.

**vit**
**Vit** fara í skúla klokkan átta.

**vit** h
*vit, vits, – flt*
Anna datt og misti **vitið**.



Materiál chránený autorskými právy

**vita** s
*vita, veit, visti, vistu, vitað*
Lærarin spurdi, og eg **visti** at svara.

**viti** k

*viti, vita, vitar*
Á Mykineshólmi stendur ein **viti**.

**vitja** s
*vitja, vitjaði*
Í morgin fara vit at **vitja** vinfólk okkara í Tjørnuvík.

**vitleysur** l
*vitleysur, -leys, -leyst*
**Vitleys** bilkoyring førir ofta til ferðsluvanlukkur.

**víða**
Hann ferðaðist **víða** hvar í heiminum.

**víðka** s
*víðka, víðkaði*
Arni **víðkaði** troyggjuna hjá mær.

**vígsla** kv
*vígsla, vígslu, vígslur*
Minnisvarðin varð vígdur í gjár, Óli og Ása vóru til **vígsluna**.

**vígvøllur** k
*vígvøllur, -vallar, -vøllir*
Kapparnir í kvæðunum bardust á **vígvøllum**.

**vík** kv
*vík, víkar, víkir*
Vindurin var nógvur inn á **víkina**.

**víkingur** k

*víkingur, víkings, víkingar*
Á vári fóru **víkingar** í víking.

**víkja** s
*víkja, víkur, veik, viku, vikið*
Teir **viku** fyri fíggindanum.

**vísa** kv
*vísa, vísu, vísur*
Tey kvóðu tvær **vísur**.

**vísa** s
*vísa, vísir, vísti*
Hann **vísti** mær myndina, hann hevði keypt.

**vísdómur** k
*vísdómur, vísdóms, – flt*
Í góðum bókum er nógvur **vísdómur**.

**vísur** l
*vísur, vís, víst*
Tróndur í Gøtu var bæði **vísur** og snildur.

## vón kv
*vón, vónar, vónir*
**Vónirnar** eru góðar fyri at flogfarið fær sett seg.

## vónandi
**Vónandi** koma tey í morgin.

## vónleysur l
*vónleysur, -leys, -leyst*
Teir máttu fara í bjargingarbátin, tí støðan var **vónleys**.

## væl
*væl, betur, best*
Hann dugir **væl** at svimja, men hon dugir **betur.**

## vælkomin
Tá ið veitslan byrjaði, beyð Ása **vælkomin**.

## vælsigna s

*vælsigna, -signaði*
Jesus **vælsignaði** smábørnini.

## vænta s
*vænta, væntaði*
Vit **væntaðu** mostur at koma hvørja løtu.

## væta kv
*væta, vætu, vætur*
Tað regnar og regnar, ein øgilig **væta**.

## vættur kv
*vættur, vættrar, vættrar*
**Vættrar** eru smáar.

## vøgga kv
*vøgga, vøggu, vøggur*
Katrin og Sámal eru í **vøggu**stovu.

## vøllur k
*vøllur, vallar, vøllir*
Í Gundadali í Havn eru tveir **vøllir**.

## vørr kv
*vørr, varrar, varrar*
Ingi beit seg í **vørrina**.

## vøttur k

*vøttur, vattar, vøttir*
Maria er køld um hendurnar, hon hevur gloymt **vøttirnar**.

# Y

## **ymiskur** l
*ymiskur, ymisk, ymiskt*
**Ymiskt** undirhald var á veitsluni.

## **ymsastaðni**
**Ymsastaðni** í haganum vaksa ber.

## **ynda** s
*ynda, yndaði*
At **ynda** er tað sama sum at kína.

## **yndisligur** l
*yndisligur, -lig, -ligt*
Sangurin var **yndisligur**.

## **yngri** sí ungur

## **yngul** k
*yngul, ynguls, yngul*
Tá ið rogn verður klakt, kemur **yngul** út.

## **ynskja** s
*ynskja, ynskir, ynskti*
Vit **ynsktu** hvør øðrum gleðilig jól.

## **yrkadagur** k
*yrkadagur, -dags, -dagar*
Seks **yrkadagar** eru í vikuni.

## **yrking** kv
*yrking, yrkingar, yrkingar*
Tjúgu **yrkingar** eru í savninum.

## **yrkja** s
*yrkja, yrkir, yrkti*
H. A. Djurhuus dugdi væl at **yrkja**.

## **yrkjari** k
*yrkjari, yrkjara, yrkjarar*
Mikkjal á Ryggi var góður **yrkjari**.

## **yvir**
Hundurin leyp **yvir** um ánna.

**yvirlit** h
*yvirlit, -lits, -lit*
Bókavørðurin gav okkum eitt gott **yvirlit** yvir føroyskar bøkur.

**yvirvaksin** l
*yvirvaksin, -vaksin, -vaksið*
Tá ið teir komu inn á kópalátrið, kom ein **yvirvaksin** kópur ímóti teimum.

**ýl** h
*ýl, ýls, ýl*
Vit hoyrdu eitt ønskriligt **ýl**.

**ýti** h
*ýti, ýtis, ýti*
Vit nýta **ýti**, tá ið vit leggja mið.

**æða** kv

*æða, æðu, æður*

Ein **æða** svimur úti fyri lendingini.

**æðr** kv

*æðr, æðrar, æðrar*

Blóðið rennur í **æðrunum**.

**æl** h

*æl, æls, æl*

Turt hevði verið allan dagin, men móti kvøldi kom eitt **æl**.



**ær** kv

*ær, ær, ær*

Eg eigi eina **ær** og eitt smálamb.

**ærligur** l

*ærligur, ærlig, ærligt*

Óli var **ærligur** og segði sum var.

**æti** h

*æti, ætis, – flt*

Nógvur fuglur var at síggja úti á firðinum, so har mundi vera nógv **æti**.

**ætla** s

*ætla, ætlaði*

Anna **ætlaði** sær út fyri dyr, men tá kom eitt æl.

**ætt** kv

*ætt, ættar, ættir*

Tey vóru av ríkari **ætt**.
Tað er kalt, tá ið hann er norðan í **ættini**.

**ævi** kv

*ævi, ævi, ævir*

Helen Keller var blind alla **ævi** sína.

**ævintýr** h

*ævintýr, ævintýrs, ævintýr*

Omma segði okkum eitt **ævintýr** um eina kongsdóttur, sum ikki vildi giftast.

# Ø

**øða** kv

*øða, øðu, øður*

Tey høvdu **øðu** til agn, tá ið tey vóru á floti.



**øði** kv

*øði, øði, – flt*

Vit vóru í **øðini**, tí vit ikki sluppu við.

**øðisligur** l

*øðisligur, -lig, -ligt*

Stríðið var **øðisligt**.

**øðrum**

Kári stendur við **øðrum** beininum í bátinum.

**øðrumegin**

Sigga sat **øðrumegin** meg.

**øðrvísi**

Alt var **øðrvísi** eftir hendingina.

**øgiligur** l

*øgiligur, -lig, -ligt*

**Øgiligt** var at hyggja út av tromini.

**øgn** kv

*øgn, agnar, agnar*

Ærin var eyðkend av eini svartari **øgn** aftan fyri oyrað.
Vit bæði eru væl í **øgn**.

**øki** h

*øki, økis, øki*

Alt **økið** var avbyrgt, so eingin slapp framat.

**økil** k

*økil, økils, øklar*

Eg stóð upp um **øklar** í sjógvi.

**økja** s

*økja, økir, økti*

Bilurin **økti** um ferðina niðan eftir Oyggj.



Materiál chráněný autorskými právy

# Ø

**øks** kv
*øks, øksar, øksir*
Hann stendur við **øks** og smíðar bát.

**øksl** kv
*øksl, akslar, akslir/akslar*
Símun datt og fekk ilt í **økslina**.

**øl** h
*øl, øls, – flt*
Bryggjaríini bryggja **øl**.

**øld** kv
*øld, aldar, øldir*
Norðmenn komu til Føroya á fyrsta sinni í 9. **øld**.

**øll**
**Øll** børnini eru í skúla í dag.

**øna** s
*øna, ønir, ønti*
Eg spurdi og spurdi, men hann **ønti** ikki aftur.

**ørindi** h
*ørindi, ørindis, ørindi*
Eg bað Finnbjørg fara **ørindi** fyri meg.
Vit kvóðu tríati **ørindi** av Regini smiði.

**ørn** kv
*ørn, arnar, ørnir*
Tá ið vit vóru burtur í haga í gjár, sóu vit eina **ørn**.

**ørur** l
*ørur, ør, ørt*
Tey søgdu hann vera **øran** í høvdinum at fara í tí ringa veðrinum.

**ørviti** h
*ørviti, ørvitis, – flt*
Marin hevði nógvan fepur og tosaði í **ørviti**.

**øsi** h
*øsi, øsis, – flt*
Snar hevur ein hvítan blett undir **øsinum**.

**øska** kv
*øska, øsku, – flt*
Kári sló **øskuna** úr pípuni.
**Øsku**dólgur sat og rakaði í **øskuni**.

**Øssur**
*Øssur, Øssur, Øssuri, Øssurs*
Torkil gav **Øssuri** eina bók í føðingardagsgávu.

**øvugtur** l
*øvugtur, øvugt, øvugt*
Ikki varð talað **øvugt** orð í húsinum.

**øvundsjúkur** l
*øvundsjúkur, -sjúk, -sjúkt*
Ingunn vann dukkuna, og øll hini vóru **øvundsjúk.**



Materiál chráněný autorskými právy

# ORÐASKYN

## Mín fyrsta orðabók

bási í



*flt*
**ytakjøt**.

vit ikki

hagan.

ein ríva.

ni.

N

**níggju**
Tóra er **níggju** ára gomul.

**níggjundi**
*níggjundi, níggjunda, níggjunda*
= 9.
**9.** februar fyllir Óli

**nýggjur** ⇨

**nýra** ⇨

**nísa** kv
*nísa, nísu, nísur*
**Nísa** er ein lítil tannhvalur.

**níta** s
*níta, nítur, neit, nitu, nitið*
Tað **neit** at hjartanum, tá ið hundurin doyði.

**nýta** ⇨

**níti**
Langabbi varð **níti** í gjár.

**nýtiligur** ⇨

**indiáni** k
*indiáni, indiána, indiánar*
Tá ið tey hvítu komu til Amerika, hittu tey **indiánar**.



**yndisligur** ⇨

**indur** h
*indur, indurs, indur*
**Indrini** verða kókað.

**Ingi**
*Ingi, Inga, Inga, Inga*
Lærarin spurdi **Inga**, um hann kom við til Klaksvíkar.

**yngri** ⇨

**yngul** ⇨

**inn**
Nú fer at regna, og tey fara

**innanhýsis**
Tey høvdu tað hugnaligt **innanhýsis**.

**innbúgv** h
*innbúgv, -bús, -búgv*
**Innbúgvið** er tryggjað fyri eld- og vatnskaða.

**inni**
Súkklan stendur **inni** í kjallaranum.

**innlegg** h
*innlegg, -legs, -legg*
Inga fekk **innlegg** í skógvarnar.

**innspræning** kv
*innspræning, -spræningar, -spræningar*
Páll fekk eina **innspræning** fyri bruna.

Materiál chránený autorskými právy